# GERÐABÓK

**Dato:** 21. mars 2024 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 48/24 – 70/24**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jákup Dam
Gunvør Balle
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Turið Horn
Birita Baldvinsdóttir Iversen
Jóhan Petur Eyðfinnur Johannesen
Bogi Andreasen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Bogi Jacobsen
Hermann Mortensen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 48/24 | 24/01599-1 | Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býráðsfundi 21. mars 2024 | 192 |
| 49/24 | 24/01755-1 | Annika Olsen berst frá at møta á býráðsfundi 21. mars 2024 | 193 |
| 50/24 | 24/01756-1 | Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býráðsfundi 21. mars 2024 | 194 |
| 51/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 195 |
| 52/24 | 24/01450-2 | Umsókn um loyvi til víðarisølu. Matr.nr. 1326ac, Tórshavn. | 197 |
| 53/24 | 22/05269-2 | Uppleysn av legatunum : J. Nólsøes legat og Ole & Johanne M. Olsens legat | 199 |
| 54/24 | 23/07029-1 | Broyting av viðtøkum fyri Kommunufelagið | 203 |
| 55/24 | 23/06296-4 | Svimjihøllin 2024 – Prísskipan og upplatingartíðir | 207 |
| 56/24 | 24/00717-2 | Umsókn um stuðul at framtíðartryggja og menna Listasavn Føroya | 212 |
| 57/24 | 22/00894-1 | Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla | 214 |
| 58/24 | 18/00992-1 | Lendisgøtur | 226 |
| 59/24 | 24/01451-1 | Umbøn um eykajáttan til kontu 7110 | 242 |
| 60/24 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 245 |
| 61/24 | 22/01377-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | 257 |
| 62/24 | 22/00590-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø | 264 |
| 63/24 | 22/07317-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur | 268 |
| 64/24 | 21/00804-6 | Broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 193 og 191b, Gr. Kambansgøta 11, Tórshavn | 272 |
| 65/24 | 23/02842-6 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 5 | 276 |
| 66/24 | 23/03807-2 | Broyting av almennu byggisamtyktini frá A1 til 4. Grundumráði fyri part av matr.nr. 13a, Norðadalur | 279 |
| 67/24 | 23/04694-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, matr. nr. 139a, Hoyvík | 282 |
| 68/24 | 24/01136-1 | Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2023 hjá Westward Ho | 286 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 69/24 | 24/00061-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 | 288 |
| 70/24 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 290 |

**Til viðgerðar**

## 48/24 Annfinn Brekkstein berst frá at møta á býráðsfundi 21. mars 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 48/24 | 24/01599-1 |

**Málslýsing**
Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jóhan Petur Johannesen, eru loknar.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Tikið til eftirtektar.

# 49/24 Annika Olsen berst frá at møta á býráðsfundi 21. mars 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 49/24 | 24/01755-1 |

**Málslýsing**
Annika Olsen hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Bogi Andreasen, eru loknar.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Tikið til eftirtektar.

# 50/24 Kristianna Winther Poulsen berst frá at møta á býráðsfundi 21. mars 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 50/24 | 24/01756-1 |

**Málslýsing**
Kristianna Winther Poulsen hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita B. Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Tikið til eftirtektar.

# 51/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 27/24 | 24/00063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 51/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 52/24 Umsókn um loyvi til víðarisølu. Matr.nr. 1326ac, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 69/24 | 24/01450-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 52/24 | 24/01450-2 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá. Sókn Advokatar, søkir vegna eigara kommununa um loyvi til víðarisølu av ognini matr.nr. 1326ac, Tórshavn.

**Lýsing av málinum.**
Addr. Staravegur 20
Vídd 2.614m²
Stykkið er planerað og asfalterað, men annars óbygt.
Byggisamtykt. B 4. Vinnuøki.
Grundstykkið verður brúkt til bilagoymslu í samband við bilasøluna sum verður rikin á grannaognini matr.nr. 1326i, Tórshavn.

**Grundstykkið hevur havt ymiskar eigarar.**

- 1979/1980. Kommunan selur matr.nr. 1326i, til P/F Ivan Johansen. Skeytið 163.150,- kr. Tað framgongur ikki á upprunaskeytinum, um stykkið er planerað.
- 1991. 2.614 m² verða frábýttir til matr.nr. 1326ac. Tá sami eigari. Deklaratión verður tinglýst um at stykkið ikki kann seljast uttan góðkenning frá kommununi, og hevur kommunan forkeypsrætt.
- 2004. P/F Ivan Johansen selur til Sp/f MCM. Víðarisølu skeyti 2,3 mill. kr.
- 2017 Sp/f MCM selur til P/F Waag. ( Málslýsing 17/01075 ) Víðarisølu skeyti 8,5 mill. kr.
- 2024. Umsókn um víðarisølu. Víðarisølu skeyti 11,5 mill. kr. Seljarið er P/F Ivan Johansen Bilar, nú P/F Waag. Keypari er Sp/f Matr.nr. 1326ad. c/o Fróði Sigvardsen, stjóri. Yvirtøkudagur 01.03.2024.

Sambært umsóknini, hevur keyparin ætlanir um at byggja bygning á stykkinum.

**Ásetingar í uppruna skeytinum.**
Sambært áseting Í uppruna fyribils skeytinum frá 1978 – 1979 og endaliga skeytinum frá 1980, kann kommunan krevja ognarrættin til økið aftur ímóti fullum endurgjaldið av dokumenteraðum útreiðslum frá eigaranum við 5 p% í rentu frá yvirtøkudegnum at rokna, hetta tó í fyrsta lagi frá tí av at rokna, at ein útreiðsla er borin. Er nøkur bygging farin fram, so endurrindar Tórshavnar kommuna keyparanum dokumenteraðu útreiðslur hansara til hesa, um annars nýtsla kann gerast av tí bygda.

**Tinglýst deklaratión.**
Sambært tinglýstari deklaratión 18.06.1991 framgongur, at táverandi eigari P/f. Ivan Johansen, hevur sundurbýtt matr.nr. 1326i, soleiðis at parkeringsøki vestanfyri verður sjálvstøðugt matr.nr. og verða fylgjandi treytir settar.
Frábýtti lutur kann ikki seljast fyrr enn hús eru bygd á stykkinum.
Um eigarin vil selja stykkið óbygt hevur býráðið tá forkeypsrætt og tá fyri uppruna keypspeningin og skjalprógvaðum útreiðslum fyri arbeiðið gjørt á stykkið.
Átalurætt hevur Tórshavnar kommuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Umsókn frá advokati í mars 2024. Upprunaskeyti við servituttum 2017/2018. Deklaratión 1991. Býráðssamtykt 27. apríl 2017. Víðarisøluskeyti 04.03.2024. Kort/mynd av stykkinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Vísandi til at kommunan fleiri ferðir áður hevur loyvt víðarisølu av vinnuligum grundstykkjum, og vísandi til ógreiðu viðurskiftini við rentuásetingini, mæla kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni til at loyva víðarisølu, og til at víkja forkeypsrættin í hesum føri.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 53/24 Upploysn av legatunum : J. Nólsøes legat og Ole & Johanne M. Olsens legat

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 286/22 | 22/05269-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 70/24 | 22/05269-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 53/24 | 22/05269-2 |

**Upprunin til málið**
Upployssa tveir óvirknar grunnar, ið Tórshavnar kommuna umsitur.

**Lýsing av málinum**
Grannskoðanin hjá Tórshavnar kommunuført fram, at

"Mælt verður til, at greiða verður fingin á, hvat skal henda við óvirknum legatum"

Enn eru tvey óvirkin legat, nevniliga:

- Skrædder Johannes Nolsøes legalt
- Henrikka Andersen legat (eisini kallað Ole & og Johanne M. Olsen legat)

Heimild er at fáa upployst slíkar grunnar við loyvi frá grunnamyndugleikanum Føroya Landsstýri.

Sambært viðtøkunum fyri Grunn Johs. Nolsøe skraddara verður grunnurin stjórnaður av eini nevnd, ið er tann til eina og hvørja tíð verandi fíggjarnevnd hjá Tórshavnar býráð. Viðtøkurnar vóru samtyktar 26 okt. 2000 av tásitandi fíggjarnevnd.

Av eina og hvørjari orsøk, ið vit ikki kenna í dag, blivu viðtøkurnar ongantíð undirskrivaðar av nevndini tá og verður tí heitt á sitandi fíggjarnevnd at undirskrivar viðtøkurnar, soleiðis at farast kann formelt undir eina tilgongd at upployssa grunnin.

Sambart viðtøkunum er endamálið við grunninum at varðveita og endurskapa sonevnda "Skraddaragarðin" í Miðhoydølum til framan fyri almenningin. Skarddaragarðurin liggur á Skraddaratrøðni, matr. nr. 49a, Hoyvík. Skógfriðingarnevndin hevur leigusáttmála til økið og til "gamla urtagarðin hjá skraddaranum" ið Skógfriðingarnevndin hevur bundið seg til at varðveita.

Grunnurin hevur sostatt ikki ræði á økinum vegna leigusáttmálan og gamli urtagarðurin er ikki varðveittur. Hetta kann skyldast, at virksemið hjá Skógarrøktini er nógv broytt seinastu árini

Grunnafæið er kr. 3.221.943,06.

Mælt verður til, at fíggjarnevndin játtar, at søkt verður Føroya Landsstýri um, at hesin grunnur verður upployssur vegna tað at grunnurin ikki virkar eftir síni ætlan og at umsitingin ger uppskot til hvussu økið verður skipað framyvir.

Til dømis kann kommunan gera ein ískoytissáttmála við Skógrøktina, har skraddaragarðurin verður tikin burtur úr leigusáttmálanum, soleiðis at garðurin aftur verður settur í sín vakra stand, sum var ynski hjá skraddaranum. Og at ein heildarætlan verður gjørt fyri garðin. At garðurin verður settur í stand við at planta plantur og seta benkur upp , at gera eina gøtu gjøgnum garðin, sum gongur frá gøtuni hinumegin Hvítanes vegin, tvørtur um garðin og yvir til gøtuna sum gongur oman móti Havnini.

Hetta er treytað av, at Føroya Landsstýri loyvir at upploysa grunnin og handað Tórshavnar kommunu ognir grunnsins við treyt um at garðurin verður endurskaptur og leigumálið heldur fram við Skógfriðingarnevndina heldur fram.

Sambært Henrikka Andersen legatinum er endamálið, at renturnar av legatinum skulu útbýtast millum tey gomlu á Ellisheiminum hvønn jólaaftan og legatbestýrari er kassanevnd (fíggjarnevndin) Tórshavnar býráðs.

Grunnafæið er kr. 27.070,38

Mælt verður til, at fíggjarnevndin heimilar umsitingini at søkja Føroya Landsstýri um at fara undir at upploysa Henrikku Andersen legatið og handa fæið til Ellisheimið, so tað kemur teimum gomlu, ið búgva har til góðar.

Um fíggjarnevndin samtykkir at søkjast skal Føroya Landsstýri um loyvi til at upploysa legatini, so kemur málið aftur í fíggjarnevndina við einum ítøkiligum uppskoti frá umsitingini til, hvussu fæið í báðum legatunum skal nýtast.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini til at loyva, at kommunan vendir sær til Landstýrið við umbøn um at upploysa omanfyri nevndu grunnar.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Avtøka av Grunni Skraddar Johannes Nolsøe:

Fundir hava verið við grunnmyndugleikan um at taka av áðurnevnda Grunnur Skraddar Johannes Nolsøe.

Grunnmyndugleikin hevur lagt dent á orðingina í testamentinum hjá Johannes Nolsøe, um at renturnar hjá legatkapitalinum skal brúkast til:

> ”(…)
>
> til støtte for vanskeligt stillede, forældreløse Børn, og udarbejdsdygtige Personer ... der er hjemmehørende i Thorshavn og i Nolsø Bygd.
>
> Og fortrinsberettige er børn og børnebørn af min afdøde broder Napoleon Nolsøe, for så vidt de iøvrigt kan anses kvalificerede.
>
> (…)”

Kannað hevur verið, um tað vóru nøkur “*fortrinsberettigede*”, men ásannað var, at tey ikki vóru á lívi/*kvalificerede*. Eftir stendur so “*vanskeligt stillede børn*”.

Sambært siðvenju á økinum er tað ein treyt fyri at kunna avtaka ein grunn, at grunnfæið verður latið til eitt endamál, ið er sambæriligt við endamálið hjá grunninum.

Sostatt er ein avtøka av grunninum treytað av, at grunnfæið verður latið til okkurt endamál, sum kann rúmast innan fyri testamentið. *Vísast skal til skjal nr. 22/05269-14 í málinum*.

Tær føstu ognirnar, sum grunnurin átti, standa í dag í navni Tórshavnar kommunu, og sostatt er tað bert tann kontanti peningurin, sum stendur í navni grunnsins, umleið 2,2 milliónir krónur.

Vísast skal á, at skraddaragarðurin í Miðhoydølum verður ikki nevndur í testamentinum. Garðurin er nevndur í viðtøkunum hjá grunninum og í leigusáttmálanum við Skógfriðingarnevndina, har ið Skógfriðingarnevndin hevur bundið seg til at varðveita “*gamla urtagarðin hjá skraddaranum*”.

Grunnmyndugleikarnir hava boðað frá, at grunnurin kann verða avtikin, og at peningurin kann latast til *Kvinnuhúsið í Havn*, tá hetta endamálið liggur næst endamálinum í viðtøkunum og testamentinum. *Vísast skal til skjal nr. 22/05269-17 í málinum*.

Mælt verður til, at fíggjarnevndin samtykkir at avtaka grunnin, og at lata grunnfæið til Kvinnuhúsið.

Um fíggjarnevndin samtykkir at avtaka grunnin, skal avgerðin hjá fíggjarnevndini leggjast fyri grunnmyndugleikan til endaliga góðkenningar.

<u>Avtøka av Grunni Henrikka Andersen legat</u>:
Fundur hevur verið við grunnmyndugleikan um at taka av áðurnevnda Grunnin “*Henrikka Andersens legat til minni um foreldrini Ole Olsen (Rikke) og Johanne Marie Olsen úr Havn*”.

Grunnmyndugleikin hevur fingið avrit av:

1. Avrit av innistandandi hjá Grunninum
2. Fíggjarnevndarsamtykt um at taka grunnin av

Sambært skrivi frá Trygva Samuelsen sakførara skuldi kassanevnd Tórshavnar Býráðs (fíggjarnevndin) umsita legatið sum legatnevnd (*legatbestyrelse*).

Henrikka Andersen legatið ásetur sum endamál, at renturnar av legatinum skulu útbýtast millum tey gomlu á Ellisheiminum hvønn jólaaftan. *Vísast skal til skjal nr. 22/05269-19 og 22/05269-20 í málinum*.

Sambært siðvenju á økinum er tað ein treyt fyri at kunna avtaka ein grunn, at grunnfæið verður latið til eitt endamál, ið er sambæriligt við endamálið hjá grunninum.

Sostatt er ein avtøka av grunninum treytað av, fíggjarnevndin tekur avgerð um at taka grunnin av, við teirri grundgeving, at tíðin er farin frá grunninum, og at grunnfæið sambært viðtøkunum fer til Ellisheimið í Havn.

Mælt verður til, at fíggjarnevndin samtykkir at avtaka grunnin, og at lata grunnfæið til Ellisheimið í Havn.

Um fíggjarnevndin samtykkir at avtaka grunnin, skal avgerðin hjá fíggjarnevndini leggjast fyri grunnmyndugleikan til endaliga góðkenningar.

**Skjøl:**

22/05269-3: “*Viðtøkur fyri Grunn Skraddar Johannes Nolsøe*”
22/05269-14: “*Skriv frá Juliannu Klett - Grunnur Skraddar Johannes Nolsøe*”
22/05269-17: “*Skriv um at Grunnur Skraddar Nolsøe kann avtakast*”
22/05269-18: “*Testamente - Skrædder Johannes Pauli Nolsø*”
22/05269-19: “*Skriv frá Juliannu Klett - Nevndarfundur um at avtaka Henrikke Andersen legat*”
22/05269-20: “*Skriv frá Trygve Samuelsen sakførara um at TK skuldi umsita legatið Henrikke Andersen*”
22/05269-21: “*Skriv frá TK um játtan sum legatnevnd fyri Henrikke Andersen Legat*”

**Tilmæli:**

Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini til at avtaka grunnin Skrædder Johannes Nolsøes Legat, og at lata grunnfæið til Kvinnuhúsið treytað av, at grunnmyndugleikin endaliga góðtekur avgerðina hjá fíggjarnevndini.

Deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla samstundis fíggjarnevndini til at avtaka grunnin Henrikke Andersen legat, og lata grunnfæið til Ellisheimið í Havn treytað av, at grunnmyndugleikin endaliga góðtekur avgerðina hjá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 54/24 Broyting av viðtøkum fyri Kommunufelagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 06.12.2023 | 348/23 | 23/07029-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.12.2023 | 362/23 | 23/07029-1 |
| 3 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 326/23 | 23/07029-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 78/24 | 23/07029-1 |
| 5 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 54/24 | 23/07029-1 |

**Upprunin til málið**
Uppskot til viðtøkubroytingar fyri Kommunufelagið at koma í gildi ávikavist 1. januar 2024 og 1. januar 2025

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ein arbeiðsbólkur mannaður við borgarstjórunum í Tórshavn, Runavík og Eysturkommunu hevur saman við Eyðuni Christiansen, stjóra í Kommunufelagnum, og Janus Haraldsen, løgfrøðingi hjá Kommunufelagnum, gjørt uppskot til nýggjar viðtøkur fyri Kommunufelagið.

Á eykaaðalfundi í Kommunufelagnum 15. desember skulu limakommunurnar taka støðu til tvey uppskot um at broyta viðtøkurnar fyri felagið. Í øðrum uppskotinum koma broytingar í gildi 1. januar 2024 og í hinum uppskotinum verða nýggjar viðtøkur settar í gildi fyri felagið galdandi frá 1. januar 2025.

Broytingin, sum kemur í gildi 1. januar 2024 er bert smávegis broyting, sum hevur við sær, at nýggj áseting verður sett inn í viðtøkurnar sum § 7, stk. 10 við hesi orðing:

"Stk. 10. Borgarstjórar úr limakommununum, sum ikki sambært stk. 2-4 hava valt umboð í stýrinum, hava rætt at møta, taka orðið og virka á stýrisfundum á jøvnum føti við valdar stýrislimir, tó uttan atkvøðurætt. Stýrið kann tá verða nevnt borgarstjórafundurin."

Við broytingini fáa borgarstjórarnir úr øllum limakommununum rætt at møta á stýrisfundi, tó at borgarstjórarnir í limakommununum, sum ikki hava valt umboð í stýrinum, ikki sleppa at atkvøða á stýrisfundinum.

Eykaaðalfundurin skal harumframt taka støðu til nýggjar viðtøkur, ið ætlanin er skulu koma í gildi 1. januar 2025.

Eftir nýggju viðtøkunum er aðalfundurin framvegis hægsta vald felagsins, og lagt verður ikki upp til at gera broytingar í atkvøðutalinum hjá hvørjari kommunu sær. Eftir 1. januar 2025 verður tað eins og í dag soleiðis, at hvør kommuna atkvøður á aðalfundinum við einari atkvøðu fyri hvønn íbúgva í kommununi 1. januar undan aðalfundinum.

Aðrar broytingar eru tó meira víðfevndar. Í staðin fyri, at stýrið við 13 limum er ovasta leiðsla felagsins í málum, sum ikki skulu viðgerast á aðalfundi, verður ein borgarstjórafundur, har allir borgarstjórar hava rætt at møta, ovasta leiðsla felagsins í málum, sum ikki krevja viðgerð á aðalfundi.

Borgarstjórafundurin skipar seg við forfólki og næstforfólki, og fundur er umleið seks ferðir árliga.

Á borgarstjórafundi hevur hvør kommuna eina atkvøðu fyri hvørt byrjað 1.000 íbúgvatal í kommununi 1. januar undan fundinum, tó so , at eingin kommuna hevur fleiri enn 45% av samlaðu atkvøðunum.

Hetta er ein broyting í mun til verandi skipan, har hvør kommuna hevur eina atkvøðu fyri hvønn íbúgva í kommununi.

Fyri Tórshavnar kommunu merkja nýggju viðtøkurnar, at frá at hava havt góð 42 % av atkvøðunum fer ávirkanin hjá kommununi niður í 24/73, ið svarar til góð 33 % av atkvøðutalinum.

Ein onnur broyting er, at starvsbólkurin dettur burtur.

Forfólkið og næstforfólkið, sum borgarstjórafundurin velur, eru saman við forfólkinum í starvsnevndini fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið formansskapurin í Kommunufelagnum.

Formansskapurin hevur fund eina ferð um mánaðin og tekur avgerð í málum, sum ikki skulu viðgerast á borgarstjórafundi ella aðalfundi.

Ikki er ásett i viðtøkunum, hvørji mál krevja viðgerð á borgarstjórafundi, og hvørji kunnu avgreiðast av formansskapinum.

Útreiðslurnar til at reka kommunufelagið verða eins og áður fíggjaðar við limagjaldi frá limakommunum, har hvør kommuna rindar limagjald samsvarandi íbúgvatalinum 1. januar í tí ári, sum fíggjarætlanin verður samtykt. Tó kann eingin kommuna rinda meira enn 45 % av limagjaldinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Uppskot til broytingar í viðtøkunum fyri Kommunufelagið, j.nr. 23/07029-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2023:** Tikið verður ikki undir við uppskotinum til viðtøkubroytingar.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Gunvør Balle og Annika Olsen tekur undir við uppskotinum til viðtøkubroytingar, ið skulu koma í gildi 1. januar 2024. Viðv. broytingunum, sum skulu koma í gildi 1. januar 2025, tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum til viðtøkubroytingar.

Meirilutin beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við uppskotunum til broytingar í viðtøkunum.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Turið Horn, Bjørg Dam, Súsanna Olsen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Annika Olsen, Gunvør Balle, Birgir Nielsen og Jákup Dam.

Ímóti atkvøði: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddu: Kári Johansen.

**Ískoyti:**
Á borgarstjórafundinum 8. mars 2023 var framløga av uppskoti til nýggjar viðtøkur fyri Kommunufelagið við gildiskomu 1. januar 2025. Við einstøkum tillagingum, herundir varðveitslu av starvsbólkinum, var semja um tær broytingar, sum arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við síðani eykaaðalfundin í desember 2023.

Hjálagt er uppskotið reinskrivað og við broytingum, og avrit av framløguni, sum varð hildin á borgarstjóradegnum í mars.

Ætlandi verður eitt endaligt uppskot til nýggjar viðtøkur lagt fyri aðalfundin 19. apríl 2024. Møguligar viðmerkingar viðmerkingar skulu latast KF í hendi í seinasta lagi 2. apríl 2024 kl. 12.

Samtykkir aðalfundurin nýggju viðtøkurnar verður tað við gildiskomu 1. januar 2025, tá ið nýggju kommunustýrini taka við. Galdandi viðtøkur fara tá úr gildi.

Broytingar í mun til uppskotið í desember 2023 eru:
- at formansskapurin hevur fimm limir. Ásett er, at kommunur umboðandi minst ein triðing av atkvøðunum á aðalfundinum hava rætt til umboð í formansskapinum. Kommunur umboðandi minst ein triðing av atkvøðunum á aðalfundinum, sum ikki hava nýtt sín rætt at fáa umboð í formansskapin, hava rætt til umboð í starvsnevndini fyri KAF.
- at avgerðir hjá formansskapinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta, har hvør limur í formansskapinum hevur eina atkvøðu. Stendur á jøvnum, er atkvøðan hjá forfólkinum í formansskapinum avgerandi. Miðast skal tó ímóti, at formansskapsavgerðir eru einmæltar.
- at forfólkini í Kommunufelagnum og starvsnevndum felagsins skipa eitt samstarvsráð at umrøða mál av felags áhuga. Samstarvsráðið verður skipað og virkar undir leiðslu av forfólkinum í

Kommunufelagnum. Samstarvsráðið hevur vanliga fund fýra ferð um árið og annars eftir tørvi. Limir í formansskapinum og starvsnevndum felagsins kunnu luttaka á fundum í samstarvsráðnum, tá ið forfólkið í Kommunufelagnum ella ein meiriluti í samstarvsráðnum ger hetta av.

- at skipaður verður ein starvsbólkur at fyrireika mál, ið skulu viðgerast á borgarstjórafundi. Í starvsbólkinum sita kommunuskrivararnir/-stjórarnir í limakommununum, og borgarstjórafundurin velur millum hesi eitt forfólk fyri starvsbólkin. Viðurskiftini annars hjá starvsbólkinum verða skipaði av formansskapinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at viðgera málið.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi endurskoðaða uppskoti til broytingar í viðtøkunum fyri Kommunufelagið og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 55/24 Svimjihøllin 2024 – Prísskipan og upplatingartíðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 14.02.2024 | 42/24 | 23/06296-4 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.03.2024 | 52/24 | 23/06296-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 58/24 | 23/06296-4 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 55/24 | 23/06296-4 |

**Upprunin til málið**
Uppskot frá leiðaranum í Svimjihøllini til prísir og upplatingartíðir.

**Hvussu nógv vitjandi kunnu vit vænta í framtíðini**
Tá kannast skal um hvussu nógv vitjandi væntandi koma tá nýggja svimjihøllin v/vælveruøki opnar, kann tað vera ein avbjóðing.
Vit hava tøl frá verandi høll at halda okkum til, og í fyrstu atløgu mugu vit vænta, at við nýggju fasilitetunum koma fleira vitjandi. Í løtuni er einans svimjihøllin í Klaksvík sum minnir um svimjihøllina í Gundadali, og um áleið 2 ár kemur nýggjur svimjihylur í Runavík, men hesin hevur onki vælveruøki.

Í 2017 var Herning Svømmehal í líknandi støðu sum svimjihøllin í Gundadali er í dag. Tá bygdu tey ein uppíbygning við einum 50 metra hyli. Áðrenn høvdu tey eins sum í Gundadali, ein 25m hyl. Støðan innan hesa útbyggingina var, at talið á vitjandi var minkandi, og høvuðsorsøkin var, at gamli hylurin var ov lítil. Eftir útbyggingina fór árliga vitjanartalið frá 110.000 til 170.000 – t.e. er ein hækking á 55%.

Taastrup svømmehal var eisini í somu líknandi støðu 2016, men hava ikki so greið tøl sum Herning. Hetta kemst av at tey byrjaðu at renovera gomlu høllina, so skjótt sum nýggi 50m hylurin bleiv opnaður. Tó siga tey, at vøksturin á vitjandi í 2023 var 22% í mun til 2022.

Umsitingin metir, saman við við leiðaranum í svimjihøllini, at ein konservativ meting er ein vøkstur á 20% vitjandi, tá nýggi svimjihylurin við vælveruøki verður tikin í brúk.
Hendan metingin er gjørd út frá tølunum í Herning og Taastrup, sum tó hava eitt heilt annað "uppland" end Tórshavn, Tó so, so eru 91% av Føroyum bundnar saman nú, og merkir hetta hetta, at stórur partur av Føroyum liggur ½ til 1 tíma frá svimjihøllini í Gundadali.
Harumframt metir leiðarin í Svimjihølini, at borgarar ikki brúka svimjihøllina so ofta teir vildu í dag, tí høllin so ofta er full. Hesin parturin verður munandi betri við 50m hylinum.

**Kostnaðurin fyri svimjing**
Leiðarin í svimjihøllini hevur sent inn uppskot um príshækkan á svimjing (Sí skjal 23/06296-1). Í tilmælinum er ein príshækking á 5 kr. á vanliga kostnaðinum fyri svimjing.
Umsitingin hevur kannað aftur í tíð hvat hetta hevði gjørt við inntøkurnar, og hvussu endaliga rakstrarúrslitið hevði sæð út.
Um prísurin var 5 kr. hægri á vanligari svimjing fyri børn og vaksin (tvs. ikki avsláttarkort), so hevði inntøkan verið millum 6,8% og 7,4% hægri í árunum 2019-2022. Endaliga rakstrarúrslitið fyri svimjihøllina hevði batna millum 1,4% og 2,0% í árunum 2019-2022.

Prísurin á svimjing liggur millum 5 og 10 kr. hægri í Klaksvíkar svimjihøll, og gav hetta áleið 1 mió í inntøku um árið, áðrenn vælveruøkið kom. Í Klaksvík kostar tað eyka at sleppa inn í vælveruøkið, og hetta hevur gjørt, at eftir vælveruøkið kom í Klaksvík, eru inntøkurnar farnar uppum 3 mió kr. T.v.s., at vælveruøkið gevur svimjihøllini 2/3 meir í inntøku.

Sbrt. Hagstovuni, so eru prísirnir í samfelagnum hækkaðir 2,8 prosent frá november í 2022 til november í 2023. Prísvøksturin heldur sostatt fram, men prísirnir hækka ikki við somu ferð, sum teir hava gjørt. Havandi í huga nógvu príshækkanirnar í samfelagnum seinast góðu 2 árini, er umsitingin sostatt í iva um, um tað gevur meining at seta prísin upp fyri vanlig atgongumerki á svimjing, um tann stóra inntøkan heldur verður frá vælveruøkinum.
Men til hetta krevst støðutakan um vælveruøkið skal kosta eyka at koma inn í, ella um tú fær atgongd til allar fasilitetir fyri sama prís, eins og tú sær í svimjihylinum í Laugardali, Reykjavík.

Við í metingini skal eisini kunnast um, at í Gallup kanning frá 2019, vóru 71% nøgd við verandi prísstøðið í Svimjihøllini í Gundadali, og í 2017 vóru 84% nøgd við prísstøðið.

Og er tað so, at avgerð verður tikin um at vælveruøkið skal kosta eyka, so má fyrilit takast fyri, at nýggja vælveruøkið ikki fer í kapping við privatar aktørar, s.s. nýggjar spa-fasilitetir hjá hotellum. Umsitingin metir tó í fyrstu atløgu, at hetta ikki verður ein avbjóðing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at Mentamálanevndin tekur støðu til, um atgongdin inn í nýggja vælveruøkið skal kosta eyka, eins og í Klaksvíkar svimjihøll, ella um prísurin skal verða tann sami fyri allar fasilitetir, eins og í Svimjihøllini í Laugardali.

Síðani verður støða tikin til endaligar prísir og upplatingartíðir á næsta fundi í Mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024:** Samtykt at atgongdin inn í nýggja vælveruøkið skal kosta eyka.

**Ískoyti:**
**1) Aldursmark til vælveruøkið?**
Tað er ymiskt hvussu danskar svimjihallir við vælveruøki skipa seg. Í Værløse Svømmehal hava tey t.d. sett aldursmarkið til 16 ár, í Frederikssund svømmhal er aldurmark á 16 ár bert ávísar dagar, og í Frederikshavn hava tey sett 16 ára aldurmark á ávísar partar av vælveruøkinum (dampbad og sauna).

Tað er ilt at meta um hvat er besta loysnin, og tað kemur eisini ann upp á hvat tað er vit vilja. Skal vælveruøkið verða eitt stað uttan larm og spæl er nemmasta loysnin at seta aldursmark á.

Í Klaksvík eru royndir á gjørdar hesum økinum. Í desember 2018 kom nýggja vælveruøkið í Klaksvíkar Svimjihøll. Her hava tey sett aldurmarkið til 16 ár og hava tey góðar royndir við tí skipanini.

Umsitingin mælir til at byrja við góðu royndunum úr Klaksvík og seta aldurmarkið til vælveruøkið til 16 ár.

**2) Møguligur prísur á vælveruøkinum**
Hyggja vit eftir føroyskum viðurskiftum á prísum fyri at sleppa inn í vælveruøkið í svimjihøllum, so er tað bert Klaksvíkar Svimjihøll vit kunnu samanbera við. Her er tó ymiskt hvat nýggja vælveruøkið í Gundadali fer at bjóðar fram, í mun til tað sum er í Klaksvík.

Hyggja vit víðari eftir vælveruøkjum í svimjihøllum í Danmark, so er ógvuliga ymiskt hvussu tey skipa seg og hvat tey bjóða fram.

Vælvitandi um at vælveruøkir í svimjihøllum í Danmark og Klaksvík eru ymiskt skipaði, so metir umsitingin, at príssamansetingin í Klaksvíkar svimjihøll ikki er langt av leið tí prísstøðinum sum er lagt í Danmark. Sostatt metir umsitingin at tað er hóskiligt, at brúka somu prísir sum í vælveruøkinum í Klaksvík, og eru teir fylgjandi (við svimjing):

- Morgun 70 kr.
- Seinnapart 100 kr.
- Vikuskifti 110 kr.
- Pensionistar 50 kr.

Havast skal í huga, at í mun til vælveruøkið í Klaksvík, so verður vælveruøkið í Gundadali i tveimum seperatum rúmum. Hetta gevur okkum møguleikar, at differentiera prísirnar seinni, tá vit hava fingið meiri føling við, hvat tey vitjandi eftirspyrja.

**3) Prístals javnan – hvør háttur kann brúkast?**
Tá talan er um prístalið, so er ymiskir hættir, ið kunnu nýtast. Eitt er at brúka tað generella prístalið, og eitt annað er at brúka prístalið í ymisku "vørubólkunum", ið ávirka raksturin hjá Svimjihøllini. Hetta kundi t.d. verið orka og lønir.

Men fyri ikki at enda á onkrum undarligum krónutali fyri eitt atgongumerki, s.s. 47,50 kr., so skal í fyrsta lagi avgerð takast um hvussu vit runda upp/niður. Í øðrum lagi kundi t.d. umsitingin fylgt við gongdini prístalinum, og tá tað t.d. nærkast einari 5 krónu í generellum vøkstri, so verður prísurin settur upp.

**4) Verandi prísur**
Leiðarin í Svimjihøllini mælir til, at verandi prísur vanligum atgongumerkjum til svimjihøllina hækkar 5 kr. fyri bæði børn og vaksin. Sjálvt um hetta ikki gevur tað heilt stóra útslagið á inntøkusíðuni, so skapar tað eitt insitament hjá borgarum, at keypa sær avsláttarkort. Flestu borgarar í dag brúka avsláttarkort, og skapar tað minni umsiting.

Ein leivd frá gamla svimjihylinum í Gundadali (við badmintonhøllina), er at børn skulu gjalda sum vaksin eftir kl. 18.00. Orsøkin til hetta var, at so kundi vaksin svimja meira fyri seg um kvøldið. Nógv er broytt síðani, og vit hava fingið fleiri hyljar, og nú fáa vit skjótt langhylin. Nú verður somikið nógv vatn í høllini, at leiðarin í svimjihøllini mælir til at børn gjalda barnaprísin eisini eftir kl. 18.

Vísandi til at fíggjarligu umstøðurnar hjá lesandi væl kunnu sammetast við tær hjá pensionistum, so mælir leiðarin í svimjihøllini eisini til, at lesandi gjalda sama prís sum pensionistar..

**5) Upplatingartíðir**
Her verður víst til skjal 23/06296-1 í hesum málinum, viðv. upplatingartíðum. Leiðarin í svimjihøllini mælir til at upplatingartíðirnar vera hesar:

| | |
|---|---|
| Mánadag: | 06.15 til 09.00 og 14.00 til 20.00 |
| Týsdag til fríggjadag: | 06.15 til 20.00 |
| Leygardag og sunnudag: | 08.00 til 16.00 |

Orsøkin til at tað verður mælt til at verða opið til kl. 20.00 dagligdagar er tí, at tað merkir at borgarin sleppur inn til klokkan 20, men skal vera úti klokkan 21. Fólk verða sostatt rópt upp úr hylinum klokkan 20.30.

Sum er ber illa til at hava longri opið út á kvøldið, uttan at tað gongur út yvir virksemi hjá feløgunum, men við nýggja langhylinum verður tó betri pláss.

Viðmerkjast skal, at longda upplatingartíðin hevur øktar rakstrarútreiðslur við sær, og samstundis skulu fleiri lívbjargarar o.l. setast í starv, tá langhylurin opnar.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin í Svimjihøllini mæla mentamálanevndini til fylgjandi:

a) At sett verður eitt aldursmark á 16 ár til vælveruøkið, og endurmeta skipanina á summri 2025.

b) At TK leggur prísin fyri vælveruøkið á sama støðið sum í Klaksvík, og endurmeta prísin á summri 2025.

c) At umsitingin javnan kannar generella brúkaraprístali í samfelagnum, sbrt. Hagstovuni, og tillagar prísin á teimum veitingunum sum eru í Svimjihøllini.

d) At prísurin á vanligum atgongmerkjum hækkar við 5 kr. fyri bæði børn og vaksin,
At prísurin hjá børnum eftir kl. 18. verður broyttur til vanliga barnaprísin.
At prísurin hjá teimum lesandi yvir 16 ár fylgir prísinum hjá pensionistunum

e) At mentamálanevndin umrøður upplatingartíðrnar fyrst og tekur støðu á næsta fundi, tá konkret upplegg til talið á starvsfólki er komið upp á pláss.

**Mentamálanevndin 06. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at upplatingartíðin leygardagar og sunnudagar verður kl. 08.00 – 17.00.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Atkvøtt varð um uppskot frá Súnu Mørk um at beina málið aftur í nevnd við atliti til at viðgera spurningin um, hvussu aldursmarkið skal setast, nærri og í samráð við starvsfólk í svimjihøllini.

Uppskotið varð einmælt samtykt,og málið beint aftur í mentamálanevndina.

# 56/24 Umsókn um stuðul at framtíðartryggja og menna Listasavn Føroya

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2024 | 50/24 | 24/00717-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 59/24 | 24/00717-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 56/24 | 24/00717-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn móttikin 2. februar 2024

**Lýsing av málinum**
Karina Lykke Grand søkir vegna Listasavn Føroya um stuðul til umbygging og útbýggina av Listasavni Føroya (sí viðheftu verkætlanarlýsing).

Verkætlanin hjá Listasavninum fevnir m.a. um
1) ein nýggjan serframsýningarbygning, ið verður bygdur á grundini á niðurslitna Listaskálanum,
2) nýggjar hentleikar til vitjandi á savninum serstakliga børn
3) meira pláss til samlingina og
4) eitt hús við virksemi og skúlatænastum til børn og ung.

Listasavnið vil fegin vísa á, at serliga barnahúsið kann hava áhuga hjá kommununi, tí dagstovnar, skúlar og ungdómsútbúgvingar og annað í býnum vitja javnan á savninum. Í barnahúsinum fer eisini at verða stovnaður ein myndaskúli sum eitt lokkandi frítíðartilboð til børn og ung í býnum. Samlað sæð fer barnahúsið at verða ein savnandi depil í býnum og hin fyrsti av sínum slagi í landinum.

Listasavnið hevur seinastu árini upplivað stóran vøkstur í tali av vitjandi, serliga av børnum, ungum og familjum. Við nýggju kørmunum er Listasavnið til reiðar at taka ímóti enn fleiri vitjandi havnarborgarum, vitjandi og ferðafólkum.
Í umsóknini bjóðar stjórin kommununi á fund til eina gjøgnumgongd av byggingini og visjónunum handan verkætlanina.

<u>Fíggjarætlan:</u> Samlaða fíggjarætlanin er 60.000.000 kr. og av teimum eru 57.500.000 kr. fingnar til vega.

Listasavnið søkir Tórshavnar Kommunu um 2.500.000 kr deildar yvir t.d tvey ár – 1.250.000 í 2025 og 1.250.000 í 2026. Ynski frá teimum, er at fáa eina tilsøgn um játtan so tíðliga sum gjørligt í 2024.

Við einari játtan á 2.500.000 kr verður verkætlanin fullfíggjað.

Byggingin skal eftir ætlan vera liðug við ársenda í 2026.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/02788 Listasavnið søkti upprunaliga um kr. 7,5 mió í stuðli til samlaðu byggiætlanina. Kommunan sendi Listasavninum skriv, har kommunan er jaliga sinnað at stuðla verkætlanini við umvæling og útbygging fíggjarliga.

23/02758 Listasavn Føroya fær 200.000kr í árligum rakstrarstuðli frá Tórshavnar Kommunu.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Viðheft er verkætlanarlýsing frá Listasavni Føroya

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 5370 | | Stuðul til íløgur | | | | | 2.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 2,5 mió í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur soleiðis, at játtaðar verða kr. 1,25 mió í 2025 og kr. 1,25 mió í 2026 treytað av játtan í viðkomandi fíggjarætlan. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

## 57/24 Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 26/22 | 22/00894-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 29/22 | 22/00894-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 37/22 | 22/00894-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 248/22 | 22/00894-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 25.10.2022 | 70/22 | 22/00894-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 273/22 | 22/00894-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 235/22 | 22/00894-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 9/23 | 22/00894-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 32/23 | 22/00894-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 23.02.2023 | 67/23 | 22/00894-1 |
| 11 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 44/23 | 22/00894-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 22.02.2023 | 20/23 | 22/00894-1 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 26.01.2024 | 5/24 | 22/00894-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 28/24 | 22/00894-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 50/24 | 22/00894-1 |
| 16 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 32/24 | 22/00894-1 |
| 17 Trivnaðarnevndin | 11.03.2024 | 12/24 | 22/00894-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 61/24 | 22/00894-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 76/24 | 22/00894-1 |
| 20 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 57/24 | 22/00894-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt hjá býráðnum 24. feb. 2022 í máli 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu um at stovnseta hádeild (8.fl og 9.fl) í Sankta Frans skúla – at byrja frá skúlaárinum 2023/24.

**Lýsing av málinum**
Samtyktin inniber at pr. skúlaársbyrjan 2023/24 skal skúlin rúma tveimum 8. fl. og frá 2024/24 tveimum 8. fl. og tveimum 9.fl. Í sambandi við eina hádeild er eisini tørvur á ymiskum hjáhølum eitt nú til bólkaarbeiði, goymsluhøli, betri fakstovuhentleikar, tænastuhentleikar v.m. Umframt – alt eftir staðseting v.m. – hentleikar til starvsfólk. Um talan er um eina varandi hølisloysn og alt eftir, hvussu og hvar bygningurin verður bygdur kann roknast við einum fermetratalið á minst 800 m2 (við fyrivarni!).

Í kommunuætlanin frá 2020 stendur viðv. Sankta Frans skúla:
*“Innan nøkur ár verður væntandi farið undir høvuðsumvæling og útbygging av skúlanum. Tørvur er á betri parkeringsviðurskiftum.”*
og
*“Fleiri dagføringar og neyðugar umvælingar standa eisini fyri framman. Fremstir í røðini eru Hoyvíkar skúli og Sankta Frans skúli.”*

Sostatt er greitt, at tað er skilagott at hava framtíðar høvuðsumvælingar í huga nú farið verður undir at útvega hølisloysn til hádeildina. Hetta serliga tí at verandi høvuðsbygningur er frá 1931 og 1956 og tískil í nógvum førum ikki uppfyllir nútíðar krøv til bygningar sbrt. BK17. Forskúla/frítíðarskúlabygningurin er frá 2013. Hóast høgan aldur á høvuðsbygninginum so er hann í lutfalsliga góðum standi.

Gerast skal eisini vart við, at ætlan um dagføring v.m. av Hoyvíkar skúla er útsett fleiri ferð og raðfest fremri enn dagføring av høvuðsbygninginum hjá Sankta Frans skúla.

**Øki**
Skúlabygningarnir liggja í einum D3 øki. Har er galdandi at byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5. Skúlabygningarnir liggja á einum øki, ið er 6.985 m2 og byggistigið er á umleið 0,30 og nýtslustigið á umleið 0,59. Sostatt er greitt at byggisamtyktin ikki sum útgangsstøði loyvir meiri bygging á økinum. Harumframt er øki beint upp at D1 øki, ið er skógfriðað. Sostatt er sum útgangsstøði neyðugt at útvega annað lendi til tørvin. Í økinum er í høvuðsheitum tveir møguleikar – annar er at byggja út ella um á verandi øki og í øðrum lagi at byggja á økinum dagstovnurin Stella Maris heldur til. Hartil kemur spurningurin um møguliga eyka parkeringpláss. Hesir møguleikarnir kunnu innibera broytingum í byggisamtykt.

**Tíðarperspektiv**
Sum heild má tað ganga skjótt og væl um tað skal eydnast at hava eina varandi hølisloysn klára til skúlaársbyrjan 2022/23 og eigur tí eisini at vera umhugsað onkur fyribils loysn, ið verður brúkt inntil tann varandi loysnin fyriliggur. Helst eru onkrir møguleikar tí viðv. bæði viðv. fyribilshølum og evt. í nærøkinum.

Umsitingin kann – alt eftir samtykt í hesum máli – fara undir her í mars 2022 at gera eina kravseting til ein komandi og varandi hølisloysn og koma við boðum uppá staðsetingar. Á fundinum kemur umsitingin at geva metingar viðv. kostnaði av fyribils hølisloysn og varandi hølisloysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um farast skal:
a). fyrst undir fyrireikingar av eini varandi hølisloysn ella
b). eini fyribilsloysn, meðan ein verandi verður fyrireikað.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við punkt a) í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Síðani samtyktina seinast er umsitingin farin undir fyrireikingar av eini kravfesting og virksemislýsing til eina komandi hølisloysn og hevur viðgjørt møguligar staðsetingar.

Eitt verkætlanartoymið er skipað við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting, og er verkætlanarleiðari settur. Tveir fundir hava verið við skúlaleiðslu og umboð fyri starvsfólk í skúlanum, og í vikuni verður fundur við frítíðarskúlan.

**Staðsetingar**
Umsitingin metir, at mest upplagda staðseting til eina útbygging av Sankta Frans skúla er á stykkinum har dagstovnurin Stella Maris liggur – t.e. matr. 807b. Fremsti fyrimunurin er at har ber til at byggja at kalla ótarnað hvat viðv. verandi skúla- og frítíðarskúlavirksemi. Umframt at bygging har sum útgangsstøði ikki viðførir tørv á broyting ella fráviki frá byggisamtyktini. Um stykkið hjá TK á matr. 807g verður tikið við ber til at byggja eina bygning á 700-900 m2. í t.d 2 hæddum. Matr. 807g liggur tó, í mun til matr. 807b, í sethúsaøkið sbrt. almennu byggisamtyktini. Fyribils metingin er at hetta fermetratalið er nøktandi uttan 807g.

Alternativt skal byggjast í verandi øki har skúlin er. Har kunnu ymsar loysnir hugsast t.d. byggja omaná verandi forskúla- og frítíðarskúlabygningi ella taka burtur verandi fimleikahøll og byggja nýggja fimleikahøll/felagshøli og 2 hæddir omaná. Báðar hesar loysnirnar krevja broytta byggisamtykt vegna, at bæði byggi- og nýtslustigini eru rokkin, umframt tilgongd í mun til skógfriðingina við Viðarlundina, ið er næsti granni. Eisini eru arkitektonisk/estetisk atlit til verandi serstaka og søguliga skúlabygningin, og serstøku Mariukirkjuna og Kerit vestanfyri.

Tískil vil tað innibera eina longri tilgongd uppá umleið 6 mánaðir, og tí ikki vist um tað letur seg gera. Vansin í hesum báðum førum er, at talan er um bygging inn í einum virknum skúlaøki, og kemur tað at viðføra týðandi ampa og helst, at forskúla- og frítíðarskúlavirksemi má flytast úr hølunum, meðan tað mesta av byggingini fer fram.

Eitt heilt annað alternativ, ið eisini er umrøtt, er at keypa Sankta Jósefs barnagarðin og lata nýggjan dagstovn byggja á økinum hjá Stella Maris og so innrætta Sankta Jósefs barnagarð til skúla.

Hetta krevur í fyrsta lagi samráðingar við katólsku kirkjuna í Belgia, ið varðar av stovninum, og vil so aftur krevja aðra bygging, áðrenn farast kann undir tillaging av bygninginum til skúla. Tískil má roknast við at tilgongdin tekur longri tíð.

Í sambandi við útbygging má roknast við kravi frá byggivaldinum sbrt. BK17 um fleiri parkeringspláss. Skúlin fær við eini hádeild – umleið 12 nýggj starvsfólk (lærarar og onnur innan tænastuøkið). TK er í samskifti við KFUK um møguleikan fyri at gera 22 parkeringspláss niðast á trøðni hjá KFUK. Serskilt mál verður lagt fyri nevnd um tað.

**Slag av virksemi**
Umrøtt hevur verið hvørt tað hevði verið ein fyrimunur heldur at bygt nýggj høli til grunddeildina (forskúla – 3 fl.) ella partar av henni og møguliga frítíðarskúlan ístaðin fyri at byggja nýtt til hádeildina (8-9 fl. og evt. 7 fl.). Mett verður at tað avgjørt er nakað, ið skal greinast nærri komandi tíðina. Mett verður at fyrimunurin við at byggja nýtt til grunddeildina hinmegin Varðagøtu er, at grunddeildin ikki í ein stóran mun hevur tørv á fakhølum v.m. í høvuðsbygninginum eins og hádeildin hevur. Tá ein endalig niðurstøða fyriliggur um staðseting vil umsitingin koma við endaligum tilmæli um tann spurningin. Um nýggju hølini verða bygd til grunddeildina, skal smábarnaskúlin dagførast til 8-9 fl. ella annað, sum í dag er í høvuðsbygninginum. 7 fl. er vanliga partur av hádeildini, og tí er tað fyrimunur, men ikki treyt, at 7 fl. eisini hevur flokshøli har hádeildin er.

**Innihald/funktiónir v.m.**
Komið er væl áleiðis við at greina neyðugar funktiónir til ymisk hølir og virksemi í eini hádeild og ymiskar avleiddar tillagingar, ið eru neyðugar í verandi bygningum sambandi við fakhøli (t.d. alis- og evnafrøði), felagshøli, hjáhøli, útiøki v.m. Hetta alt í sambandi við nú- og framtíðartørv innan skúlavirksemi.

Um tað hinvegin verður avgjørt at byggja til nýggja grunddeild er lutfalsliga skjótt at broyta uppá tilgongdina, men vil tað framvegis innibera ymiskar tillagingar í sambandi við fakhøli v.m., umframt umstøður til fleiri starvsfólk. Harumframt er innleiðandi farið undir greiningar í mun til hentleikar í skúlagarðinum.

**Ávegis kostnaðarmeting**
Á fundinum verður greitt frá ávegis kostnaðarmeting fyri nýbygging.

Havast skal eisini í huga, at Sankta Frans skúli, óansæð omanfyristandandi, yvir komandi árini hevur tørv á játtanum til vanligt viðlíkahald og dagføringar, umframt at skúlin eigur at fáa atkomuviðurskiftini, eisini fyri rørslutarnað, upp til nútíðarkrøvini. Hetta skal neyturviligvís ikki verða partur av verkætlanin við hølum til hádeild, men at tann byggiskráin sum verður gjørd til ítøkiligu verkætlanina tekur hædd fyri omanfyristandandi.

**Tíðarætlan**
Sbrt. býarsamtyktini frá 24. februar 2022 ynskir býráðið, at "... Sankta Frans skúli verður tvísporaður skúli frá forskúla til 9. flokk frá skúla árinum 2023/2024, ...".

Verkætlanartoymið metir, at tað óansæð val av omanfyri lýstu møguleikum, verður sera torført at fáa úvega eitt liðugt byggjarí/hølisloysn til skúlabyrjan eftir summarsteðgin 2023. Skal málið røkkast eigur tað í tilgongdini beinanvegin at kannast at útvega fyribilshølir, í eitt fyribilstíðarskeið, sum verður fram til minst jólini 2023 ella allarhelst summarfrítíðina 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til:

a). at samtykkja at útbygging av Sankta Frans skúla skal vera á matr. 807b.
b). at umrøða hvørt grunddeild ella hádeild skal byggjast á matr. 807b, við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli um tað til komandi fund.

Málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) um at útbyggingin av Sankta Frans skúla verður á matr. nr. 807b treytað av góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tilmælið b) varð umrøtt.

**Ískoyti:**
UMMR hevur hin 8. apríl 2022 góðkent, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9 frá skúlaárinum 2023/24. Somuleiðis er góðkent, at Skúlin á Fløtum verður trýsporaður frá forskúla til og við 6. flokk og fýra sporaður frá 7. til 9. Flokk frá skúlaárinum 2023/24.

Trivnaðarnevndin samtykti 7. apríl 2022 at staðseta nýggju skúlaloysina til Sankta Frans á matr.nr. 807b, sum í dag er Stella Maris Vøggustova. Í málslýsingini framgongur, at krøv verða sett til at útvega fleiri parkeringspláss í tí sambandi.

Samskifti hevur verið við KFUK um nýtt parkeringspláss á teirra øki framvið Varðagøtu. Samskifti hevur eisini fevnt um ynski frá KFUK um betran av almennu atgongdini til KFUK-húsið og brúkinum av KFUK-bønum.

KFUK ynskir at varðveita og menna KFUK-bøin sum virksemisøki hjá KFUK og samstundis gera hann lutvíst atkomuligan fyri gjøgnumgongd hjá almenninginum, umframt gera ovara partin vælegnaðan til kavaskreiðing. Eisini ynskir KFUK at fáa skipaði og nøktandi parkeringsviðurskifti til egið virksemi og í økinum í sambandi við kommunala stovns- og skúlavirksemi, umframt almenna parkering.

Út frá tørvinum hjá bæði KFUK og kommununi er gjørt uppskot til avtalu um atgongd og brúksrætt til partar av økinum, meðan kommunan átekur sær uppgávuna at fremja og rinda fyri ávís verkløg, sí uppskot til avtalu. Endalig tilsøgn fyriliggur ikki frá KFUK.

KFUK hevur áhuga í at gera avtalu við kommunuan nú í sambandi við, at felagsskapurin fyllir 100 ár í juni. Avtalan hevur fíggjarligan kostnað við sær fyri kommununa, eingin ítøkilig kostnaðarmeting fyriliggur. Játtan er ikki tøk til útinnan av avtaluni, men eigur at verða tikið sum liður í ætlaða skúlabygningini.

**Skjal**
- Uppskot til brúks- og samstarvavtalu millum KFUK og Tórshavnar kommunu

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at gera brúks- og samstarvsavtalu við KFUK og at heimilia umsitingini at fáa til vega kostnaðarmeting sum grundarlag fyri seinni viðgerð av játtan og verkætlan.
**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykkir at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku við einum fíggjarkarmi á í mesta lagi 30 mió. kr.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum tí málið ikki er nóg væl lýst.

**Ískoyti:**
í sambandi við málið um dagføring av skúlabygnað mál nr. 21/02652 sendi Tórshavnar kommuna Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um broytingar í bygnaðinum viðvíkjandi Sankta Frans skúla, og verður í svari frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum boðað frá, at ráðið góðkennir ætlaðu broytingina, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9. flokki.

**Bygningur til hádeild**
Tosað hevur verið um, at nýggi bygningurin kundi verið til grunddeildina og frítíðarskúla til forskúla, men í samráð við skúlan er niðurstøðan, at mælt verður til, at nýggi bygningurin verður bygdur til hádeildina, tvs. 7., 8. og 9. flokk, og at høli til alis- og evnafrøði verður í nýggja

bygninginum, heldur enn at dagføra núverandi høli í høvuðsbygninginum, sum er til alisfrøði og til lívfrøði, til krøvini til alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki. Frítíðarskúlin í Sankta Frans ynskir at verða í lítla bygninginum i skúlagarðinum, heldur enn at flyta saman við grunddeildini í nýggjan bygning, sum eftir ætlan verður bygdur á økinum hjá Stella Maris.

7. flokkur verður roknaður sum partur av hádeildini, og nýggju skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru bygdur soleiðis, at hvør deild hevur flokshøli í eind fyri seg. Tríggjar deildir eru í stóru skúlunum, tær eru grunddeild 1-3. fl., miðdeild 4.- 6. fl. og hádeild 7-9. fl. Í skúlum við forskúla, er forskúlin partur av grunddeildini. At deildirnar eru í somu eind, ger tað høgligari at arbeiða tvørtur um floksmørk, at skipa tiltøk á deildini, at samstarva bæði hjá næmingum og starvsfólkum og ikki minst at kenna seg sum eina eind.

At flokshølini hjá 7. flokki verða í nýggja bygninginum, gevur pláss fyri serflokkum í Sankta Frans skúla.

**Hølistørvur**
Samskift er við skúlastýrið og skúlans leiðslu um hølistørvin til tvísporaða hádeild 7.-9. fl., tvs. 6 flokkar. Harumframt skal gerast ein stova til alis- og evnafrøði. Aftrat koma aðrar vanligar hølisumstøður til starvsfólkarúm, næmingauppihald, ves, goymsla. Talan eru væntandi um byging uml. 1.100 fermetrar.

**Staðseting**
Skúlabygningurin verður bygdur á matr.nr. 807b. Ætlanin er, at aktomuviðurskifti og parkering verður frá Varðagøtu og til matr.nr. 807g, ið er kommunal ogn. Í hesum sambandi er ætlanin at gera avtalu við KFUK um verandi vegatkomu frá Varðagøtu um keyp og nýtslurætt til KFUK til parkering á matr.nr. 807g. Samskift verður eisini við ognina mat.nr. 807f um at keypa 220 m2 av stykkinum at leggja aftrat 807g. Fyrsta stig er at taka bygningin á matr.nr. 807b niður.

Hesar avtalur hava eisini týdning fyri tíðarætlanina og viðgerðina av byggisamtyktini fyri økið, sum má broytast, sí niðanfyri.

**Heimildir**
Sambært fólkaskúlalógini §57, stk. 4 góðkennir landsstýrimaðurin øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.

**Útiøki**
Útiøkini hjá skúlum skulu lagast til ymsu aldursbólkarnar, og nú hádeild verður í Sankta Frans skúla, er umráðandi, at umstøðurnar í skúlagarðinum vera góðar og eggja til spæl, læring og sosiala samveru. Útiøkið skal vera fjølbroytt og gjørt til ungfólk í aldrinum 13-16 ár. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm, tað skal vera stimbrandi hjá næmingum og stuðla teimum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsa hjá tí einstaka.

**Byggisamtykt**
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu ávikavist byggistigið og nýtslustigið, í D3-umráði, verða í mesta lagi 25 % og 50 % av grundøkjavíddini. Roknast kann við, at uml. 500-600 fermetrar fara til parkering. Útiøkini verða tí, um byggingin er í tveimum hæddum, uml. 1.600-1.700 fermetrar. Tað eru uml. 10 – 12 fermetrar fyri hvønn næming. Í verandi SFS eru uml. 14 fermetrar fyri hvønn næming. Danskar vegleiðingar viðmæla minst 50 fermetrar. Í Eysturskúlanum og Skúlanum á Fløtum eru ávikavist 21 og 31 fermetrar. Ein grundgeving fyri at tað kann góðtakast at hava so lítið útiøki til hádeildina í SFS er, at beint sunnan fyri skúla er trøðin hjá KFUK, sum í skúlatíðini kann verða tøk hjá næminginum í hádeildini.

Grundøkjavíddin skal økjast uml. 220 m2, har tað eftir uppskotinum er neyðugt við broyting í byggisamtyktini, tá A1 øki til sethús og D3 øki til almennar bygningar verða løgd saman.

**Tíðarætlan**
Fyrsta stigið verður at víðka um grundøkjavíddina, har Stella Maris er, so pláss verður til ein nýggjan skúlabygning. Umráðandi er eisini at fáa gjørt eina avtalu við KFUK um vegatkomuna frá Varðagøtu til KFUK, so hendan vegatkoman eisini verður til nýggja skúlabygningin. At avgreiða hesi viðurskifti hevur skund, tí tað er ein fyritreyt fyri, at býarskipanardeildin kann byrja tilgongd at broyta bygginsamtyktina fyri part av A1-økinum, vestan fyri matr.nr. 807b, so hesin partur verður partur av D3-økinum, líka sum matr.nr. 807b har Stella Maris er. Er einki óvæntað, tekur ein byggisamtyktarbroyting vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Meðan omanfyri nevnda er í gongd, kann fyrireikingarbeiðið gerast til niðurtøkuna av verandi bygningi. Sambært niðurstøðu hjá leiðsluni, frá 20.01.2022, ið byggir á tilmæli frá uttanhýsis ráðgevum, loysir tað seg ikki at umvæla og dagføra verandi bygning.

Møguligt er eisini í sama tíðarskeiði at fremja sjálvt niðurtøkuarbeiðið umframt at umleggja og endurnýggja gomlu kloakkleiðingina sum liggur oman í gjøgnum grundøkið, har verandi bygningur stendur.

**Ætlað mannagongd og útbjóðing**
Tilgongdin at gera byggiskrá og avgreiða brúkaraviðurskiftini, herundir endaligt rúmskema, kann eisini fara fram í sama í sama tíðarskeiðið. Tað er í hesum sambandi umráðandi at fáa nágreinað alla útgerð, tekniskar skipanir, krøv til yvirflatur v.m. í rúmskema í byggiskrá. Byggiskráin skal haraftrat vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi. Herundir fastleggja málbar góðskustig.

Útbóðingartilfarið skal tryggja, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum, t.d. at varðveita stóran part av verandi grótgarði og størru trøini. Eisini metir bygningsdeildin, at heildarbeiðstøkan, eins og í Skúlanum á Fløtum, ikki skal fevna um list, kunningarskelti, leyst innbúgv, teldur, skermar o.l. útgerð.

Á fíggjarnevndarfundi 19. okt. 2022 varð samtykt, "...at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku...". Hetta er at skilja sum heildararbeiðstøka. Her metir tekniska umsitingin, at leisturin eigur at verða soleiðis, at tíð og játtan beinanvegin eru tøk.

**Kostnaðarmeting**
Ein kostnaðarmeting er viðheft. Kostnaðarmetingin byggir á framskrivaðan fermetrakostnað fyri endaliga kostnaðin fyri Skúlan á Fløtum. Afturat er íroknað kostnaður fyri ymiskt, sum kemur afturat í hesi verkætlanini, samanborið við Skúlan á Fløtum.

Eingin játtan er sett av til fyrireiking til útboð. Kostnaðarmetingin at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá við rúmskema, nágreining av útgerð, tekniskum skipanum, krøv til yvirflatur v.m., umframt at vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi, herundir at fastleggja málbar góðskustig, og at útbóðingartilfarið tryggjar, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum er mett til kr. 0,5 mió.

Eisini er eitt uppskot til tíðarætlan fyri 2022 og 2023, ætlanin er eisini viðheft.

**Hjáløgd skjøl:**
SFS kostnaðarmeting Uppskot 1 20221024
Rúmskema í gerð Fyribils 20220920
Tilmæli frá býarskipanardeildini í sambandi við hádeild til Sankta Frans skúla
Uppskot til tíðarætlan

Skjølini eru í skjalamappu 22/00894-23

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a) at bygningur til hádeild hjá Sankta Frans skúla verður bygdur á 807b og 807g,
b) at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá og kravspesifikatión til skúlabygningin v.m. sum lýst omanfyri, og at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku,
c) at gera útbjóðingartilfar, at bjóða út og at taka av tilboði og gera sáttmála um arbeiðið at taka niður bygningin á matr.nr. 807b,
d) at játta kr. 0,5 mió av tøkum løgukarmi 4175 LK 41014 Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt, og stovna nýggja løgukontu 4176 Hádeild Sankta Frans skúli til at gera útbjóðingartilfarið pkt. b) og c), og
e) at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið.

Og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við pkt. a) og e), og at bjóða út í heildararbeiðstøku byggingina av skúlabygningi uml. 1.100 m2 umframt útiøki v.m., innanfyri ein karm uppá kr. 30 mió, harímillum at gera byggiskrá við kravspesifikatión, og at taka niður og burturbeina verandi bygning á matr.nr. 807b, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggja skúlabygning v.m. til hádeild varð bjóðað út til tveir arbeiðstakarar – Articon og HVT. Eitt tilboð kom inn, tað er frá HVT, og sum lýsir uppskot teirra til bygning, innrætting og funktiónir, byggitilfar v.m.

Í løtuni eru samráðingar um sáttmála við HVT, og ætlanin er, at býráðið kann samtykkja sáttmála og játta fíggingina til byggingina á næsta fundi.

Á fundinum verður kunnað um innkomna uppskotið til skúlabygning.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka kunningina til eftirtektar.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Við støði í uppskotinum og tilboðnum frá HVT Sp/f til nýggja hádeild til Sankta Frans skúla er samráðst um heildararbeiðstakarasáttmála. Sáttmálaupphæddin er kr. 28,125 mió u/mvg.

Skúlin hevði bert eina viðmerking til bygningsuppskotið, og tað var at fáa gjørt eitt reingerðarrúm eitt sindur størri. Hædd verður tikið fyri tí í prosjekteringini. Í samráðingunum er lendisarbeiðið eisini útgreinað.

Kloakkarbeiðið og parkeringsøkið fer í stóran mun at ganga fyri seg uttan fyri arbeiðstøkumarkið hjá HVT. Tað sæst aftur í kostnaðarmetingini sum byggiharraveiting, tvs. kostnaður aftrat sáttmálaupphæddini. Verandi rottangi verður tømdur og burturbeindur. Verandi høvuðskloakk, ið gongur í gjøgnum matr 807b, skal umleggjast, áðrenn jørð og kloakkarbeiði byrjar. Nýggja kloakleiðingin frá bygninginum verður bundin í nýtt reinsiverk. Parkeringsplássi verður avhendað til byggiharran planerað við 0-75 við regnavatnsleiðingum og vegristum.

Haraftrat eru vanligar byggiharraútreiðslur í sambandi við bygging, t.e. óvæntað, prís- og lønarvøkstur, byggiharraleiðsla og prosjektumsiting, listprýði 1,5%, lásaskipan, høvuðsreingerð, innbúgv, útbúnaður, útgerð til úiøkið og mvg.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri alt omanfyri nevnda er kr. 40.808.000, sí hjáløgdu kostnaðarmeting.

Sambært tíðarætlanini verður byggiplássið fyrireikað frá 6. mars 2023, og byrjað verður at taka niður Stella Maris-bygningin frá 22. mars 2023. Øll byggingin av hádeildini skal verða liðug og handað byggiharranum í seinasta lagi 8. juli 2024.

Í løgujátattanini til byggingina av hádeildini fyri 2023 eru játtaðar kr. 20 mió. Skal verkætlanin, sum hon nú fyriliggur eftir samráðingarnar, og har øll neyðug viðurskifti eru tikin við, skulu játtast kr. 20,8 mió aftrat. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024.

Skjøl:
-Heildararbeiðstakarasáttmáli
-Dagførd tilboðsmappa
-Kostnaðarmeting

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til heildararbeiðsstøðusáttmála við HVT Sp/f uppá kr. 28,125 mió u/mvg, og at samlaða verkætlanin heldur seg innanfyri ein kostnaðarkarm uppá kr. 40.808.000 v/mvg.

Mælt verður í hesum sambandi til at játta kr. 19.425.000 av kontu 4176 Nýbygging skúlar, løgukarmi LK41018 til løgukontu L41018 Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla, og at írestandi játtan kr. 20.808.000 verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 22. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2023:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekksteina tekur undir við Trivnaðarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 38 mió. til verkætlanina og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at tikið verður undir við uppruna tilmælinum um at játta kr 40 mió umframt at játta kr. 500.000 til sólorku í 2024, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg. Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk og Bjørg Dam

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Síðani býráðssamtyktina 23. februar 2023 er heildararbeiðs-tøkusáttmáli gjørdur við HVT, arbeiðið er komið væl ávegis. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl, bygningurin varð reistur og fyribils innilokaður á heysti 2023.

Verkætlanarleiðarin hevur, í samráð við stýris- og prosjektbólkin arbeitt við, at fáa til vega eitt fullfíggja yvirlit yvir allar veitingar og eyðmerkja møguligar avbjóðingar. Hetta í mun til tørvin hjá skúlanum og eisini fyri at fáa til vega neyðugar góðkenningar frá avvarandi myndugleikum, so eitt endaligt nýtsluloyvið kann fáast, tá heildararbeiðstakarin avhendar bygningin tann 8. juli 2024.

Við støði í skipanar-/prosjektuppskoti um atkomu, parkeringstørvi og keyp av lendi er gjørd munnlig avtala við nevndina í KFUK, sum verður løgd fyri aðalfund teirra til støðutakan í mars. Avtalan er fortreyt fyri nýtsluloyvi. HVT gevur tilboð um veitingar og arbeiði, so sum at endurnýggja KFUK-brekkuna, parkerings-pláss, gyrðingar og stuðlamúrar. Eisini íroknað gøtuljós, leiðingar í lendi, kantsteinar asfalt og skráar. Sí meira niðanfyri.

**Aftrat eru hesar uppgávur avgreiddar:**

- Greinað allar veitingar, sum eru aftrat heildararbeiðstøkuni.
- Liðugtgerð av rúmskemuðum og nágreiðan krøvini øll til øll rúmini.
- Eyðmerkt tørvin viðv. CTS-stýringum og ABA-anleggið við atliti at inniumhvørvið, trygd og at stýra orkunýtsluni.
- Avtalað er gjørd við Fjarhitafelagið um fyribils orkuskipan, luft til vatn, staðseting av hesi, og tíðspunkt tá Fjarhitafelagið skal veita orku til nýggja bygningin.
- Arbeitt verður við krøvum til internet og fiburnet, harundir krøvini til Skúlanet.
- Listprýðisarbeiðið er sett i gongd.
- Kostnaðarmetingin fyri byggingina er endurskoðað og dagførd, har nýggjastu tilboðini og avtaluseðlarnar frá HVT eru tiknir við.

**Støðan og átrokandi uppgávur at avgreiða ultimo januar 2024**

- Heildararbeiðstakarin skal ikki seinkast í at fáa til vega allar neyðugar tilfarsveitingar, herundir eisini neyðugar tilfarsveitingar í sambandi við tilkeypini. Hetta soleiðis, at alt er gjørt fyri, at heildararbeiðstakarin kann avhenda byggiharranum ein fullfíggjaðan skúlabygning, íroknað tilkeypini, í seinasta lagi 8. juli 2024.
- Tilboð uppá fullfíggjaða liðugtgerð av alis- og evnafrøðisstovu, íroknað alt fast innbúgv eisini til at atknýtta goymslurúmið.
- Í februar 2024 skulu fáast til vega tilboð uppá fast innbúgv til øll rúm, her í íroknað talgildar undirvísingarskíggjar.
- Í februar/mars 2024 verður skipað fyri útboði og lisitatión uppá leyst innbúgv. Hetta soleiðis at leysa innbúgvið verður veitt og uppsett í skúlanum í viku 29, vikuna eftir avhendingina.
- Ískoytissáttmáli til heildararbeiðstøkusáttmálan verður gjørdur við heildararbeiðstakaran um lendi- og lendisfestisarbeiðið í sambandi KFUK-brekkuna og parkeringina, sbrt. tilboði frá heildararbeiðstakaranum, dagf. 09.01.2024. Her er sera átrokandi, at projekteringsarbeiðið byrjar beinanvegin, fyri at leiðslan kann avgreiða avtaluna við KFUK.

**Skjøl:**

- Dagførd kostnaðarmeting, revisión C, dagf. 25.01.2024.
- Dagførd tíðarætlan fram til skúlabyrjanina miðjan august 2024.
- Endaligt skipanaruppskot til KFUK-brekkuna, parkeringviðurskiftir v.m.

**Samanumtøka:**
Verkætlanin, og viðlagda dagførda kostnaðarmetingin, revisión C, fevna nú um allar neyðugar veitingar til tess, at skúlin lýkur allar neyðugar treytir og krøv.

Verkætlanin og dagførda kostnaðarmetingin fevna eisini um allarflestu veitingar í skulu til, fyri at KFUK-brekkan og parkeringsviðurskiftini verða nøktandi hjá bæði KFUK og nýggja skúlabygninginum, og sum er fortreyt fyri nýtsluloyvi. Kostnaður íroknað lendiskeyp er uml. kr. 5,5 mió.

Haraftrat eru aðrar uml. kr 4 mió til sjálvan bygningin, sum fevnir um eina røð av postum, har teir størstu CTC-stýringar og ABA (kr. 0,75 mió) eru alis- evnafrøðisstovan (uml. 0.7 mió), og keyp av lendi (kr. 0,756 uttan tinglýsing og matrikulering).

Eftir hesum er neyðugt at víðka kostnaðarkarmin úr kr. 38 mió v/mvg til kr. 47,5 mió v/mvg, tvs. ein fíggjartørvur á kr. 9,5 mió. Slík løgujáttan er ikki tøk á grein 4 í fíggjarætlanini.

Mest týðandi í løtuni er at tryggja, at bygningurin verður liðugur til tíðina umframt avtaluna við KFUK, har fíggjartørvurin tilsamans er kr. 5 mió. Støðutakan til endaliga lendisprojektið og fígging av tí verður at taka upp seinni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 5 mió av tøkum peningi 2023 til liðugtgerð av skúlabygninginum og keyp av lendinum sum eykajáttan til løgukontu L41018 Hádeild Sankta Frans skúli og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til tvær viðgerðir.

**Trivnaðarnevndin 26. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um fíggjartørv.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2024:** Samtykt at beina málið í fíggjarnevndina so at fígging verður tøk sambært tíðarætlanina.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at kommunan byggir nýggjan skúlabygning á matr.nr. 807b, Tórshavn, hevur kommunan tørv á at fáa vegatkomu til matr.nr. 807g, har gerast skal parkeringspláss til skúlan og til matr.nr. 807b.

Sambært hesi avtalu keypir kommunan netto 372 fermetrar av lendi til veg og parkering burtur av matr.nr. 807a, og selur samstundis uml. 92 fermetrar til KFUK, sum verða lagdir afturat matr.nr. 807a, við verandi KFUK bygningi.

KFUK fær í hesum sambandi tinglýstan óskerdan atkomurætt eftir vegnum til KFUK-húsið og nýtt parkeringsøki á egnum matrikkli. Ætlandi verða matrikklarnir 807b, 807g og teir umleið 372 fermetrarnir,

sum kommunan keypir burtur úr matr.nr. 807a, lagdir saman í ein matrikkul. Samstundis keypir KFUK umleið 92m², sum verða lagdir aftur at matr. 807a, har verandi KFUK bygningur stendur.

Umframt gjald fyri keypt lendi, sum er kr. 756.000 uttan tinglýsingarkostnað, fevnir avtalan eisini um ymisk arbeiði, sum kommunan ger og rindar, t.e. parkeringspláss og almenna gøtu.

Býráðið hevur við fyrstu viðgerð samtykt játtan til at keypa lendið, men krevur tvær viðgerðir. Aðrir partar av avtaluni eru í ikki fíggjaðir, sum kunnað varð um á fundi 11. mars 2024.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at góðkenna avtaluna við KFUK.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 58/24 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 36/19 | 18/00992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 83/19 | 18/00992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 68/19 | 18/00992-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 65/20 | 18/00992-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 86/20 | 18/00992-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 58/20 | 18/00992-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 265/20 | 18/00992-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 236/20 | 18/00992-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 9/21 | 18/00992-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 23/21 | 18/00992-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 56/21 | 18/00992-1 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 65/21 | 18/00992-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 91/21 | 18/00992-1 |
| 19 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 121/21 | 18/00992-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 21/22 | 18/00992-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 38/22 | 18/00992-1 |
| 22 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 31/22 | 18/00992-1 |
| 23 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 60/22 | 18/00992-1 |
| 24 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2023 | 43/23 | 18/00992-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 15.03.2023 | 74/23 | 18/00992-1 |
| 26 Býráðsfundur | 23.03.2023 | 74/23 | 18/00992-1 |
| 27 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 212/23 | 18/00992-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 06.12.2023 | 328/23 | 18/00992-1 |
| 29 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 312/23 | 18/00992-1 |
| 30 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 61/24 | 18/00992-1 |
| 31 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 67/24 | 18/00992-1 |
| 32 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 58/24 | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í 2019 er ætlanin at fara undir gøtuna við Sandá, sum varð sett á breddan í 2018, umframt gøtuna frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali.

Fyri gøtuna við Sandá hevur umsitingin í 2018 fingið til vega tilboð, áljóðandi 2.9 mió. kr. Arbeiðið varð raðfest í 2018, og er nakað av arbeiðinum longu gjørt. Játtanin í 2019 skal fevna um írestandi fígging, soleiðis at allur teinurin kann raðfestast.

Gøtan frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali er mett til at kosta einar 500.000 kr.

Írestandi fígging fyri 2019 sæst niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Gøta við Sandá | 2.900.000 kr. |
| Gøta við Sandá (goldið) | 701.250 kr. |
| Gøta Villingadal (meting) | 500.000 kr. |
| Írestandi játtan fyri 2018 | 1.200.000 kr. |
| **Eftir at játta fyri 2019** | **1.500.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 1.5 mió kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið fyri 1.9 mill. í 2019, á strekkinum fram við Sandá. Stígur kom í við at fáa endaligt loyvi frá lendisánara til seinasta strekkið. Sambært tilboði frá arbeiðstakara er kostnaðurin til seinasta strekkið 1,0 mill. kr. eftir. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá

Lendisgøtan við Villingadal bíðar eftir loyvi frá Búnaðarstovuni. Rykt er fleiri ferðir eftir loyvi, og hevur Búnaðarstovan boðað frá, at loyvi verður sent í næstum. Arbeiðið er mett til 500.000,- kr. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal

Ynski er at gera gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna. Rás er traðkað, men lendisviðurskiftini og hall á lendinum gera tað neyðugt at gera trappur í støðum í lendinum. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Skjøl:**
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna
18/00992-51 Gøtur at gera í 2022

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at framflyta avlop frá 2019 1.227 mió. kr. og at játta 1.00 mió. kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Rættleiðing til gøtuna við Sandá

Gøtan við Sandá varð boðin út í 2018.
2 tilboð komu inn, lisitatión var 6. novembur 2018:
Tikið varð av lægra tilboðnum, sum var áljóðandi 2.221.250 kr.

| **Mettur kostnaður var sostatt:** | |
|---|---|
| Tilboð | 2.221.250 kr. |
| Mettur eykakostnaður | 678.750 kr. |
| **Mettur kostnaður íalt** | **2.900.000 kr.** |

| **Status:** | |
|---|---|
| Goldið higartil tilboð | 1.765.550 kr. |
| Goldið higartil eyka (t.e. Eyka hegn, eyka atkoma frá AB vøllinum.o.a. | 258.520 kr. |
| **Goldið higartil** | **2.024.070 kr.** |

| | |
|---|---|
| Arbeiði eftir av gera tilboð | 455.700 kr. |
| Eftir til eyka | 420.230 kr. |
| **Eftir av játtan** | **875.930 kr.** |

Henda upphædd er íroknað framflutta upphædd frá 2019

Avlop verður brúkt til Lendisgøturnar planlagdar í 2020. T.e. gøtan í Villingadali og niðan á Rossagøtuna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Viðvíkjandi lendi burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, sum er privatogn. Sí kortskjal 18/00992 - 33

Kommunan hevur í samráð við eigaran gjørt gøtu framvið ánni, inni á matr. nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, og hevur í hesum sambandi flutt hegnið niðan um gøtuna. ( Sí kortskjal 18/00992 – 33 )

Neyðugt verður at keypa uml. 270m2, av lendi til gøtuna, frá verandi eigara.

Talan er um D1 øki í byggisamtyktini. Fermeturprísur sambært yvirliti hjá Búnaðarstovuni fyri velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri er 137kr. pr. m2. Samlaður keypsprísur verður uml. 37.000,- kr. og skal kommunan harumframt rinda rinda allar allar útreiðslur til matrikulering. Mettur kostnaður kr. 4.000,-

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa neyðugt lendið uml. 270 fermetrar, burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, til gøtuna fyri 37.000,00 kr. og at rinda útreiðslur til matrikulering uml. 4.000,00 kr.

Konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta 4 gøtustrekkir í árinum 2021. Talan er um gøturnar:

1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand

Ad. 1 – Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-38. Ynskiligt er at gøtan framvið Sandá heldur áfram víðari út í dalin sambært kortskjalinum. Í fyrsta umfari skal gøtan leggjast í lendi, soleiðis at hon í minst møguligan mun ávirkar náttúruna og djóralívið á staðnum. Kommunan varðar av stórum parti av lendinum, men eru eisini traðir, sum eru privat ogn og verður tí neyðugt at fara í samráðingar við hesar eigarar um hvussu gøtan gongur framvið teirra ogn. Talan er um eina tilgongd, sum kann draga út, alt eftir hvussu samráðingarnar ganga, men kann eisini hugsast, at fólk hava sæð virknaðin og stóru gleðina hjá borgarum fyri verandi gøtur framvið Sandá.
Tá gøtan er staðsett, kann arbeiðið bjóðast út og verður tá komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 2 – Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna, sí j.nr. 18/00992-39. Hendan gøtan varð raðfest í 2020, men vísti tað seg, at tilboðið upp á gøtuna var so høgt, at kommunan vrakaði tilboðið. Ætlanin er at bjóða gøtuna út av nýggjum og verður síðani komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 3 – Framhald av gøtuni Frammi í Dal í Kollafirði, sí j.nr. 18/00992-40. Gøturnar í Kollafirði verða gjørdar av sjálvboðnum initiativi, sum merkir, at fólk á staðnum standa fyri gøtugerðini, meðan kommunan fíggjar tilfarið til gøtugerðina. Í 2021 væntast at brúka 300.000 kr. til framhald av verandi gøtum.

Ad. 4 – Gøta út á Hvítasand, sí j. nr. 18/00992-41. Sambært Frílendisætlanini fyri Hoydalar er ynskiligt, at gøta verður gjørd út á Hvítasand. Gøtan skal leggjast væl í lendið og síðani bjóðast út til arbeiðstakarar at gera. Tá eitt tilboð fyriliggur fyri gerð av gøtuni, verður komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1, 2 og 4, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 300.000 av L00001, Løgukarmur fyri árið til L62019, Lendisgøtur, til framhald av gøtu nr. 4, Frammi í Dal í Kollafirði.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Gøturnar, ið eftir ætlan skulu raðfestast í ár (2021) verða gjøgnumgingnar niðanfyri í mun til kostnað o.a..
Ein eyka gøta er løgd afturat raðfestingarlistanum: gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali.

1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand
5. Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali

<u>Ad 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí skjal 18/00992-38</u>

Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað. Ástaðarfundur var á gøtuni t. 19. mars, har greitt var frá arbeiðinum. Samlaða gøtulongdin, sum skal gerast, er áleið 1910 m, og er arbeiðið á gøtuni deilast sundur í trý strekki.
Níggju veitarar við viðkomandi arbeiðsroyndum vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava fýra av hesum bjóðað uppá arbeiðið. Innkomnu tilboðsupphæddirnar vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 2.144,459,16 kr. |
| Veitari 2: | 3.145.070,00 kr |
| Veitari 3: | 4.373.882,00 kr |
| Veitari 4: | 6.016.500,00 kr |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at umsitingin fer undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið. Harumframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú frá traðaeigarum og náttúrufriðingar myndugleikanum, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd..

Kostnaður í alt: 2.273.127 kr. v/mvg
Av tí at gøtan gongur gjøgnum nógvar privatar traðir, so verður mett neyðugt við 200.000 kr. til óvæntaðar útreiðslur.

Ad. 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna sí j.nr. 18/00992-39. Gøtan er koyrd í útboð, og ástaðarfundur var á gøtuni 25. mars. Freistin hjá veitarum at senda tilboð inn er 12 apríl. Arbeiðið fevnir um at gera eina lendisgøtu við trappu. Samlaða longdin á gøtuni er 110 m.

Mettur kostnaður fyri arbeiðið er áleið 600.000 kr.

Ad. 3: Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður, sí j.nr. 18/00992-40.
Umsitingin hevur sent eitt svarskriv um játtan á kr. 300.000, samtykt í býráðnum 25. februar, til lokalu borgararnar, sum standa fyri arbeiðinum á hesi gøtuni.
Hetta arbeiðið verður framt í ár sambært avtalu.

Ad. 4: Gøta frá Boðanesið út á Hvítasand sí j. nr. 18/00992-41
Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað, og hevur ástaðarfundur verið á gøtuni 19. mars. Samlaða longdin á gøtuni er umleið 250 m.

Somu veitarar, sum til gøtu 1, vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava 7 bjóða uppá arbeiðið:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 172.500 kr. |
| Veitari 2: | 181.427 kr. |
| Veitari 3: | 275.000 kr. |
| Veitari 4: | 311.250 kr. |
| Veitari 5: | 349.750 kr. |
| Veitari 6: | 402.250 kr. |
| Veitari 7: | 404.417 kr. |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at fara undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið, umframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú yvirfriðingarmyndugleikanum.

Kostnaður íalt við MVG er 200.000 kr.

Ad.5 - Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-045
Afturat omanfyri nevndu gøtum er uppskot til gerð av gøtu kring vatnbrunnin í Havnardali (sí hjálagda kort). Uppskotið kann síggjast sum partur av frílendisætlanini fyri Havnardal, har endamálið er at skipa og varðveita økið sum frítíðarøki til almenningin.

Samlaða longdin av gøtuni er áleið 1260 m, og gongur gøtan gjøgnum landsjørð umframt kommunalt lendi. Neyðugt verður at fáa loyvir frá avvarðandi festarum, soleiðis at gøtan kann ganga gjøgnum teirra lendir.

Ætlanin er at bjóða gøtuna út til royndar veitarar. Tá tilboð fyriliggur, verður tað lagt aftur í nevnd til kunningar. Fyri at seta fyrireikingar/arbeiðið í gongd verður mælt til at játta 1.000.000 kr. til gøtuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At farið verður undir at fáa neyðugu avtalur og loyvi frá viðkomandi pørtum til gerð av nevndu gøtu 1, 2, 4 og 5.
- at játta í alt kr. 4,3 mió. kr. av konto 6275, L00001 Løgukarmur fyri árið, til konto 6275, L62019 Lendisgøtur, til gerð av niðanfyri nevndu gøtum:

| Gøta – heiti: | Kostnaður: |
|---|---|
| Gøta 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali: | 2.473.127 kr. |
| Gøta 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna | 600.000 kr. |
| Gøta 4 – Gøta út á Hvítasand | 200.000 kr. |
| Gøta 5 – Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali | 1.000.000 kr. |

- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta fylgjandi gøtustrekkir í árinum 2022.

1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu
6. Gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali
7. Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði

Sí journal nr. 18/00992-51

Stórur tørvur er á at viðlíkahalda verandi gøtukervi í kommununi og tí er ynskiligt at partur av játtanini til gøturnar fer til hetta í 2022.

<u>Ad. 1 – Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin</u>
Ein gøta á áleið 400 metrar, sum samanbindur Sanatoriivegin við Hoyvíksvegin. Henda gøtan er í Boðanesætlanini nevnd sum høvuðsgøta í frílendinum og kemur at geva møguleika fyri enn betur túrum í økinum. Gøtan liggur á landsjørð og má tí gerast í samráð við Umhvørvisstovuna, sum umsitur lendið.
Á fløtuni í Hoydølum varð fyrsti fótbóltsvøllur í Havn og ynski er um at vísa á hetta søguliga stað á leiðini. Ætlanin er at gera hetta við eini minnisplátu við mynd av fyrsta fótbóltsdystinum millum HB og TB, sum var 18. juli 1909.

Ad. 2 – Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
Nógv ymisk gøtustrekki eru gjørd í Sortudíki, Gundadali og á Ternuryggi, men summi gøtustrekki mangla og tí er ikki møguligt at ganga allan vegin frá Ternuryggi og oman til Gundadal ella yvir til Svartafoss gjøgnum tað grøna lendið. Við at gera hesi gøtustrekkini, verða verandi gøtur samanbundnar. Talan er um ymisk gøtustrekki á áleið 590 metrar tilsamans.

Ad. 3 Gøta í Viðarlundini í Gundadali
Verandi gøtukervi í Viðarlundini í Gundadali er væl útbygt við nógvum góðum gøtum og hesar verða eisini nógv brúktar av borgarunum úr øllum býnum.
Við verandi gøtukervi er tó ikki møguligt at ganga ein langan rundtúr inni í viðarlundini.
Við at gera eitt 200 metrar gøtustrekki, kann verandi gøtukervi knýtast saman og møguligt verður at ganga ein langan samanhangandi túr inni í Viðarlundini.
Arbeiðið við gøtuni skal gerast í samráð við Skógrøktina.

Ad. 4 – Gøta oman á Sandagerði Argjamegin
Ynskiligt er at skapa betur samband oman á Sandagerð við at gera eina atkomu oman á sandin argjamegin. Talan er um eina gøtu, sum gongur frá Rættargøtu, gjøgnum stykkið, sum tilhoyrir festinum í Sandagerði og oman á sandin. Loyvi krevst frá umsitarunum av festinum í Sandagerði og frá fríðingarmyndugleikunum at fara í holt við hesa gøtu.

Ad. 5 Gøta niðan á Hoyvíksvøll
Eigarafelagið Jørundar- og Torkilsgøta eftirspyr, at sambandið niðan á Hoyvíksvøll verður betur. Ymiskir møguleikar eru fyri hvussu hetta sambandið kann betrast, og umsitingin ynskir at fara í samskifti við eigarafelagið um at fáa gjørt eina góða gøtu millum Jørundargøtu og Hoyvíksvøll.

Ad. 6 Gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali
Fyrireikingar til gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali eru farnar í gongd í 2021 og arbeitt verður víðari við hesi ætlan í 2022.

Ad. 7 Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði
Gøtan er komin væl áleiðis og verður liðug í vár, og nøkur fylgiarbeiði, onkur átrokandi, eiga at verða gjørd sum avleiðing av gøtuni, ið er gjørd.
Tilfar sum lá í grótbrotinum á Boðanesi varð brúkt til gøtuna, soleiðis at bergið nú er fríttlagt. Neyðugt er at skróta bergveggin, fyri at leyst grót ikki ríður oman. Gøtan frá høvuðsvegnum og oman treingir til at verða sett í stand, jaðarin framvið hampaður og veitin reinsað, soleiðis at vatn verður hildið frá gøtuni.
Ein fløta er nú við økið, har gøtan á Hvítasand byrjar, har gamla grótrúgvan er ruddað og koyrd burtur. Ynskiligt er, at leggja skorið grót frá gamla grótídnaðinum á hesa fløtuna, til borð/stólar at fríðka um og skipa økið til uppihald.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1-5, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 1.000.000 av L62019 til viðlíkahald av gøtukervinum í kommununi og verða fluttar á konto 6212
- At játtaðar verða 150.000,- kr. av L62019 til gøtu 7, og verða fluttar á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking viðvíkjandi teimum 150.000 kr., at hesar verða fluttar av LK62019 Løgukarmur fyri

lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir – tí talan lutvíst er um eykajáttan.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Borgarstjórin mælti býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at tær 150.000 kr. verða fluttar av LK62997 Løgukarmur fyri lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin.

Atkvøtt varð um málið við fyrstu viðgerð, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johanesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti við aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Í 2022 varð samtykt at fara undir hesar gøtur:
1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu
6. Gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali
7. Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði

Fleiri av gøtunum vórðu ikki settar í gongd síðsta ár, grundað á manglandi starvsfólkatilfeingi. Støðan er tó tann, at:
- Gøtan niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu er vorðin gjørd, og var kostnaðurin fyri hesa áljóðandi kr. 80.000 íroknað mvg.
- Gøtan á Hvítasand varð gjørd liðug og avhendað.
- Grundað á, at tað er heldur torført at fara undir gøtuna kring vatnbrunnin í Havnadali, so verður bíðað við at seta hesa gøtuna á breddan í 2023.
- Gøtan framvið Sandá er í gerð, og eru nakrar avbjóðingar við at fáa hana lagda framvið nøkrum privatum matriklum. Arbeitt verður við hesum avbjóðingum, og verður gøtan eftir ætlan handað kommununi seint í 2023.

Tvær gøtur eru tó komnar afturat áður samtyktu gøtum. Hesar eru gøta niðan á Ingibjargargøtu frá Torkilsgøtu og gøta í økinum við Stórutjørn.

Sostatt verða gøturnar, sum ætlanin er at raðfesta í 2023 hesar, sí viðhefta dagførda skjal j. nr. 18/00992-58, Lendisgøtur 2023.:

1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Ingibjargargøtu frá Torkilsgøtu
6. Gøta í økinum við Stórutjørn

Játtanin til Lendisgøtur varð í 2022 brúkt til fleiri aðrar verkætlanir. Hesar vóru:

- Havnará (1 mió kr)
- Menning av Vágsbotni (1 mió kr)
- Viðlíkahald av gøtukervinum, konto 6212 (1 mió kr)

Grundað á, at omanfyri nevndu verkætlanir nýttu samtyktu játtanina, sum upprunaliga varð játtað til gerð av eitt nú gøtuni framvið Sandá, so er L62997, Lendisgøtur, nú í einum halli, sum neyðugt verður at fíggja innaftur av løgukarminum.
Á løgukarminum fyri Lendisgøtur eru settar av 4 mió kr. Henda játtanin kemur í fyrsta lagi at fíggja omanfyri nevnda hall, og at tryggja kostnaðin av gøtuni framvið Sandá, fyri síðani at fíggja gerð av gøtunum, sum ætlanin er at fara undir at fremja í 2023.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6275 | LK62997 | Lendisgøtur |

| **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62997 | Lendisgøtur | | 4.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 4.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at játta 4 mió kr. av LK62997, Lendisgøtur, til L62997, Lendisgøtur.
- at heimila umsitingini at fara undir at fyrireika, bjóða arbeiðini út og seta arbeiðini av lendisgøtunum 1-6 í gongd.
  at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mars 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mars 2023: Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Elsu Berg:**

Tikið verður undir við málinum við teirri broyting, at bíðað verður við at byggja lendisgøtuna í Hoydølum í tvey ár.

Bryotingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdótir Iversen og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, einari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.
Blankt atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Játtanini til lendisgøtur í 2023 á kr. 4 mió, er hendan raðfestingin:

| | |
|---|---|
| Hall 2022 | -713.243,00 |
| Eftir at raðfesta í 2023 | 3.286.757,00 |

1. **Gøtan við Sandá**, varð samtykt og sett í gongd í 2021.
   Fleiri avbjóðingar eru við gøtuni framvið privatu traðunum, so neyðugt verður at keypa øki at byggja gøtuna á, soleiðis at gøtan ikki fer út í ánna.
   Mett verður, at skilabest er at halda gøtuna burtur frá áarbakkanum, so hon ikki máast burtur, tá ið áin er stór. Harumframt verður eisini neyðugt at planta framvið gøtuni framvið hesum traðunum, fyri at fáa eigararnar at loyva gøtuni.
   Mettur eykakostnaður fyri at keypa lendi, hegna og planta framvið traðunum 550.000,- kr.
   Harumframt er lendið soleiðis háttað, at nógv meira tilfar fer til at uppbyggja gøturnar enn nøgdirnar, sum eru við í útboðnum.

| **Fíggjarstatus á Gøtuni við Sandá** | **kr.** |
|---|---|
| Játtan samtykt 2021 | 2.473.127 |
| Brúkt higartil | 1.638.465 |
| Eftir av upprunajáttan | 834.662 |
| | |
| **Mett neyðug játtan at gera gøtuna lidna** | |
| Mettur eykakostnaður fyri tilfar | 950.000 |
| Mettur eykakostnaður at keypa lendi og planta, undantikið matrikulering | 550.000 |
| | |
| Mett neyðug játtan at leggja afturat | <u>**665.338**</u> |

**2. Gøta í økinum við Stórutjørn**

Gøtan til Stórutjørn (936 m) varð boðin út til 2 veitarar.
Inn komu 2 tilboð.

| | |
|---|---|
| Mkoyring | 1.758.000,00 u/mvg |
| Berghestar | 2.891.246,24 u/mvg |

Broytingar eru gjørdar eftir útboðið, soleiðis at gøtuleiðin er umløgd nakað, sí skjal *jnr 23/03315-19 tillagað gøta*. Harumframt er ætlanin, at tilfar til uppbygging av gøtuni, í størst møguligan mun verður veitt frá tunnilsarbeiðinum, sum er í gerð í grannalagnum og hevur tað positiva ávirkan á prísirnar.

Lægsta tilboðið er eftir broytingarnar kr. 1.758.000,- u/mvg.
Íroknað útboðið er dragislanga til ljós, men ikki uppseting av ljósi og ljósarmatur. Avtala verður gjørd við arbeiðstakara, Mkoyring, svarandi til tilboðsupphæddina, og verður nøgdin av gøtugerð og eykakostnaðir tillagaðir sparingina, ið fæst burturúr at tilfarið kemur úr tunlinum.
Neyðug játtan kr. **1.758.000 u/mvg**

3. **Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki.**

Gøtan fer gjøgnum privat lendi, umframt lendi hjá Kringvarpi Føroya. Sí skjal *jnr 23/05126-5 Sambinding frá undir Brúnni til Ringvegin*, sum sýnir, hvussu gøtan verður løgd í lendið.
Loyvi frá privata eigaranum er treytað av, at hegnað verður framvið gøtuni, og at gøtan frá Sóljugøtu eisini verður gjørd.
Kringvarpið ynskti, at gøtan varð løgd, har traðkaða rásin frá Kringvarpinum longu er.

Lendisgøtan á 241 m varð boðin út til 2 veitarar.
Inn komu 2 tilboð:

| | |
|---|---|
| Berghestar | 317.584,61 kr u/mvg |
| Nýbygging | 848.000,00 kr u/mvg |

Tá ið arbeiðið varð boðið út, varð roknað við, at royðutilfar úr tunlinum kundi brúkast til ovasta slitlagið á gøtuni. Tað vísir seg, at talan helst ikki er um vanliga royðu, so roknast skal við, at keyp av tilfari umframt ljós o.a. skal leggjast afturat upphæddini. Mett upphædd til hetta er áleið kr. 100.000,- u/mvg.
Mett neyðug játtan fyri at gera gøtuna er áleið kr. **417.584,00 kr u/mvg**

4. **Gøta frá Sanatoriivegi til Hoyvíksveg/Eystara Ringveg**

Gøtan fer gjøgnum lendi hjá Føroya Landsstýri.
Loyvi til samtyktu gøtuna varð ikki givið frá Umhvørvisstovuni, eftirsum kravið frá teimum er, at gøtan verður løgd smb. Frílendisætlanini fyri Hoydalar.
Umsitingin hevur heitt á Umhvørvisstovuna um eisini at loyva gøtuni til aktivitetsøkið, sum smb. frílendisætlanini er staðsett har, sum fyrsti fótbóltsvøllur í Havn var. Sí *jnr 23/05125-12 Søgan um fyrsta fótbóltsvøllin í Havn* og
*jnr 23/05125-12 Gøtan og søgan um fyrsta fótbóltsvøllin í Havn.*

Umhvørvisstovan hevur sett gøtuna av (550 m), og Tórshavnar kommuna hevur bjóðað hana alment út.

Inn komu 11 tilboð: allar upphæddir u/mvg

| | |
|---|---|
| Urtagarðstænastan | 581.550,00 |
| Niels Magnussen NK Entreprenør | 617.100,00 |
| H Hansen | 783.232,00 |
| Grønalíð | 841.891,40 |

| | |
|---|---|
| Hjálpirót | 1.181.839,00 |
| Havin | 1.222.709,00 |
| "Nýbygging Bárður í Gong" | 1.296.500,00 |
| Maskinkoyring Karl Paturson | 1.250.000,00 |
| David Nordendal Sp/f | 1.555.500,00 |
| Krosscon | 1.678.200,00 |
| Maskingrevstur | 1.889.000,00 |

Tá ið arbeiðið varð boðið út, varð roknað við, at royðutilfar úr tunlinum kann brúkast til ovasta slitlagið á gøtuni.
Tað vísir seg, at talan helst ikki er um vanliga royðu, so roknast skal við, at keyp av tilfari, umframt ljós o.a. skal leggjast afturat upphæddini. Mett upphædd til hetta er áleið kr. 180.000,- kr u/mvg.
Mett neyðug játtan fyri at gera gøtuna er áleið kr. **761.550,- kr u/mvg**

5. **Lendisgøtur í bygdunum**
Á kontu 6275, L62052, Fríðkan av bygdunum, varð í juni 2023 samtykt at játta upphædd **kr. 250.000,- u/mvg** til Dalaross til framhald av gøtuni Frammi í Dal í Kollafirði.
Umboð fyri staðbundnu nevndina í Kollafirði ynskja ikki, at gøtan verður goldin av "Friðkan av bygdunum", men at upphæddin, ið er sett av til fríðkan av bygdunum, heldur fer til átøk til trivnaðarøki við Botnánna ella spælipláss á Signabø, og at gøtan verður goldin av L62997, Lendisgøtur.
Ynski frá staðbundnu nevndini í Kollafirði er somuleiðis at gera gøtu frá Traðaveg til Lygnnes. Mettur kostnaður fyri hesa gøtuna er **kr. 80.000 u/mvg**.
Tørvur er somuleiðis á at umvæla gøturnar í Kirkjugarðinum í Nólsoy.
Mettur kostnaður fyri kirkjugarðsgøtunar er á **kr. 150.000 u/mvg**.

Neyðugt er at taka støðu til, um gøtur í bygdunum skulu gjaldast av
L62997, Lendisgøtur ella av
L62052, Fríðkan av bygdunum.
Um so er, at gøturnar í bygdunum skulu gerast av L62997, Lendisgøtur, so verður neyðug játtan **kr 480.000** u/mvg til omanfyri nevndu gøtur.

**Skjøl:**
jnr 14/01476-11 Frílendið Boðanes Hoydalar
jnr 23/05126-5 Sambinding frá undir Brúnni til Ringvegin
jnr 23/03315-19, tillagað gøta
jnr 23/05125-12 Gøtan og søgan um fyrsta fótbóltsvøllin í Havn.
jnr 23/05125-12 Søgan um fyrsta fótbóltsvøllin í Havn

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Status á kontu L62019 Lendisgøtur**

| | |
|---|---|
| *Avlop 01.10.2023* | *3.146.044* |
| Harav eftir av játtan til gøtuna við Sandá | 834.662 |

| | |
|---|---|
| Neyðug meirjáttan til gøtuna við Sandá | 665.338 |
| Játtan til gøtu til Stórutjørn | 1.758.000 |
| Játtan til gøtu í Sortudíki | 417.585 |
| Játtan til gøtu Sanatoriiveg/ringv | 761.550 |
| Játtan til lendisgøtur í bygdunum | 480.000 |

**Sostatt neyðug játtan til omanfyristandandi gøtur 1.771.091 u/mvg**
**Neyðug játtan rundað upp íroknað mvg 2.000.000 v/mvg**

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | LK62997 | Lendisgøtur | 6275 | L62019 | Lendisgøtur | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2.000.000 umframt verandi játtan |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-24 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta kr 2 mió av Konto 6275 LK62997 til kt 6275 L62019 Lendisgøtur.
- at heimila umsitingini at gera avtalur við arbeiðstakarar um omanfyri standandi arbeiði, og at seta arbeiðið í verk.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. desember 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti:
Í sambandi við at Innkomuvegurin verður gjørdur, er atkoman niðaná Rossagøtuna frá býnum forðað av arbeiðsøkinum.
Tí er neyðugt at gera nýggja farleið millum býin og Rossagøtuna, tí Rossagøtan verður nógv brúkt dagliga. Umsitingin mælir til, at farleið verður gjørd millum Dánjalstrøð og Rossagøtuna.

Síðani útstykkingarnar á Klingurstjørn á Argjum er tikin í brúk, so er størri og størri tørvur á at knýta útstykkingina við aðrar hentleikar á Argjum. Tískil er ynskiligt at fara undir at gera eina gongufarleið millum nýggju útstykkingina á Klingurstjørn og verandi gøtukrevið millum undir Kongavarða og Reynsgøtu, soleiðis at borgarar lættliga kunnu ganga oman á Argir og yvir á eitt nú fótbóltsvøllin. Sum er, er trupult at ferðast millum økini uttan við bili.

Umframt gøturnar sum longu eru raðfestar, er ynski eisini at seta hesar báðar gøturnar í gongd:

**Dánjalstrøð til Rossagøtuna**, mett verður at lagaligasta farleiðin er smb. skjal jnr 18/00992-73 Dánjalstrøð-Rossagøtan. Gøtan verður á matr nr 1160c, matr nr 1160a og matr nr 1170. Á parti av matr nr 1160a er traðarleigumál, so lendið í leigumálinum skal tillagast smávegis.
Ætlanin er ikki, at gøtan kemur inná matr nr 1107 og matr nr 1108, sum Tórshavnar kommuna er í gongd við at selja til bústaðabygging.
Planlagda gøtan verður sostatt uml 450 m long, og verður kostnaðurin leysliga mett 800.000,-kr.

1. Reynsgøta til Klingurstjørn á Argjum. Mett verður at lagaligasta farleiðin er smb. skjal jnr 18/00992-72 Reynsgøta-Klingurstjørn. Gøtan verður á matr 4a, sum er lendi hjá Búnaðarstovuni, matr nr 255a, sum er kommunalt frílendi, og matr nr 255w, sum er kommunalt frílendi.
   Harumframt er neyðugt at dagføra verandi gøtu frá undir Kongavarða til Reynsgøtu er 270 m, sum er á matr nr 255w, og sum er kommunalt frílendi.
   Planlagda gøtan verður sostatt uml 300 m long, og verður kostnaðurin leysliga mett 600.000,-kr. Harumframt uml 300.000 kr fyri dagføring av verandi gøtu.
2. Tá ið gøtan til Stórutjørn varð sett í verk, varð avtalað við arbeiðstakara, at Tórshavnar kommuna veitir tilfarið til gøtuna frá arbeiðinum við Innkomuvegin og Stórhøllina, og at arbeiðstakari so ger meira gøtu fyri minniveitingina orsakað av byggiharraveitingini. Sostatt ger arbeiðstakari gøtuna frá kirkjugarðinum í Hoyvík og oman til Sundsgøtuna fyri hesa minniveitingina. Sí skjal jnr 18/00992-74 Gøta til stórhøll í gerð og Sundsgøtan.
   Sundsgøtan er í støðum í vánaligum standi, og lendið er sera bleytt og vátt. Tí eigur hon eisini at verða umvæld nú arbeitt verður í økinum. Tó verður ikki talan um at gøtan verður nýgjørd eins og gøtan til Stórutjørn, men at ábøtur verða gjørdar. Leysliga mett verður kostnaðurin 200.000,-kr.

## Skjøl:

jnr 18/00992-72 Reynsgøta-Klingurstjørn
jnr 18/00992-73 Dánjalstrøð-Rossagøtan
jnr 18/00992-74 Gøta til stórhøll í gerð og Sundsgøtan

## Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6275 | Lendisgøtur | gøta Dánjalstrøð-Rossagøtan | | 800.000,- |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6275 | Lendisgøtur | Gøta Reynsgøta-Klingurstjørn | | 900.000,- |
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6275 | Lendisgøtur | Ábøtur á Sundsgøtuna | | 200.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.900.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur (mett) | Upphædd: | 170.000 |

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at játta kr. 1.9 mió av konto 6275 LK62999, Fríðkan av býnum til kt 6275, L62019 Lendisgøtur.
- at heimila umsitingini at bjóða gøturnar út, gera avtalur við vinnandi arbeiðstakarnar um omanfyri standandi arbeiði, og at seta arbeiðið í verk.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 59/24 Umbøn um eykajáttan til kontu 7110

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.03.2024 | 18/24 | 24/01451-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 66/24 | 24/01451-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 59/24 | 24/01451-1 |

**Upprunin til málið**
Tekniska fyrisitingin hevur gjørt uppskot um at endurskoða og skipa burturkastøkið í Tórshavnar Kommunu av nýggjum. Um politiska skipanin tekur undir við uppskotinum og ynskir at seta partar av tilmælunum í verk í ár, so er tørvur á fígging, sum ikki er tøk á rakstrinum á tekniska økinum í 2024. Tí verður biðið um fígging við hesi eykajáttan.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar Kommuna og IRF hava í longri tíð arbeitt við at leggja virksemið hjá Kommunalu brennistøðini (KB) og virksemið hjá IRF saman, men hesar ætlanir eru nú endaliga sleptar, og Tórshavnar Kommuna hevur ístaðin valt at dagføra og brynja renovatiónina í kommununi út til framtíðar avbjóðingarnar á grønu leiðini.

Í hesum sambandi hevur Tekniska fyrisitingin í Tórshavnar kommunu gjørt frágreiðing við heitinum: *Uppskot til broytingar á burturkastøkinum,* jnr. 24/01098-2. Víst verður til hesa frágreiðing, har allir partar av ætlanini at dagføra og brynja renovatiónina í kommununi til framtíðina eru lýstir nærri.

Ætlanirnar um at leggja saman virksemið hjá KB og IRF hava m.a. havt við sær, at Tórshavnar kommuna ikki hevur raðfest íløgur og útbyggingar á KB hesi seinastu árini. Støðan við maskinum og útbúnaði á KB er tí afturúrsigld, og hetta hevur tyngt raksturin á konto 7110, Renovatión, nógv við fleiri óvæntaðum og størri útreiðslum hesi seinastu árini. Stór meirnýtsla hevur tí verið á hesi konto tey seinastu árini. Í 2023 var meirnýtslan góðar 4,2 mió. kr., sum verður framflutt til 2024.

Tað ber tí longu nú til at staðfesta, at konto 7110 ikki fer at megna at halda játtanina á 28.9 mió. kr. í 2024. Meirnýtslan á 4,2 mió. kr. í 2023 má tí fíggjast við eykajáttan í ár.

Harumframt má fígging eisini útvegast til at dagføra fyrisitingina á KB. Hetta verður mett til 800 t.kr. í 2024. Ein arbeiðsbólkur at gera uppskot til, hvussu økini á Hjalla og á Sundi kunnu nýtast, innrættast og rekast, verður mettur at kosta 300 tkr. í 2024.

Fyri at kunna fara í holt við at fremja broytingarnar á burturkastøkinum beinanvegin verður so statt samanlagt biðið um 5,6 mió. kr. til konto 7110 við hesi umbøn um eykajáttan.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Onki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Víst verður til frágreiðing: *Uppskot til broytingar á burturkastøkinum*, jnr. 24/01098-2.

Eykajáttanin uppá kr. 5,6 mió sum biðið verður, um er til at fíggjað:
1) Meirnýtsla 2023 kr. 4.250.000
2) Dagføring av fyrisitingini kr. 800.000
3) Arbeiðsbólkur, serkøn hjálp kr. 300.000
4) Sjálvsábyrgd fyri skaða kr. 250.000

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í sambandi við ætlanina eru hesi mál stovnað:

- 24/01098 Skipan av virkseminum á Hjalla og á Sundi
- 24/01097 Leiga av øki á Sundi
- 24/01095 Bygnaður á Brennistøðini

Felags skjøl liggja í máli nr. 24/01098.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongin.

**Skjøl**
Uppskot til broytingar á burturkastøkinum, jnr. 24/01098-2.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 7110 | | | | 4.000.000 |
| 6177 | LK61705 | Orkupolitikkur | 7110 | | Framflutt frá 2023 | | 1.600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, sum eisini er virkandi umhvørvisleiðari, mælir til, at kr. 4,0 mió. verða fluttar av játtanini fyri orkupolitikkin 2024, umframt kr. 1,6 mió. av framfluttum avlopi til orkupolitikkin 2023, sum verður avgreitt í mai 2024 í sambandi við góðkenning av kommunala roknskapinum á konto 7110, til at dekka meirnýtslu og fyri at arbeiða víðari við ætlanini “*Uppskot til broytingar á burturkastøkinum*”, jnr. 24/01098-2.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 4.250.000 av konto 6177 LK61705 á konto 7110 og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir sum eykajáttanarmál og við teirri viðmerking, at játtanarreglurnar skulu haldast.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Tikið av skrá.

# 60/24 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.05.2022 | 123/22 | 21/02196-2 |
| 11 Býráðsfundur | 12.05.2022 | 104/22 | 21/02196-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 60/22 | 21/02196-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 253/22 | 21/02196-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 244/22 | 21/02196-2 |
| 15 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 265/22 | 21/02196-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 20.12.2022 | 76/22 | 21/02196-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.12.2022 | 329/22 | 21/02196-2 |
| 18 Býráðsfundur | 21.12.2022 | 302/22 | 21/02196-2 |
| 19 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 34/23 | 21/02196-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 198/23 | 21/02196-2 |
| 21 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 163/23 | 21/02196-2 |
| 22 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 189/23 | 21/02196-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 27.02.2024 | 15/24 | 21/02196-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 54/24 | 21/02196-2 |
| 25 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 39/24 | 21/02196-2 |
| 26 Tekniska nevnd | | | 21/02196-2 |
| 27 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 60/24 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við

Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læettar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
  - Alla verkætlanina samlað,
  - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á, at umsitingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:

- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
  - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
  - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
  - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
  - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
    250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

**Ískoyti**:
Fyrsti partur av uttara ringvegi, ið er arbeiðsvegur frá á Hjalla til Villingadagsvegin, varð boðin út og lægsta boð à kr. 17.272.128 uttan MVG, hevði Articon.
Fyri at seta arbeiðið í gongd, verður biðið um fylgjandi játtan:

| | |
|---|---|
| • Tilboð | 17.272.128 |
| • Verkætlanarleiðsla, eftirlit og byggileiðsla | 1.000.000 |
| • Avleiddar verkætlanir | 5.600.000 |
| • 6,25 MVG | 1.492.008 |
| | |
| Tilsaman | 25.364.136 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Articon, at játtaðar verða kr. 25.364.136 til verkætlanina, fyrsti partur av uttara ringvegi, kr. 4.600.000 av LK81037 og kr. 20.764.136 sum eykajáttan og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.
**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at kr. 20.764.136,00 verða játtaðar av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka. Málið beint í býráðið sum eykajáttan hvat viðvíkur upphæddini á kr. 20.764.136,00.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Fyri at tryggja so stuttan flutning av grevstrartilfarinum sum gjørligt, er gjørt uppskot um avtalu við festaran á Hoyvíkshaganum Norðaripartur um at taka ímóti avlopstilfari, sum ikki verður brúkt í verkætlanini. Fyri hetta skal festarin fáa somu upphædd fyri rúmmeturin, sum annars verður kravdur í tyrvingarplássinum í Húsahaga.

Samlað er talan um ein kostnað á uml. kr. 2.150.000,00, sum ikki er íroknaður í útboðnum og givna tilboðnum ísv. verkætlanina.

Harumframt hevur verkætlanin varandi neiliga ávirkan á raksturin av festinum, tá lendið, sum festið hevur ræði á, verður lagt undir vegin og avleiddar verkætlanir umframt komandi vinnuútstykkingina í økinum. Festarin missir tá bit til seyð, undirlendi til ungneyt umframt fría atkomu til bitið. Harumframt verða skipanirnar av verandi fylgjum og gongum ávirkaðar við eyka avbjóðingum til festaran sum avleiðing. Umsitingin metir og er samd við festaran, at ein eingangssamsýning til festaran á kr. 1.500.000,00 er hóskandi samsýning fyri hesar neiligu ávirkanir á raksturin av festinum.

Avtalurnar við festaran hava við sær, at neyðugt er at hækka játtanina, ið samtykkjast skal við aðru viðgerð, úr kr. 20.764.136,00 upp í kr. 24.424.136,00.

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja uppskotið við aðru viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 24.424.136,00 av meirinntøkum í 2022 og annars taka undir við fyriliggjandi avtalum við festaran

**Fíggjarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar hevur eftir avtalu við kommununa projekterað tunnilin lidnan til høvuðsarbeiðstøku og vegurin frá rundkoyringini við Hvítanesvegin til tunnlismunnan undir Brúnni er projekteraður soleiðis, at geometri og krøv eru gjørd klár til heildararbeiðstøku – her er talan um ein lidnan projekteraðan ráveg, tað vil siga at vegkassin er liðugt projekteraður, meðan yvirbygnaður, leiðingar, avvanding, ljós búgvar o.s.fr. ikki eru liðugprojekterað, men krøvini fyri projektering av teimum eru sett upp.

Neyðugt er, at arbeiðstøkurnar fyri tunnil og veg fylgjast, soleiðis at tilfar úr tunlinum í mestan mun kann verða flutt beinleiðis úr tunlinum til vegin. Eisini verður mett, at tað er ein avgerandi fyrimunur fyri logistikkin í samlaðu verkætlanini um einans ein arbeiðstakari er fyri bæði tunnil og veg. Hetta krevur, at útboð og lisitatión fyri tunnil og veg eru samtundis.

Tunnilsgerðin inniber nógv arbeiði í sambandi við vatntrygging og bergtrygging, sum hóast tunnil hevði verið heildararbeiðstøka, helst høvdu verið avroknað øðrvísi. Tí verður mælt til, at tunnilin verður boðin út sum høvuðsarbeiðstøka. Vegurin, hinvegin, er betri egnaður at bjóða út sum heildararbeiðstøka, men vil hesin útboðsformurin krevja longri tíð, áðrenn lisitatión kann haldast fyri hesa arbeiðstøkuna. Hesi viðurskifti gera, at mett verður at besti útboðsháttur fyri samlaðu verkætlanina er, at tunnil og rávegur verða boðin út fyrst, sum høvuðsarbeiðstøka, meðan vegurin verður liðugt projekteraður til útboð til høvuðsarbeiðstøku.

Mett verður at hetta projekteringsarbeiðið saman við neyðugum kanningum verður gjørt innan ein karm á kr. 1.500.000,-. Undir hesum eru eisini neyðugar støðukanningar av verandi brúgvum, sum framhaldandi verða partur av uttara ringvegi, og projektering av broytingum av hesum brúgvunum. Hetta arbeiðið verður mett at kostað um kr. 350.000,-.

Arbeiðið verður mett at verða liðugt og klárt at bjóða út um ársenda 2022. Tó eigur at verða sett tann treyt, at farast kann ikki undir projekteringina av lidnum vegi, áðrenn Tórshavnar býráð hevur samtykt at fara undir tunnil og veg, sum lýst omanfyri.

Tó eigur at kunna farast undir at gera støðukanningar av brúgvunum beinanvegin og projektera broytingar av teimum í mun til lidnan veg.

## Játtan:

Vanlig játtan ☒

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | 81037 | Innkomuvegur | | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at samtykt verður at heimila umsitingini at:

1. Bjóða ráveg og tunnil út sum høvuðsarbeiðstøku
2. Gera sáttmála við ráðgevan um detailprojektering av vegaverkætlan frá rundkoyringini við Hvítanes til Tunnilsmunnan undir Brúnni innan eina rammujáttan á kr. 1.500.000,-, treytað av at Tórshavnar býráð samtykkir at taka av tilboði um ráveg og høvuðsarbeiðstøku. Tó eru støðumeting og projektering av broytingum av verandi brúgvum undantikin hesi treyt innan eina kostnaðarrammu upp til kr. 350.000,-
3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (íløgur), L81037 Innkomuvegur

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at pkt. 3 verður soljóðandi:

«3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (Íløgur), L81037 Innkomuvegur, av inntøkum frá avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan ringveg í Tgórshavn, frá 26. mai 2021.»

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Uppskotið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Tann 1. desember 2022 varð lisitiatión um arbeiðið at gera tunnil og ráveg. Inn komu tilboð frá P/F J & K Petersen og P/F Articon áljóðandi ávikavist kr. 310.396.677,- og kr. 293.055.268,-. Harumframt lat Articon tvey alternativ tilboð inn áljóðandi ávikavist kr. 289.150.373,- og kr. 261.876.066,-. Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðini.

Í stuttum umfata alternativu tilboðini ávikavist eitt fast-prís tilboð upp á arbeiðið, sum lýst í útboðnum og eitt fast-prís tilboð upp á ein styttan tunnil, sum á sunnaru síðuni kemur út við ríðibreytina, og síðani verður rávegur førdur oman í Marknagil.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið møguleikarnar saman við ráðgevunum og Articon til tess at røkka bestu loysnini fyri uttara ringveg. Nøktandi loysn er funnin við støði í innkomnu tilboðunum, og tekur henda loysn í størst møguligan mun teknisk og fíggjarlig heildaratlit viðvíkjandi:

1. hvussu tilfar úr tunlinum kann beinast burtur ella verða eitt tilfeingi í øðrum verkætlanum,
2. hvussu loysnin er háttað vegatekniskt í mun til normar og krøv,
3. hvussu loysnin ger seg ikki inn á umhvørvið í nærøkinum,
4. hvørja ávirkan, fylgjur av loysnini hava á umhvørvið aðrastaðni.

Í hesum sambandi hava Tórshavnar kommuna og P/F Articon fyrireikað sáttmála um heildararbeiðstøku við grundarlagi í tilboðnum í alternativi 2 og seinni tilboðstillagingum. Hesin sáttmáli fevnir tá um at gera lidnan veg millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð. Hetta er ein samlaður teinur á umleið 6.300 m, har av umleið 1.760 m eru tunnil. Tunnilin kemur at ganga millum Villingardalsvegin, undir Brúnni, til eitt øki millum ríðihøllina hjá Berg hestum og Hotel Føroyar. Her kemur tunnilin út undir ríðibreytini, soleiðis, at hendan verður varðveitt. Sáttmálaupphæddin fyri hesa heildarveiting er kr. 305.015.316,- umframt mvg. Íroknað kommunalt mvg er upphæddin kr. 324.078.773,25.

Ein partur av vegastrekkinum er vegur, sum P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil (EST) upprunaliga skuldu lata gera. Hetta snýr seg um teir fyrstu uml. 1.000 metrarnar av vegnum frá rundkoyringini á Hvítanesi. Í sambandi við at Tórshavnar kommuna skal gera vinnuútstykking á Ovara hjalla, er vorðið greitt, at hetta vegastrekkið við at verða flutt longur oman móti hamarinum gevur eina betri nýtslu av økinum, sum verður lagt av til vinnuútstykking. Tí er fyrireikað avtala við EST um, at Tórshavnar kommuna yvirtekur hetta arbeiðið og sjálvan vegin frá felagnum fyri eina samsýning á kr. 12.923.588,-, sum EST rindar Tórshavnar kommunu. Henda upphædd eigur at verða flutt inn undir L81037 Innkomuvegur, undir deild 8175 Vegir (íløgur)

Eisini er avtala gjørd við EST um keyp av gróti úr Sandoyartunlinum, sum Tórshavnar kommuna m.a. kann nýta í verkætlanini at gera innkomuvegin, vinnuútstykking á Ovara hjalla og møguligum øðrum verkætlanum. Talan er um umleið 200.000 m³ av gróti í føstum máti. Kostnaðurin fyri hetta grót er kr. 10.800.000,-, har av Tórshavnar kommuna skal gjalda EST kr. 5.000.000,- við undirskrift av avtaluni og

tær seinastu 5.800.000,- við ársenda 2024. Gjaldið við undirskrift verður tikið av løgukonto L69004 Vinnuútstykking á Ovara hjalla, undir deild 6975, Byggibúning ídnaðarøki (íløgur), sum útlegg.

Áður eru játtaðar kr. 28.924.136,- til projektering og gerð av forkanningum og arbeiðsvegi í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin. Hetta er áður fíggjað og ikki partur av hesum sáttmálanum við Articon.

Sambært avtalu milum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu verður landið at stuðla verkætlanini við kr. 110.000.000,-. Henda avtala er grundað á projekteringar av linjuføringum, íbindingum, rundkoyringum v.m., sum landsverk hevur latið gjørt frammanundan, og sum er í samsvar við samferðsluætlanina hjá landinum 2018-2030. Tórshavnar kommuna hevur, eftir at verkætlanin varð latin til kommununa at skipa, ynskt at broyta verkætlanina, so atlit til framtíðarverkætlanir hjá landinum, sum Tórshavnar kommuna ikki væntar verða framdar í næstum, verða útsett í avtaluni. Sambært verandi avtalu eiga kr. 53.600.000,- at verða útgoldnar pr. 2023.

Sáttmálin fyri framman við P/F Articon er somuleiðis grundaður á, at hesi atlit verða útsett. Fyri at tryggja, at stuðulin frá landinum hóast broytingarnar framhaldandi verður veittur kommununi, varð broytingaruppskot borðið í Løgtingið í november 2022, men bleiv tað ikki viðgjørt vegna løgtingsvalið í desember 2022. Eftir ætlan verður uppskotið við broytingum tillagað verkætlanini fyri framman og lagt aftur fyri Løgtingið, tá tað kemur saman aftur.

Á fíggjarætlan Tórshavnar kommunu fyri 2023 eru avsettar kr. 108.000.000 í úttreiðslujáttan og kr. 33.500.000 sum inntøkujáttan frá stuðlinum frá landinum.

Henda upphædd verður tó regulerað í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.

**Skjøl**
Skjølini verða løgd fram á nevndarfundinum.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 108.000.000,- |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 324.078.773,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.500.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til:

1. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Articon um heildararbeiðstøku við føstum prísi at gera vegastrekkið millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð íroknað tunnil

undir Húsareyni áljóðandi kr. 324.078.773,25 íroknað mvg. Tryggjast skal, at stuðulin frá landinum áljóðandi kr. 110.000.000,- kann veitast verkætlanini.
2. at arbeiðið sambært sáttmálanum við P/F Articon í 2023 verður fíggjað við kr. 108.000.000,- av løgukarminum LK 81037 Innkomuvegur undir 8175 Vegir (íløgur), og restin av játtanini verður at fíggja í 2024.
3. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um yvirtøku av vegastrekki á Ovara hjalla, og at inntøkan frá hesari yvirtøku kr. 12.923.588,- verður flutt á L81037 Innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
4. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um keyp av gróti frá sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 10.800.000,-, har av kr. 5.000.000 verða goldnar við undirskrift. Hetta verður at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur).
   at málið verður beint víðari í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. desember 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. desember 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, einari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi :Elsa Berg.

Blankt atkvøddu: Ruth Vang og Turið Horn.

**Ískoyti:**
Í hjáverandi ískoyti verða hesi viðurskifti tikin til viðgerðar:

- **Byggiharraútreiðslur**: Tann 5. juni 2023 var mál 23/02456 «Fígging til avleiddar útreiðslur í samband við heildarætlan, gerð av tunli og innkomuvegi» til viðgerðar í teknisku nevnd, og málið varð samtykt. Her var tilmælið soljóðandi:
  - Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
    - at játta kr. 9.000.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.
    - at peningurin verður játtaður av løgukarmi LK81037 Innkomuvegur til løgujáttan L81037 Innkomuvegur
    - At játtaðar verða kr. 12.200.000,- sum eykajáttan til løgukarmin LK 81037 Innkomuvegur.
    - At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir

  Vegna samanhangin við samlaðu játtina til innkomuvegin verður hetta málið tikið til umrøðu í hjáverandi máli og hiðani beint víðari til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina. Niðanfyri verða eisini tillagingar til hesa viðgerð lýstar, at taka støðu til, sum umfata átroðkandi viðurskiftir í sambandi við lendisræði. Hetta hevur týdning fyri framdriftina av arbeiðinum, soleiðis at tíðarætlanin heldur.

- **Regulering av játtan:** Í ískoytinum, sum varð samtykt í býráðnum tann 21. desember 2022 varð samtykt at gera sáttmála við P/F Articon um heildararbeiðstøku fyri tkr. 324.078. Í somu viðgerð varð samtykt, at arbeiðið í 2023 skuldi fíggjast við tkr. 108.000 av løgukarminum LK81037

Innkomuvegur. Í málslýsingini veður sagt: «Henda upphædd verður tó reguleráð í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.». Í apríl 2023 hevur umsitingin fingið latið prosjekt, tíðar- og gjaldsætlan frá P/F Articon. Her kann staðfestast, at fyritøkan vil gera arbeiðið skjótari enn áður lagt upp fyri. Tíðarætlanin staðfestir, at arbeiðið skal verða liðugt 1. november 2024. Sostatt verður sáttmálaupphæddin avgreidd innan 21 mánaðir, har størsti parturin liggur í 2023, tá stóra spreingiarbeiðið í tunlinum verður framt. Tí verður, um framdriftin av verkætlanini skal haldast, neyðugt at útvega størri játtan fyri 2023, enn áður samtykt.

Afturat byggiharraútreiðslunum, sum blivu samtyktar á fundi í teknisku nevnd tann 5. juni, hevur arbeiðstakarin biðið um, at lendið millum ríðibreytina, matrikul 1175h (Hotel Føroyar) og matrikul 1160a (Flatnahagin) verður tøkt í sambandi við grevstrararbeiði til inntakið av tunlinum í Marknagili. Her er talan um 15.000 m² í matr. 1175a (Húsahagi). Fyritøkan hevur tørv á hesum lendinum til atkomu og byggipláss. Samlað verður í fyrstu atløgu biðið um at leiga alt lendið, og verður tað mett, at hetta kann gerast fyri kostnað á kr. 150.000,-. Seinni í verkætlanini verður eisini neyðugt at keypa nakað av hesum lendinum (uml. 11.000 m²), men verður hetta lagt fram, tá hetta gerst aktuelt.

Samanlagt verður tí tørvur á, at játtaðar verða tkr. 9.150 til hetta. Framhaldandi er tørvur á kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.

Eisini skal herumframt vísast á, at í sambandi við heildararbeiðstøkur kunnu javnan uppstanda støður, sum gera, at byggiánarin skal taka á seg óvæntaðar útreiðslur av ymiskum slag, sum ikki eru íroknaðar sjálvan sáttmálan um heildararbeiðstøkuna. Ofta er skotbráið fyri hesum útreiðslum stutt, og drál kann viðføra seinkingar og eykarokningar. Tað er trupult at meta um hesar útreiðslur frammanundan, men vanliga verða uml 20% sett av til hetta endamál. Av tí at talan er um heildararbeiðstøku, metir umsitingin, at í miðal uml. 1 mió. kr. um mánaðan er hóskandi. Hetta svarar til áleið 6,8% av sáttmálaupphæddini, ella 22 mió kr í alt (14.270.000 fyri 2023). Hetta er upphædd, sum hædd eigur at verða tikin fyri, um fíggjarætlanin fyri 2023 skal hækkast við lántøku í sambandi við ta frá arbeiðstakaranum upplýstu framdriftina í verkætlanini í mun til uppruna metingarnar.

Í sambandi við reguleringarnar av játtanini í mun til virksemið á verkætlanini skal vísast á, at samlaði tørvurin fyri verkætlanina í 2023 er kr. 238.444.000, tá er ikki roknað við, at sambært fíggjarlóg landsins fyri 2023 eru frá landinum settar kr. 23.000.000 av til fíggjarligan stuðul til verkætlanina. Fyri árini 2024, 2025 og 2026 eru avsettar ávíkavist 31 mió. kr., 36 mió. kr. og 20. mió. kr í stuðli frá landinum. Á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu eru fyri 2023 avsettar kr. 108.000.000,-. Hetta merkir, at íroknað stuðul frá landinum resta kr. 107.440.000 í í mun til tørvin í 2023, sum er kr. 215.440.000,-. Um stuðulin frá landinum ikki er íroknaður er upphæddin kr. 130.440.000,-. Mett verður, at neyðugt er, at kommunan tryggjar sær, at øll upphæddin kr. 130.440.000,- er tøk, fyri at vandi ikki er fyri, at arbeiðið steðgar vegna væntandi gjaldføri.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☒ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Eykajáttan | 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 390.943.909,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At samtyktin hjá teknisku nevnd frá 5. juni 2023 verður trekt aftur.
- At fíggjarætlanin fyri 2023 verður hækkað kr. 130.440.000,- við eykajáttan, sum verður fíggjað við lántøku, og henda hækking verður veitt løgukarminum LK81037 innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
- At játta kr. 9.150.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.
- At játta kr. 22.000.000 til óvæntaðar byggiharraútreiðslur, harav kr. 14.270.000 verða veittar av LK81037 Innkomuvegur í 2023 á L81037 Innkomuvegur og kr. 7.830.000 verða veittar í 2024 av LK81037 Innkomuvegur
- At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Málið samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongar blankari atkvøðu við aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Anja Hartmann Wardum, Turid Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti**

Arbeiðið við innkomuvegnum gongur væl, og skjótt skal arbeiðstakarin undir at byrja arbeiðið at gera íbindingina í Marknagilsvegin. Av tí at íbindingin í Marknagilsvegin er ávirkað av íbindingunum í Dánjalstrøð, Kerjagøtu og íbindingunum íroknað ferðsluljós við Skúlaheimið, Glasir og Skúlan á Fløtum, var hendan íbindingin ikki liðugt prosjekterað, áðrenn sáttmálin um innkomuvegin varð undirskrivaður.

Nú er íbindingin liðugt prosjekterað, og Articon hevur bjóðað sær at gera arbeiðið fyri ein meirkostnað á 19,4 mió. kr. Sí tekning j. nr. 21/02196-1297.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðið frá Articon, sí j.nr.: 21/02196-1298, og metir, at kostnaðurin er í samsvari við teir eindarkostnaðir, upprunaliga tilboðið hevði. Aftrat kemur MVG, indeks og óvist, sum er 3 mió. kr. Samlað upphædd er sostatt 22,4 mió kr., sum verður fíggjað við lántøku.

**Skjøl**
21/02196-1297 D1042 Íbinding, Marknagilsvegur Planur og longdarskurður (1)
21/02196-1298 Tilboð 23-11-2023 Marknagilskrossurin.pdf

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 22,4 mió. kr. sum eykajáttan fíggjað við lántøku til løgukonto L81037, og heimila umsitingini at gera sáttmála við Articon um gerð av íbinding í Marknagil, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 61/24 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 102/22 | 22/01377-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 33/22 | 22/01377-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 154/22 | 22/01377-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 20.06.2022 | 50/22 | 22/01377-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 186/22 | 22/01377-1 |
| 8 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 157/22 | 22/01377-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 204/22 | 22/01377-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 114/23 | 22/01377-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 36/23 | 22/01377-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 202/23 | 22/01377-1 |
| 13 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 170/23 | 22/01377-1 |
| 14 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 191/23 | 22/01377-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 27.02.2024 | 16/24 | 22/01377-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 55/24 | 22/01377-1 |
| 17 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 40/24 | 22/01377-1 |
| 18 Tekniska nevnd | | | 22/01377-1 |
| 19 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 61/24 | 22/01377-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu. Býarskipanarliga er í fyrstu atløgu skilabest at víðka um verandi vinnuøkir, áðrenn farið verður undir at staðseta nýggj økir, hetta fyri at gagnnýta lendið og savna virksemið á einum stað, umframt at infrakervi, leiðingar v.m. longu er á staðnum.

Í løtuni hevur kommunan ongi vinnustykkir á sølulista. Víst verðir á økið omanfyri á Hjalla sum eina eyðsædda nýggja vinnuútstykking, tí hetta økið byggisamtyktarliga longu er eitt vinnuøki, men eisini tí at økið liggur tætt við aðra vinnuútstykking.

**Lýsing av málinum**
Linjuføringin av innkomuvegnum er nú endaliga løgd, og umsitingin mælir til, at leggja eina útstykking sunnan fyri vegin norðan fyri Stórutjørn, sí kortskjal *Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.*

Umsitingin hevur í longri tíð arbeitt við at skipa Stórutjørn sum nýggjan býling við bústøðum, stovnum, ítróttarøki, grønum økjum og lættari vinnu. Arkitektakapping varð hildin í 2020 og í mars 2022 varð ráðgevarasáttmáli undirskrivaður um skipanina av Stórutjørn. Millum økið við Stórutjørn og Vinnuútstykkingina á Hjalla liggur økið Ovari Skarðshjalli. Tað er hetta økið, sum umsitingin mælir til skal gerast til eina nýggja vinnuútstykking í kommununi.

Í sambandi við at Eysturoyartunnilin varð gjørdur, og Tunnilsfelagið hevði til ábyrgd at gera veg til tættasta innkomuveg, so varð vegur gjørdur frá rundkoyringini og allan vegin niðan á hamaran og verður eftir ætlan knýttur í innkomuvegin. Í løtuni er innkomuvegurin í útboði til í fyrsta umfari at gera ein arbeiðsveg allan

vegin yvir í Villingadalin. Nýggja vinnuútstykkingin bindir beinleiðis í innkomuvegin, og gerst íbindingin sostatt fyrsta íbindingin norðast á strekkinum.

Umsitingin mælir til, at nýggja vinnuútstykkingin verður ætlað til vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Hetta er bæði grundað á, at tað er týdningarmikið, at vinnan ikki ávirkar býlingsmenningina á Stórutjørn, umframt at mett verður at stórur tørvur er á vinnugrundstykkjum í hesum umhvørvisflokkunum. Lagt verður tí upp til at útleggja vinnuústykkingina sum B4-øki í almennu byggisamtyktini, ið umfatar vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Undir lógir og ásetingar sæst lýsing av umhvørvisflokkunum 2-4.

Tá útstykkingin verður skipað, er tað umráðandi at skipa staðsetingina av virkjunum í mun til vinnuflokkarnar, soleiðis at bústaðarøkið hevur minst møguligan ampa av virkjunum og virkseminum. T.d kundu virkini verið lagað eftir, at tann tyngra vinnan verður staðsett oman móti Skarðshjalla og tann léttara vinnan oman móti ítróttarøkinum og bústaðarøkjunum á Stórutjørn.

Ein leyslig meting av projekteringini fram til høvuðsprojekt liggur á uml. kr. 2 mió. kr. Um farið verður undir at projektera nú í vár, so verður mett, at útstykkingin er klár at bjóða út til arbeiðstakara longu í heyst. Mett verður, at útstykkingin kann verða liðug í 2023-24.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu

*Flokkur 2*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til smávegis ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstaðir og starvstovur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 20 metur.*

*Flokkur 3*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kunnu staðsetast í ídnaðarøki ella í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum hava tænastuvirksemi, t.v.s. handverkstaðir, maskinvirkir og bensinstøðir. Minsta frástøðan til bústaðir fyri henda flokk er 50 metrar.*

*Flokkur 4*
*Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey léttastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir, klædnavirkir og bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Neyðugt verður at broyta byggisamtyktina í sambandi við gerð av útstykkingini, og tí verður mælt til at fara undir hesa broyting skjótast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03588 Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7.
18/03468 Skipan av Stórutjørn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/01377-2 Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | x |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

Í málinum 18/03468 Skipan av Stórutjørn varð á býráðsfundi 24.03.2022 samtykt at játta fígging til keyp av lendinum til vinnuútstykkingina, umframt at játta fígging til projektering av vinnuútstykkingini. Tískil verður ikki neyðugt í hesum málinum at fáa fígging til hesi viðurskiftir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við ráðgeva um projektering av vinnustykkjunum á Ovara Skarðshjalla
- at heimila umsitingini at bjóða útstykkingina út, tá projekteringin er liðug, og at gera sáttmála um arbeiðstøkuna.
- at fara undir at broyta byggisamtyktina fyri økið til eitt B4-øki
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at sáttmálin um arbeiðstøkuna verður at leggja fyri aftur avvarðandi nevndir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at Articon skal gera arbeiðsvegin hjá Innkomuvegnum, sí mál 21/02196, er møguleiki at fáa avgrivið økið til vinnustykkir, ið kommunan hevur ognað sær at útstykkja til vinnustykkir, sí mál 18/03468, við at víðka arbeiðstøkuna av arbeiðsvegnum. Av tí at økið er stórt, uml. 150.000 m$^2$, vísa ávegis metingar, at tað vil kosta áleið 23 mió. kr., og er hesin kostnaður grundaður á eindarkostnaðir hjá arbeiðstakaranum í verandi sáttmála, at gera arbeiðsvegin til Innkomuvegin.

Óvissurnar í sambandi við støðuna í heimunum gera, at mett verður, at møguleikin er stórur fyri, at kostnaðurin kann hækka munandi næstu tíðina. Tí verður somuleiðis mett, at tað er ein fyrimunur fyri

Tórshavnar kommunu, at partar av arbeiðinum at fyrireika vinnustykkini kunnu gerast fyri áður givnar eindarkostnaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Articon at fáa grivið økið av, ið er lagt av til vinnustykkir, soleiðis at allur avgrevstur verður grivin av, og yvirskotið verður koyrt niðan til bóndan.
- at játta 23 mió. kr. av kontu 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldið Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum.
  at beina málið í býráðið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til tvær viðgerðir, tí talan er um eykajáttan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at heimilað verður umsitingini at gera avtalu við Articon sambært tilmælinum og við somu eindarkostnaðum sum eru nýttir í verandi sáttmála um arbeiðsvegin til innkomuvegin

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera innkomuveg er komið væl í gongd, og er farið undir at spreingja tunnilin undir Húsareyni. Í hesum sambandi er tørvur á, at grót úr tunlinum, sum ikki skal fara í vegagerð, kann fáast til høldar so skynsamt og skilvíst sum gjørligt fyri kommununa. Vinnuútstykkingin á Ovara hjalla er væl egnað til at taka móti hesum gróti, samstundis sum tryggjað verður, at grótið verður stuttflutt og einans flutt eina ferð, umframt at tað ikki verður koyrt eftir kommunalum vegum ella landsvegum og har við elvir til óneyðugt slit á hesar vegir.

Umsitingin hevur sáttmála við ráðgeva um at projektera vinnuøkið, og er henda projektering í løtuni í myndugleikafasuni. Henda projektering skal sambært avtaluni leiða til eitt útboð í høvuðsarbeiðstøku. Í skjalinum 22/01377-193 «Dømi uppá Bygging parkering vm 230523» er víst yvirlit yvir høvuðsættirnar í hesi verkætlan. Henda verkætlan er, tá myndugleikaprojektið er góðkent, ætlað at fara víðari til høvuðsprojekt, sum at enda verður boðið út til arbeiðstakarar at fremja sum høvuðsarbeiðstøka. Metast kann, at henda tilgongd kann taka nakað av tíð, áðrenn arbeiðið kann byrja.

Arbeiðstakarin á innkomuvegnum, Articon P/F, hevur víst á tørvin at fáa grótið frá tunlinum undir Húsareyni til høldar skjótast gjørligt, og í hesum sambandi latið kommununi uppskot til heildararbeiðstøku av verkætlanini at gera vinnuøkið. Hetta uppskot verður kunnað um á fundinum.

Vísast kann á, at Articon P/F við heildararbeiðstøkuni at gera vinnuøkið, kann sameina verkætlanina við verkætlanina at gera innkomuvegin og Húsareynstunnilin, sum felagið eisini ger í heildararbeiðstøku. Hetta merkir, at felagið m.a. kann samskipa grótframleiðsluna úr vega- og tunnilsgerðini við annleggsarbeiðini í sambandi við vinnuøkið, sum hevur tørv á gróti.

Í stuttum kann greiðast frá, at størsti munurin millum verkætlanina, sum avtala er gjørd við ráðgeva um, og uppskotini frá Articon P/F, er, at í uppskotinum hjá Articon P/F verða vinnustykkini bundin saman við einum vegi eftir hjallanum, meðan í verkætlanini hjá ráðgevanum er talan um tveir vegir eftir hjallanum. Hetta merkir, at munur er á uppskotunum báðum, bæði tá ræður um væntaðan kostnað, men eisini um, hvussu uppskotini liggja í lendinum. Í uppskotinum hjá Articon P/F verður roknað við lutfalsliga djúpum

stykkjum, sum hava ein hæddarmun millum veg og fjarasta lendi á uml. 10 m, sum verður vunnin við, at stykkini bæði oman- og niðanfyri vegin hava hæddarspring á uml. 4 m, 15 m frá vegøkslini og síðani skráar og beni fjarast frá vegnum at taka restina av hæddarmuninum. Í uppskotinum hjá ráðgevanum er roknað við, at stykkir niðanfyri vegirnar hava eitt hæddarspring á uml. 3 m, 15 m frá vegøkslunum og síðani skráar oman av fjarasta endanum. Stykkini omanfyri vegirnar eru á hædd við vegirnar og eru uttan hæddarspring, men einans við beni og skráum at vinna hæddina upp til lendið fjarast frá vegøksl. Í báðum uppskotum er møguleiki at blanda støddirnar av stykkjunum frá 200-300 $m^2$ til 5000 $m^2$. Eisini ber tá til at leggja størru stykkini saman til enn størri stykkir i báðum uppskotum.

Annar stórur munur á uppskotunum er, at uppskotið frá Articon letur upp fyri optión, har upp til uml. 100.000 $m^2$ av vinnustykkjum verða gjørd í mun til uml. 70.000 $m^2$ í uppskotinum uttan option og uppskotinum frá ráðgevanum. Her er kortini tørvur á, at byggisamtyktin fyri vinnuøkið á Ovara hjalla verður víðkað til at umfata alt ávirkaða økið.

Í tilfarinum, ið verður framlagt á fundinum, er samanbering millum uppskotini í teirra núverðandi skapi gjørd.

Articon P/F hevur bjóðað Tórshavnar kommunu at fremja verkætlanina eftir sínum uppskoti sum heildararbeiðstøku. Samlaður kostnaður fyri hesa heildararbeiðstøku er, íroknað byggiharraútreiðslur til óvæntað, kr. 54.000.000,- íroknað mvg. Afturat hesi upphædd skal roknast við útreiðslum til lendiskeyp av uml 20.000 $m^2$. Her kann roknast við samlaðum útreiðslum upp til kr. 2.000.000,-.

Umsitingin metir samanumtikið, at uppskotini frá ráðgevanum og P/F Articon bæði loysa tørvin á at fáa til vega vinnustykkir í økinum. Uppskotið frá ráðgevanum liggur betri í lendinum, tí tveir vegir verða gjørdir at røkka vinnustykkjunum. Hetta gevur eyka kostnað, sum ikki er í uppskotinum frá P/F Articon, har einans ein vegur er inni á økinum at røkka stykkjunum. Tann eyka vegurin í uppskotinum frá ráðgevanum viðførir ein hægri kostnað fyri verkætlanina á millum 10 og 15 mió. kr. Uppskotið hjá P/F Articon kann setast í verk og fremjast væl skjótari enn uppskotið hjá ráðgevanum, og hevur hetta eisini týdning fyri framdriftina í verkætlanini at gera innkomuvegin. Tí er samlaða metingin, at tikið eigur at vera av tilboðnum frá P/F Articon við optiónini, har 100.000 $m^2$ verða byggibúnaðir.

Tørvur er á, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt í samsvar við víddina av økinum, sum skal nýtast til vinnustykkini og í mun til nýtsluna av økinum.

Umframt omanfyri standandi viðurskifti skal her upplýsast, at býráðið tann 21.12.2022 samtykti í máli 21/02196 “Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg», at «sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um keyp av gróti frá sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 11.475,- (íroknað mvg), har av kr. 5.738.000 verða goldnar við undirskrift. Hetta verður at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur).» Henda samtykt er ikki viðgjørd í hjáverandi máli, og verður gjørt vart við tað her. Sostatt verður eisini biðið um, at upphæddin verður íroknað samlaðu umbønina í hesum umfari. Somuleiðis hevur verkætlanin «18/03468 Skipan av Stórutjørn (L69003)» goldið fyri keypið av lendinum, og eigur hetta eisini at verða endurrindað. Her er talan um tilsamans kr. 14.430.000,-

Mett verður, at vinnustykkini kunnu seljast fyri kr. 1500,-/$m^2$. Hetta er kostnaður, sum endurspeglar kostnaðin at fremja útstykkingina. Fyri at styrkja um gjaldføri kommununar eiga stykkini at verða sett til sølu so skjótt sum gjørligt.

**Skjøl**
22/01377-193 Dømi uppá Bygging parkering vm 230523.pdf
22/01377-196 VOH_Articon uppskot
22/01377-197 VOH_230619_Fíggjaryvirlit

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| Býráðsfundur<br>21. mars 2024 | Blað nr.: 262 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | | 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | | 72.917.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 99.007.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at heimilað verður umsitingini at samráðast við P/F Articon og gera sáttmála um heildararbeiðstøku av vinnustykkjunum á Ovara hjalla.
- at heimilað verður umsitingini at samráðast við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum eyka lendi og gera sáttmála um hetta.
- at omanfyri nevndu arbeiðir og keyp verða gjørd innanfyri ein karm fyri alla verkætlanina á kr. 56.000.000,-
- at játtaðar verða kr. 11.475.000,- til gjald fyri keyp av gróti frá sandoyartunlinum (jvf. Býráðssamtykt frá 21.12.22 í máli 21/02196 "Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg»).
- at játtaðar verða kr. 14.430.000,- til keyp av lendi frá verkætlanini L69003 "Skipan av Stórutjørn".
- at byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at økið, sum byggisamtyktin umfatar, samsvarar við vinnuútsykkingina.
- at heimilað verður umsitingini at fara undir at selja vinnustykkini fyri í minsta lagi ein fermetrakostnað á kr. 1500,-
- at samlaða játtanin á kr. 72.917.000,- verður fíggjað sum útlegg.
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men tó at punkt 4 verður tikið burturúr, og at samlaða játtanin verður regulerað samsvarandi.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir ið málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, trimum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Málið soleiðis samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Málið samtykt við aðru viðgerð við níggju atkvøðum fyri, fýra ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Anja Hartmann Wardum, Turid Horn og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Fjarhitafelagið hevur í løtuni ikki umstøður til at leggja fjarhitaleiðingar í vinnuútstykkingina og til stórhøllina við Tjarnir. Hetta merkir, at um fjarhitaleiðingar skulu leggjast, verður neyðugt at fáa til vega áleið 9 mió. kr. til prosjektering, keyp av tilfari, grevstur vm.

Í sambandi við verkætlanina at leggja fjarhitaleiðingar frá á Hjalla til vinnustykkini og stórhøllina við Tjarnir verður neyðugt at heimila umsitingini at samráðast við Fjarhitafelagið um tær kommunalu leiðingarnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- játtaðar verða 9 mió. kr. av kontu 6975 Byggibúning ídnaðarøki (íløgur) inn á konto 6975, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla,
- heimila umsitingini at samráðast við Fjarhitafelagið at leggja aftur fyri nevnd,
- og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undr við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 62/24 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 48/24 | 22/00590-1 |
| 2 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 19.03.2024 | 3/24 | 22/00590-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 62/24 | 22/00590-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Í hesum málinum verður byggisamtyktin fyri Kirkjubø viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Kirkjubøur er saman við Velbastað fevnt av byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað, ið varð gjørd í 1987. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína almenna byggisamtykt. Hetta merkir, at byggisamtyktin fyri Kirkjubø/Velbastað verður býtt í tvey, soleiðis at bygdirnar fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, eru hesi ymisku økini í bygdini:

B: Sethús
C: Vinnuendamál
C1A: Vinnuendamál
D: Havnarøki
$D^1$: Ferjuhavn
E: Almennir stovnar
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst og bátapláss
H: Frílendi
$H^1$: Friðað øki
J: Bóndahús
K: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað færri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø.

- B: Sethúsaøki er broytt til A: Bústaðarøki
- Tey bæði vinnuøkini C: Vinnuendamál og C1A: Vinnuendamál eru broytt til B2: Vinnuøki.
- Tey bæði havnarøkini D: Havnarøki og $D^1$: Ferjuhavn, eru broytt til B1: Havnarøki.
- Tey bæði almennu økini E: Almennir stovnar og F: Almenn frítíðarøki eru broytt til D2: Almennir stovnar og mentan.
- G: Neyst og bátapláss er broytt til E: Neyst.
- Tey bæði almennu grønu økini H: Frílendi og $H^1$: Friðað øki eru broytt til D1: Frílendi.
- J: Bóndahús er broytt til G: Bóndahús.
- K: Landbúnaður er broytt til 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting og Kort – eftir broyting*, og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri:

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Í Kirkjubø verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Talan er um eina av minnu bygdunum í kommununi, og mett verður ikki, at tað hóskar til dámin í bygdini at byggja íbúðir.

Í sethúsaøkjum í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 $m^2$. Í bygdunum verður mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Kirkjubø verður mett, at ein hóskandi grundstykkjavídd er 400 $m^2$. Hetta er grundað á verandi ásetingar fyri økið og verandi víddir á grundstykkjum í bygdini.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustigi verða tær somu sum fyri sethúsaøki í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Vinnu-/Havnaøki**
Í summum bygdum eru vinnu- og havnaøkini tvunnin saman, meðan tað í summum bygdum eru ymiskar ásetingar – í Kirkjubø eru tað áðrenn endurskoðanina tvey ymisk vinnuøki og tvey ymisk havnarøki.

Mett verður, at tað er greiðast at hava eitt øki til vinnu og eitt øki til havnarendamál í serstøku byggisamtyktunum fyri bygdirnar. Soleiðis verða tey atskild, uttan at tað gerst ov ítøkiligt, júst hvat virksemi skal vera í økinum.

**Almenn øki**

Í byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað eru áðrenn endurskoðanina 4 ymisk almenn øki – Almenn frítíðarøki, øki til almennar stovnar, frílendi og friðað øki.

Mett verður, at í bygdunum eiga tvey ymisk almenn øki at vera – eitt til grøn fríøki, har ikki er loyvt at byggja, og eitt til almennar stovnar, ítrótt og mentan. Ikki er neyðugt við serskildum øki til friðað øki. Hesi eru friðað sambært løgtingslógum, t.d. nr. 48 um náttúrufriðing og nr. 19 um fornminni og bygningar.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í teimum flestu bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Mett verður tó ikki, at frítíðarbústaðir skulu loyvast í neystum í Kirkjubø.

Í bygdunum eigur somuleiðis at vera møguleiki fyri at leggja øki av til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit, so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt, at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**
Ásetingarnar fyri landbúnaðarøki verða tær somu sum fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanina ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. grundumráði geva. Tí ynskir man, at eitt øki, SG: Bóndahús, verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Byggisamtykt fyri Kirkjubø – áðrenn broyting,* journal nr. 22/00590-3.
- *Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 22/00590-4.
- *Byggisamtykt Kirkjubøur – endurskoðað 11.01.24,* journal nr. 22/00590-5.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 22/00590-6.
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 22/00590-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>21. mars 2024 | Blað nr.: 267 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø sambært skjølunum *Byggisamtykt Kirkjubøur – endurskoðað 11.01.24* og *Kort – eftir broyting,* og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 19. mars 2024:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 63/24 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri útstykking omanfyri Argjahamar, matr. nr. 256, Kirkjubøur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.01.2023 | 11/23 | 22/07317-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2023 | 28/23 | 22/07317-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 66/24 | 22/07317-1 |
| 4 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 19.03.2024 | 4/24 | 22/07317-1 |
| 5 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 63/24 | 22/07317-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt er at fara undir útstykking omanfyri Argjahamar, sí mál *Útstykking oman fyri Argjahamar. j.nr. 21/01777*. Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum fyri økið kunnu útstykkingar bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
Útstykkingin omanfyri Argjahamar er skipað við støði í prosjekteraða vegnum í økinum.

Sambært uppskotinum til skipan av økinum, sí kortskjal *Skipan av øki_útstykking omanfyri Argjahamar,* j.nr. 22/07317-8, verður rúm fyri uml. 190 bústøðum í sethúsum, raðhúsum og íbúðum. Endaliga talið av búeindum avhongur nakað av, hvussu økini í tilgongdini verða ment saman við keyparunum. Harumframt er eitt stórt øki lagt av til bústovn/sambýli og eitt øki lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Økið er býtt í 5 smærri øki, sí kortskjal *Økisbýti 20.01.23,* j.nr. 22/07317-7, og er ein yvirskipað lýsing av meginreglunum fyri ymsu økini niðanfyri:

**Øki 1:**
Økið verður lagt til sethúsagrundstykki. Grundstykkini eru 400 $m^2$ til støddar, og mest loyvda hædd og vídd verður sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri sethúsabygging.

**Øki 2:**
Økið verður lagt til bústovn/sambýli. Mest loyvda hædd og vídd verður sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri A3 øki.

**Øki 3:**
Økið verður lagt til íbúðir í tveimum hæddum, bygdar omaná miðstaðarvirksemi. Virksemið skal kunna flokkast í umhvørvisflokki 1, ið er virksemi, ið kann staðsetast í bústaðarøki. Tað kann t.d. vera handlar, skrivstovur, læknar, matstovur og aðrar tænastuvinnur. Inngongdin til íbúðirnar verður omanfyri bygginginа og inngongdin til miðstaðarbyggingina verður niðanfyri bygginginа.

Niðanfyri bygginginа er stórt felags p-pláss, ið er ætlað miðstaðarbyggingini og dagstovninum á Argjahamri.

**Øki 4:**
Økið verður lagt til raðhús og/ella íbúðir. Byggingin verður í mesta lagi í 4 hæddum. Ymiskir møguleikar eru fyri innrætting av eindunum, t.d. kunnu tær býtast í tvey, soleiðis at tvær íbúðir vera í eindini, eindin kann vera nýtt sum raðhús við egnum grundøki, ella niðasta hædd kann nýast sum bilskýli við bústaði omaná.

**Øki 5:**

Økið verður lagt til raðhús. Hvørt grundstykki er uml. 200 m² og bygt í trimum hæddum við inngongd í miðhæddini (veghædd omanfyri byggingina).

Ynskið er at skapa eitt trygt umhvørvi, og tí er vegurin til øki 2-5, ið annars kann tykjast langligur, í støðum býttur sundur av vøkstri og felags parkeringsøkjum. Harafturat er vegurin atskildur frá bústøðunum við meginregluni um, at tað eru parkeringsøki og grønur geiri ímillum vegin og bústaðirnar, og skapa hesi eina varda bústaðar-zonu, við gonguleið og bústøðum.

Felags fyri økini er, at tey øll hava felags fríøki, og umframt tey smb. almennu byggisamtyktini kravdu parkeringsplássini, so eru eisini øki løgd av til felags parkeringsøki.

Lendini verða boðin út, sí j.nr. 22/07223, *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* og endaligu byggisamtyktarøkini verða nágreinað saman við mennarunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

- Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk, og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
- Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Útstykking oman fyri Argjahamar,* j.nr. 21/01777.
- *Útbjóðing av lendi á Argjum til bústaðar-, stovns- og vinnubygging,* j.nr. 22/07223.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**

- *Skipan av øki_útstykking omanfyri Argjahamar*, j.nr. 22/07317-8
- *Økisbýti 20.01.23,* j.nr. 22/07317-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera uppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið omanfyri Argjahamar sambært meginreglunum nevndar omanfyri, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. januar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at møgulig framtíðar útbygging av Skúlanum á Argjahamri verður við eini hædd omaná.

**Býráðsfundur 26. januar 2023:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti

Í sambandi við, at málið hevur ligið til almenna hoyring í tíðarskeiðinum 20. desembur 2023 til 7. februar 2024, komu inn trý hoyringsskriv, sum handla um:

1. Mótmæla staðseting av enn einum stovni (Øki B)
2. Økja hædd (Øki C)
3. Áseting um nýtslustig (Øki C)
4. Økja hædd (Øki D)
5. Krav um sundurbrotnar bygningseindir (Øki D)

**Til nr. 1 Mótmæla staðseting av enn einum stovni (Øki B)**
Mótmælið frá íbúgva á Argjum (sí *1. Mótmæli*) snýr seg um, at øki B verður lagt til almennan stovn, og vísir á, at tað tykist ikki sum um, at nøkur heildarætlan fyriliggur fyri Argir, har øki verður lagt av til handilsøki, læknamiðstøð, stovnar til argjabúgvar, ítróttarhøll, tilhald fyri eldri, ellisheim ella kirkju. Somuleiðis verður víst á, at lutfalsliga nógv sambýlir eru staðsett á Argjum seinastu árini, samanborið við aðrar gerandisligar tænastur, ið tørvur er á.

Útstykkingin oman fyri Argjahamar er partvís planløgd við bústøðum, øki til stovn og øki til miðstaðarvirksemi.

Býarskipanarliga er tørvur á øllum fólkasløgum, og ynskir kommunan framhaldandi at arbeiða við eini fjølbroyttari fólkasamanseting. Eins og býurin veksur, so er eisini tørvur á at leggja øki av til stovnsvirksemi av ymiskum slag.

Seinastu árini er Argir voksið sera nógv, og nógv bústaðarbygging hevur verið framd á Argjum. Hetta merkir somuleiðis, at lendi er lagt av til bygging av ymiskum stovns-virksemi, og tískil kann tykjast, at serliga nógvir stovnar eru á Argjum.

Í allari kommununi er tørvur á at leggja lendi av til stovnsvirksemið, og í sambandi við nýggjar útstykkingar kring alla kommununa verður altíð hugsað um, at leggja lendi av til tílíkt virksemi eisini.

Harafturat er at viðmerkja, at øki C í serstøku byggisamtyktini oman fyri Argjahamar er lagt av til bæði bústaðir og miðstaðavirksemi. Somuleiðis er ætlanin, at økið, sum er lagt av hinumegin Glyvursvegin oman móti Argjahamri, men sum enn ikki er vorðið partur av serstøku byggisamtyktini, skal leggjast av til eitthvørt miðstaðarvirksemi.

Harumframt verður arbeitt við gera eitt trivnaðarøki burturav, har viðarlundin á Argjum er undir gerð. Hetta økið er hugsað sum eitt økið, har Argjabúgvar kunnu njóta náttúruna, útsýnið og friðin.

**Til nr. 2: Økja hædd (Øki C)**
Hoyringsskriv (sí *1. Broytingaruppskot*) kom frá ráðgeva, ið umboðar ætlanir hjá Pf Miðlon fyri øki C, har mælt verður til at broyta mest loyvdu hædd frá 15 m til 16,5 m,

**Til nr. 3: Áseting um nýtslustig (Øki C)**
Sama skriv, mælir til at broyta ásetingina fyri nýtslustig, soleiðis at goymslurúm undir jørð ikki telja við. Lagt verður afturat, at hetta hevur verið praktiserað í fleiri íbúðarbyggingum seinastu árini.

**Til nr. 4: Økja hædd (Øki D)**
Tað triðja hoyringsskrivið (sí *2. Broytingaruppskot*) kom frá ráðgeva, umboðandi ætlanir hjá Spf. Joan Petur Vang, í mun til øki D. Mælt verður til at broyta mest loyvdu hædd til útvegg frá 12 m til 12,5 m.

**Til nr. 5: Krav um sundurbrotnar bygningseindir (Øki D)**

Sama skriv grundgevur fyri at broyta kravið um forskjótingar av framsíðuni móti vegnum og ístaðin krevja sundurbrotnar bygningseindir fyri at lætta um atkomu til fríøkið og tryggja betri ljósviðurskifti.

Umsitingin metir, at viðmerkingar í hoyringsskrivinum viðvíkjandi øki C og D eru í samsvari við yvirskipaðu ætlanirnar við serstøku byggisamtyktini, og hevur broytt uppskotið tilsvarandi. Broytingarnar síggjast við reyðari og grønari frámerking í skjalinum *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Rættað 23.02.2024*.

**Nýggj skjøl**

- *Skipan av øki_útstykking omanfyri Argjahamar*, j.nr. 22/07317-8
- *1. Broytingaruppskot,* j.nr. 22/07317-18
- *2. Broytingaruppskot,* j.nr. 22/07317-18
- *1. Mótmæli,* j.nr. 22/07317-18

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið oman fyri Argjahamar sambært *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar – Rættað 23.02.2024*, og beina málið í býráðið og síðani at beina málið í kirkjubø- og velbastaðarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við uppskotinum, og at beina málið í býráðið.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 19. mars 2024:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Bygningskunngerðin frá 2017 loyvir ikki frávikum av ábygging og nettonýtstlustigi í serstakari byggisamtykt, eins og mótmæli nr 3. mælir til. Henda broytingin er tí ein feilur, sum umsitingin hevur rættað.

Í rættaða uppskotinum, *sí Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Rættað 12.03.2024*, er punkt 8 strikað, har tað stóð "Goymslurúm undir jørð, telja ikki við í ábygging og nettonýtstlustigi".

Ístaðin, er áseting um mest loyvda nýtslustig hækkað úr 0,7 til 0,8 í punkt 7, fyri øki C, soleiðis at fyriliggjandi heildarætlan fyri økið letur seg gera innan fyri uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt.

**Nýggj skjøl**
Jnr. 22/07317-17 Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Rættað 12.03.2024

Nevndin hevur um teldupost tikið undir við rættingini, sum formliga verður staðfest á næsta fundi í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla býráðnum til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri økið oman fyri Argjahamar sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt omanfyri Argjahamar - Rættað 12.03.2024*.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 64/24 Broyting av byggisamtykt fyri matr. nr. 193 og 191b, Gr. Kambansgøta 11, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 150/21 | 21/00804-6 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 11/24 | 21/00804-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 53/24 | 21/00804-6 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 64/24 | 21/00804-6 |
| 5 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 64/24 | 21/00804-6 |

**Upprunin til málið**
Umsókn er send Tórshavnar kommunu viðv. bygging og niðurtøku á matr. nr. 193 og 191b. Søkt verður um at byggja íbúðarhús við trimum íbúðum umframt at loyva eini kjallarahædd móti Vágsbotni við útvendum virksemi. Talan er um byggimál, ið ikki er gingið á møti, tí umsókn ikki er í tráð við almennu byggisamtyktina. Frávikið kann hava positiva býarskipanarliga ávirkan á økið í Vágsbotni, tískil er ein møgulig tilgongd at gera nýggja serstaka byggisamtykt tikin upp.

**Lýsing av málinum**
Á fundi 24. februar 2021 varð uppskot lagt fram við ynski um at byggja íbúðarhús við trimum hæddum umframt eina kjallarahædd við hátúni móti vegnum í Vágsbotni. Ognin vendir móti suðri, og er beinleiðis samband við gongubreytina, sum leiðir ein frá Skálatrøð og yvir til torgið í Vágsbotni. Talan er um kjallarahædd ætlað til matstovu, café, spælistað ella líknandi virksemi. Kjallarahæddin vil á henda hátt verða við til at knýta økið frá Smiðjuni í Lítluvík saman við torginum í Vágsbotni og út í Bakka.

Kjallarahæddin er ikki í tráð við almennu byggisamtyktina hjá Tórshavnar kommunu, og má serstøk byggisamtykt gerast sambært almennu byggisamtyktini, um loyvi skal gevast til kjallarahæddina og ætlaða virksemið út móti Vágsbotni.

Talan er um eina góða býarskipanarliga loysn, sum kann gerast eitt bindilið millum Skálatrøð og Vágsbotn. Deyð strekki, eins og hetta, eru sambært miðbýarætlanini lýst sum avbjóðingar í miðbýnum. Grundað á vantandi býarlív og virksemi, er strekkið keðiligt at ferðast ígjøgnum, og tykist frástøðan millum Skálatrøð og Vágsbotn tí eisini longur, enn hon í veruleikanum er.

Lagt verður upp til at nýta tilfar og litir úr nærumhvørvinum, og eru tilvísingar til gomlu bygningarnar í økinum. Framsíðan móti Vágsbotni verður í uppskotinum myndað við grótlaðing, timbri og svartari tjøru tó við eini nútímans útsjónd, sum skapar eina býarkenda framsíðu, sum somuleiðis tillagar seg til søguliga nærumhvørvið, sí skjal *VD – Tekningar 01.07.2021.pdf*.

Grundað á omanfyri standandi, mælir umsitingin til at gera nýggja serstaka byggisamtykt fyri økið í Vágsbotni, sum fevnir um matriklarnar 193, 191b og grannaognir, sí kortskjalið *Økið í Vágsbotni*. Talan er enn bert um eina umsókn, men kann hetta økið lættliga styrkjast, um hugsað verður í eini størri heildarmynd, sum fevnir um grannaognir, p-pláss, trappur, uppihald og samband til nærindis gøtur. Hugsast kann, at talan gerst um hugnaligt umhvørvi til trivnað og uppihald, har til ber at uppliva maritima dámin í Vágsbotni.

Mælt verður til í eini nýggjari serstakari byggisamtykt:
- at býta økið í trý, t.v.s. ávikavist bygningarnir móti p-økinum á Skálatrøð, p-øki frammanfyri bátabrúgvarnar og bygningarnir móti torginum í Vágsbotni.

- at seta krøv til útvent virksemi á niðastu hæddini móti Bøgøtu (Glitnir), bátabrúgvunum og torginum í Vágsbotni.
- at seta krøv til mest loyvdu hæddarkotu ístaðin fyri mest loyvdu hæddir.
- at seta krøv til útsjónd (framsíður), sum verður sera eyðkend í býarmyndini.
- at seta krøv, sum taka atlit til neystavirksemið (neyst er við síðuna av Sirkus).

Harumframt skal kannast, hvørjar treytir skulu setast til varðveiting av verandi trøum og gróðri í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er fevnt av 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu. Ásetingarnar fevna um:

> *2. grundumráði verður alt, sum tað er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
>
> *Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 8 m til hægsta punkt við útvegg og 10 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.*
>
> *Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið, kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 8 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 10 $m^2$.*
>
> *Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, náttúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 1,25.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 193 og 191b, Gr. Kambansgøta 11, Tórshavn*, journal nr. 20/03530.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki

**Skjøl**
- *VD – Tekningar 01.07.2021.pdf,* journal nr. 21/00804-3
- *Økið í Vágsbotni,* journal nr. 21/00804-7

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til, um arbeiðast skal víðari við uppskoti til serstaka byggisamtykt fyri økið, sum víst á kortskjali *Økið í Vágsbotni*.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at arbeiðast skal víðari við uppskoti til serstaka byggisamtykt fyri økið, sum víst á kortskjali *Økið í Vágsbotni.*

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við broyting av serstakari byggisamtykt fyri økið millum Vágsbotn, Gríms Kambans gøtu og Bøgøtu og hevur framleitt eitt uppskot, sum bæði tekur atlit til fyriliggjandi umsóknir, sum gagnýta og aktivera økið meira, samstundis sum at núverandi styrkir í økinum verða varðveittar, sí skjal *Megintættir – serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Gr. Kmbansgøtu 22.12.23*. Tey viðurskifti, ið fyrst og fremst verða regulerað í serstøku byggisamtyktini, og sum víkja frá ásetingunum í almennu byggisamtyktini fyri økið, eru tal av hæddum, nýtslustig og nýtsla húsanna.
Sambært nýggju serstøku byggisamtyktini verður økið framvegis nýtt til blandað mistaðar- og bústaðarendamál, har útvent virksemi skal vera í niðastu hædd oman móti Vágsbotn-vegnum. Krav verður ikki sett til atknýtt bilstøðupláss í sambandi við nýggja bygging.

*Økið verður sundurbýtt í smærri eindir, nevndar Øki A, B og C.*

Øki A: umfatar matriklarnar nr. 186, 187 og 188, sum hava mark við Vágsbotn-torgið.
Her verður byggistigið sett til 0,9, og nýtslustigið 1,8. Hæddarmarkið frá grundplani til hægsta punkt á tekjuni er 10m. Hæddarmarkið frá grundplani til ovasta punkt á húsaveggi er 8m. Umvælingar á verandi bygningar eru loyvdar, men stórvegis broytingar mugu fyrihalda seg til ásetta nýtslustigið. Hetta merkir so statt, at um talan verður um umvælingar, skulu núverandi bygningar ikki gerast hægri enn teir eru í dag. Orsøkin er, at bygningarnir avmarka sólarljósið til Vágsbotn-torgið og trappuna.

*Øki B umfatar matriklarnar nr 190 og 191b, sum verða nýmatrikuleraðir sum byggilendi.*

Her verður byggistigið 0,9 og nýtslustigið 2,2. Byggjast kann út í mark, men grundhæddin skal nýtast til útvent virksemi. Har fleiri hæddir verða bygdar, skal grundhæddin verða trekt inn frá markinum á framsíðuni, sum vendir oman ímóti sjónum. Økið framman fyri matrikkulin oman ímóti sjónum skal innrættast til uppihald. Hetta kann gerast eftir avtalu við kommununa. Um talan er um stórvegis broytingar á verandi bygning, so sum broyting av tekjuhædd og skapi, skal bygt verða við mønutekju. Hæddarmarkið frá grundplani til hægsta punkt á mønuni er 10m. Kvistar, og kvistaskap eru loyvd bæði oman ímóti sjónum og niðan ímóti Gríms Kambans gøtu. Hæddarmarkið frá grundplani til ovasta punkt á húsaveggi er 8,5 m, undantikið har húsaskjøldrar og kvistar eru.

*Øki C umfatar matriklarnar nr. 191b, 192, 193 og 195*

Her verður byggistigið 0,5, og nýtslustigið 1,4. Tá tað snýr seg um nýbygging ella heildarumvæling av verandi bygningum skal niðasta hædd verða avsett til útvent virksemi. Grundhæddin skal verða trekt inn frá teirri framsíðuni á bygninginum, sum vendir oman ímóti sjónum. Økið oman ímóti sjónum skal innrættast til uppihald.
Um talan er um stórvegis broytingar á verandi bygningar, so sum broyting av tekjuhædd og skapi, skal bygt verða við mønutekjuskapi. Hæddarmarkið frá grundplani til hægsta punkt á mønuni er 13,5m, mált frá Vágsbotn-vegnum. Kvistar eru loyvdir bæði oman ímóti sjónum og niðan ímóti Gríms Kambans gøtu. Hæddarmarkið frá grundplani til ovasta punkt á húsaveggi er 11,5m, mált frá Vágsbotn-vegnum, undantikið har húsaskjøldrar og kvistar eru.

Serstaka byggisamtyktin gevur pláss fyri heildarætlan, har nýggj lendistrappa millum Gríms Kambans gøtu, og Vágsbotn, knýtir Tróndargøtu at nýggjari bryggjugøtu, og at pláss er fyri meira útvendum virksemi

fram við Vágsbotn-vegnum. Samanumtikið er hugsjónin, at økið framyvir verður skipað við øktum tættleika, uttan at hetta órógvar miðingarlinju til serstaka útsýnið yvir Vestaru vág, og at hægri bygging avbyrgir sólarljós. Hetta er í samsvari við Miðbýarætlanina og virkar til, at økið fram við Vágsbotn-vegnum kann gerast eitt býarskipanarligt bindilið millum Vágsbotn-torgið og Skálatrøð.

Allir eigarar í økinum verða kunnaðir um ætlanina og fáa møguleika at viðmerkja.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tvær ítøkiligar umsóknir eru um bygging í økinum, sum uppskotið til serstaka byggisamtykt fevnir um, sí viðløgdu skjøl VD – Tekningar 01.07.2021.pdf og Drangin í Vágsbotni_Prosjektuppskot_20220307.pdf. Við smáum tillagingum, so rúmast hesi bæði uppskotini til bygging í uppskotinum til serstaka byggisamtykt.

**Skjøl:**

| | |
|---|---|
| 21/00804-26 | Megintættir - Serstøk byggisamtykt fyri Vágsbotn og Gr. Kmbansgøtu 22.12.23 |
| 21/00804-3 | Nýtt tilfar frá umsøkjara |
| 22/01370-2 | Uppskot - Drangin í Vágsbotni |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera serstaka byggisamtykt fyri Vágsbotn og Skálatrøð sambært meginreglunum lýstar omanfyri og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri treyt, at tá hoyringsfreistin er farin, verður málið lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina aftur.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 65/24 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 5

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 208/23 | 23/02842-6 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 318/23 | 23/02842-6 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 62/24 | 23/02842-6 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 65/24 | 23/02842-6 |

**Upprunin til málið**
Eigarin og umboð fyri eigarar av ognum á Húsabrúgv hevur vent sær til kommununa við áheitan um at gera sáttmála ella aðra binding fyri økið við tí endamáli at varðveita dámin við gomlum siðbundnum húsum í økinum. Ítøkiliga er talan um ognirnar matr. nr. 71, 73, 76, 80, 72a, 72c, 74, 83, 85, 78, 77a, 79, 81, 82a, 82b, 82c og litra æ, ø, z, Tórshavn, sí skjal *VS_Húsbrúgv* og *Ognarar – umsókn.*

**Lýsing av málinum**
Økið liggur í 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini, og serstaka byggisamtykt nr. 5 er galdandi fyri økið á Húsabrúgv. Serstaka byggisamtyktin, ið varð gjørd í 1970'unum, skipar økið av nýggjum, hevur nakað tættari bygging enn byggingin, ið er har í dag, og tekur ikki atlit til siðbundna húsasniðið, ið fleiri av húsunum í økinum hava, sí skjal *Fylgiskjal I*. Á fylgiskjalinum sæst m.a., at ætlanin var, at byggingin fram við Áarvegnum skuldi vera samanbygd, meðan økið vestanfyri skuldi gerast til parkeringspláss, og soleiðis skuldu fleiri av eldru húsunum takast niður.

Hugsanin um ynsktu býarskipanina av økinum er broytt, síðani serstaka byggisamtyktin varð gjørd, og umsitingin metir, at nýggja umsóknin er í samsvari við ynskið um at varðveita gomul húsasnið í miðbýnum, soleiðis at nakað av samleika verður varðveitt.

Skotið verður upp at avtaka ætlaðu byggiskipanina og seta áseting í serstøku byggisamtyktina, ið vísir til, hvørji húsasnið byggjast kunnu í økinum. Tilvísingarnar verða til hús, ið eru í økinum frammanundan, og verða mett sum snið, ið umboða dámin, ið ynskið er at varðveita.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Av tí at ætlanin er at broyta ásetingar í serstøku byggisamtykt nr. 5, verður uppsetanin av serstøku byggisamtyktini somuleiðis broytt, soleiðis at hon verður sett upp eftir sama leisti, sum nýggjar serstakar byggisamtyktir verða settar upp.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Nýggja uppskotið ásetir nýggjar reglur fyri bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, og fær hetta avleiðingar fyri ognirnar í økinum.

Aðrir eigarar enn teir, ið umsøkjari umboðar, og Tórshavnar kommuna, eru í økinum og teir eru:
- matr. nr. 70, sp/f Harhog
- matr. nr. 78, Áshild Olsen
- matr. nr. 89b, Føroya Landstýri

Hesar tríggjar ognirnar eru frammanundan í stóran mun fult útbygdar í mun til hædd og byggistig, men uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt hevur meira nágreiniligar ásetingar viðvíkjandi útsjónd og dámi á bygningum. Umsitingin metir, at hetta við tíðini fer at hækka virðið á ognunum í økinum.

Allir eigarar av ognum í økinum fáa kunning um uppskotið til broyting av serstøku byggisamtyktini, og fáa høvið at koma við viðmerkingum.

### Skjøl

- *Serstøk byggisamtykt nr. 5 – áðrenn broyting,* journal nr. 23/02842-9.
- *Serstøk byggisamtykt nr. 5 – eftir broyting,* journal nr. 23/02842-9.
- *Ognarar – umsókn*, journal nr. 32/02842-8.

### Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *Eftir broyting* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt.

### Ískoyti

Uppskotið hevur ligið til hoyringar í tíðarskeiðinum 18. desember 2023 til 4. februar 2024, og tá gjørdi eigari av ognum í økinum umsitingina varuga við ta ótíðarhóskandi tekningina í fylgiskjali 1.

Hetta skjalið í galdandi byggisamtyktini (sí *Skjal 1*) vísir mest loyvdu hæddir á bygningunum út móti Áarvegnum, og er teknað fyrst í sjeytiárunum. Tekningarnar í fylgiskjali 1 vísa ikki umstøðurnar í dag, ella tær ætlanir, sum eru fyri økið.

Umsitingin hevur tí dagført fylgiskjal 1 (sí *Skjal 1 – Dagført)* við nýggjari tekning, sum sýnir veruligu umstøðurnar og nýggjar hæddarásetingar, sum vísa, hvussu økið kann mennast í framtíðini.

### Nýggj skjøl:

- *Serstøk byggisamtykt nr. 5 - 15.02.2024,* journal nr 23/02842-21
- *Skjal 1,* journal nr 23/02842-22
- *Skjal 1 – Dagført* , journal nr 23/02842-22

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *Serstøk byggisamtykt nr. 5 – 15.02.2024* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmmælinum.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 66/24 Broyting av almennu byggisamtyktini frá A1 til 4. Grundumráði fyri part av matr.nr. 13a, Norðadalur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 63/24 | 23/03807-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 66/24 | 23/03807-2 |

**Upprunin til málið**
Búnaðarstovan hevur søkt um at broyta part av matr. nr. 13a, Norðradalur frá A1 øki til 4. grundumráði. Umsóknin er í sambandi við ætlanir festarans um at byggja nýtt fjós í økinum.

**Lýsing av málinum**
Búnaðarstovan hevur søkt um markaumskipan og sundurbýti til samanlegging, matr. nr. 20a og 13a, Norðradalur, sí mál nr. 22/00242, *Umsókn um marknaumskipan og sundurbýti til samanlegging, matr. nr. 20a og 13a, Norðradalur.*

Partur av økinum, ið søkt verður um, liggur í A1 – bústaðarøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Um økið skal kunna frábýtast og nýtast til landbúnað, má byggisamtyktin fyri økið broytast til 4. grundumráði, sum er øki ætlað landbúnaði.

Økið, sum søkt verður um at broyta, er partur av einum størri A1 øki í Norðradali. Aðrir landbúnaðarbygningar liggja í hesum A1 økinum, og tískil verður mælt til somuleiðis at broyta økið kring frammanundan bygdu landbúnaðarbygningarnar til 4. grundumráði, soleiðis at ásetingarnar eru í samsvari við verandi og ætlaða virksemið í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

1. Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.
   Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m2 fyri stakhús og 300 m2 fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 m2 fyri hvørt grundstykki.
4. Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.
6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 m2 ella minni, fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m2 og 500 m2 verða sett javnt minkandi soleiðis, sum mynd 3 vísir.




Mynd 3

7. Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
8. Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.
9. Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.
10. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.
11. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 m2, tó í minsta lagi 400 m2.
12. Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

1. 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
    a) Loyvt er at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.
    b) Á jarðarstykkjum omanfyri 5.000 m2 er í mesta lagi loyvt at byggja 60 m2 í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 m2 gólvvídd.
    c) Á jarðarstykkjum undir 5.000 m2 er í mesta lagi loyvt at byggja 30 m2 gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.
    d) Loyvt er at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar.
    e) Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. Grundumráði.
    f) Øll bygging í 4. Grundumráði sambært § 26, stk 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt
3. Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.
4. Í sambandi við bygging í 4. grundumráði treytar kommunan sær rætt at seta krøv til skap og staðseting.

**Upplýsingar frá umsitingini**

11. desembur 2023 varð broytingaruppskotið um at broyta A1 øki til 4. grundumráði sent Búnaðarstovuni til viðmerkingar. Umsitingin hevur onga viðmerking móttikið, og tískil verður farið undir at broyta byggisamtyktina.

Tá broytingaruppskotið verður lagt til almenna hoyring, verður tað somuleiðis sent Búnaðarstovuni og festaranum til hoyringar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Umsókn um marknaumskipan og sundurbýti til samanlegging, matr. nr. 20a og 13a, Norðradalur,* journal nr. 22/00242.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

-

**Skjøl**

- *Áðrenn broyting,* journal nr. 23/03807-6
- *Eftir broyting,* journal nr. 23/03807-6

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 13b og part av matr. nr. 13a frá A1 til 4 grundumráði, sambært kortskjali *Eftir broyting,* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 67/24 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla, matr. nr. 139a, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 209/23 | 23/04694-1 |
| 2 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 319/23 | 23/04694-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2024 | 65/24 | 23/04694-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 67/24 | 23/04694-1 |

**Upprunin til málið**
Arbeitt hevur í eina tíð verið við at skipa eina nýggja vinnuútstykking á Ovara Hjalla. Skipanaruppskot er gjørt og klárt er at gera serstaka byggisamtykt fyri økið.

**Lýsing av málinum**
Vinnuútstykking á Ovara Hjalla hevur uml. 29 stykkir:

- 24 eru 2000-5000 $m^2$.
- 1 er uml. 7000 $m^{2.}$
- 2 eru 10.000-11.000 $m^{2.}$
- 2 av grundstykkjunum, uml. 10.000 $m^2$ tilsamans, verða skipaði við smáum grundstykkjum, sum eru 200-500 $m^2$ til støddar.

Økið liggur sum B4 og B7 vinnuøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Virkini í økinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 2-4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu. Virkini í hesum flokkunum eru t.d. handverkstaðir, maskinvirkir, bensinstøðir, matvøruvirkir og bilverkstaðir. Frástøðan frá tílíkum virkjum til bústaðir skal vera uml. 100 m.

Stykkini eru rættiliga ymisk til støddar og gevur hetta rúm fyri, at rættiliga ymiskt virksemi kann staðsetast í økinum. Størru stykkini rúma virksemi, ið vanliga sæst í tílíkum vinnuøkjum, meðan smáu stykkini, sum eru uml. 200 $m^2$, eru ætlaði smáum virkjum, ið ikki hava stórvegis tørv á hølum at taka ímóti viðskiftafólki, men hóast hetta hava tørv á einum lítlum rúmi til goymslu ella annað.

Ovari Hjalli liggur fram við nýggja innkomuvegnum, og verður økið soleiðis eitt tað fyrsta, gestir, ið koma frá undirsjóvartunlinum ella vestan frá, møta, tá tey koma til Havnar. Tískil hevur tað alstóran týdning, at økið tekur seg væl út. Í serstøku byggisamtyktini eru settar ásetingar inn um, at bingjur og leysafæ annars ikki skal vera á ognunum. Somuleiðis eru ásetingar um, at tveir og tveir bygningar kunnu verða bygdir saman, og at tveir og tveir bygningar kunnu deila omankoyring til niðaru hæddirnar av byggingini.

Somuleiðis verður mælt til at víðka um B4 vinnuøkið, soleiðis at tað samsvarar við útstykkingarætlanina, og broyta økið, ið er ætla teimum smáu grundstykkjunum, frá B4 vinnuøki til B7 vinnuøki í almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Uppskot til nýtt B7 vinnuøki, ið er ætlað stykkjum, ið eru 200-500 $m^2$ til víddar, er samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini, og fer fyri býráðið í næstum, áðrenn tað verður lagt til almenna hoyring, sí mál 23/04693.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B4 øki í almennu byggisamtyktini:

1. Umráðisparturin verður lagdur til vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 2000 $m^2$.
4. Útstykking verur einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrligt avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
6. Rúmmál á húsunum skal ikki fara upp um 3 $m^3$ fyri hvønn $m^2$ av grundstykkinum.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 12 m.

Uppskot til ásetingar í nýggja ætlaða B7 vinnuøkinum:

1. Umráðisparturin verður lagdur til smærri vinnuvirki.
2. Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 2 til 4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.
3. Grundstykkini skulu vera í minsa lagi 200 $m^2$ og í mesta lagi 500 $m^2$.
4. Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.
5. Byggistigið skal ikki fara upp um 0,5.
6. Nýtslustigið skal ikki fara upp um 1,0.
7. Hús skulu ikki vera hægri enn 9 m.

## Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið

- *Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7,* journal nr. 18/03588.
- *Vinnuútstykking á Ovara Hjalla,* journal nr. 22/01377.
- *Broyting av ásetingum fyri B4 øki í almennu byggisamtyktini. Minst loyvda grundstykkjavídd*, journal nr. 23/04693.

## Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)

## Skjøl

- *Serstøk byggisamtykt fyri Ovara Hjalla,* journal nr. 23/04694-3.
- *Almenna byggisamtyktin – áðrenn broyting,* journal nr. 23/04694-4.
- *Almenna byggisamtyktin – eftir broyting,* journal nr. 23/04694-4.

## Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Ovara Hjalla og uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti

Tá ið hoyringsfreistin var farin, 16. februar 2024, hevði umsitingin móttikið eitt hoyringsskriv, sí *Hoyringarskriv 13.02.24.*

- Ynskið um at byggisamtyktin fyri vinnuøkið eisini loyvir handilsvirksemi

Í skrivinum verður grundgivið fyri ynskinum, at staðseting av handilsvirksemi hóskar seg væl, í mun til ta nógvu ferðsluna, sum væntandi fer at koyra framvið eftir nýggja innkomuvegnum. Um fleiri viðskiftafólk vitja dagliga, kann hetta plikta aðrar eigarar av vinnustykkjum á Ovara Hjalla til at halda øki teirra ruddiligt.

Ítøkiliga er nýggja byggisamtyktin ætlað vinnubygging, flokkað í umhvørvisflokkum 2 til 4. Sí talvu niðanfyri:

Talva, sum lýsir Umhvørvisflokkar 1 til 7 og minstu frástøðu til nærmasta bústaðarøki og slag av virki/virksemi

| | Minsta frástøða (m) | Slag av virki/virksemi |
|---|---|---|
| Flokkur 1 | 0 | Handlar, skrivstovur og annað líknandi virksemi |
| Flokkur 2 | 20 | Bókbindarar, elekotronikk verkstaðir, royndarstovur |
| Flokkur 3 | 50 | Handverkara virkir og onnur minni tænastu virkir |
| Flokkur 4 | 100 | Matvøruramleiðsla, bilverkstaðir við og uttan sproytukabinu |
| Flokkur 5 | 150 | Maskinverkstaðir, betongvirkir, sláturvirkir |
| Flokkur 6 | 300 | Størri maskinvirkir, betongvirkir, sláturvirkir, asfaltvirkir |
| Flokkur 7 | 500 | Orkuverk, brennistøð, heilvágs- og pesticidframleiðsla |

Sum talvan omanfyri lýsir, so er handilsvirksemið í flokki 1 virkir og/ella virksemi, sum hóskar seg í vanligum bústaðarøki. Handilsvirksemið í flokki 1 hevur vanliga vitjandi og gestir, og verður hugsað um trygdina hjá borgarunum/teimum vitjandi og í meiri býarskipanarligum høpi, so verður tað mett sum ein fyrimunur, um handilsvirksemi verður staðsett tættari at bústaðarøkjum.

Útstykkingin á ovara Hjalla er upprunaliga hugsað til eitt sindur tyngri vinnu, og tað kann tí vera óheppið at staðseta handilsvirksemi har hetta ikki hóskar seg.
Tá hetta er sagt, so eru munir á virksemi í flokki 2, 3 og 4 – og hevur tað í planleggingini verið umrøtt, um møguliga ein partur av útstykkingini á ovara Hjalla, kanska tann man kemur fyrst til, kann gerast til handilsvirksemi í flokki 1. Niðurstøðan hevur verið, at tað helst gevur meining, eins og viðmerkingin vísir á, at loyva handilsvirksemi í parti av útstykkingini, soleiðis at tyngra virksemið verður staðsett heilt innalaga í útstykkingini. Tá er hetta undantaksloyvið treytað av at grannavirksemið tillagar seg virksemi í flokki 1, og at vinnustykkini innanhýsis eru væl skipaði og økið ruddiligt at koma til.

**Viðmerkingar frá umsitingini**

Viðkomandi, sum sendi hoyringsskrivið, hevur fingið bjóðað grundøki til handilsvirksemi í nýggju vinnuútstykkingini á Ovara Hjalla.

**Nýggj skjøl**

- *Hoyringarskriv 13.02.24*, journal nr. 23/04694-10

**Tilmæli**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast í verandi uppskoti til serstaka byggisamtykt og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at loyva handilsvirksemi í serstøku byggisamtyktini.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 68/24 Ársroknskapur og grannskoðanarprotokoll fyri 2023 hjá Westward Ho

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Nevndin fyri Westward Ho | 27.02.2024 | 1/24 | 24/01136-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 72/24 | 24/01136-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 68/24 | 24/01136-1 |

**Upprunin til málið**
Roknskapurin fyri 2023 verður latin Tórshavnar kommunu til góðkenningar sambært § 6 í reglugerð fyri Westward Ho.

Grannskoðaður roknskapur fyri Westward Ho fyri 2023 verður framlagdur.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl** Ársroknskapur 2023 og Grannskoðanarprotokoll 2023

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Nevndin fyri Westward Ho 27. februar 2024:** Roknskapurin góðkendur og undirskrivaður.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Samtykt at góðkenna roknskapin og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 69/24 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 47/24 | 24/00061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 46/24 | 24/00061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 79/24 | 24/00061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 69/24 | 24/00061-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Framlagt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

# 70/24 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 110/19 | 17/03196-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 165/19 | 17/03196-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 232/19 | 17/03196-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 17/03196-1 |
| 14 Eldranevndin | 06.02.2020 | 31/20 | 17/03196-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 181/20 | 17/03196-1 |
| 16 Eldranevndin | 10.09.2020 | 12/20 | 17/03196-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 213/20 | 17/03196-1 |
| 18 Eldranevndin | 15.09.2020 | 15/20 | 17/03196-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 188/20 | 17/03196-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 146/21 | 17/03196-1 |
| 21 Heilsu- og eldranevndin | 14.09.2021 | 24/21 | 17/03196-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 217/21 | 17/03196-1 |
| 23 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 225/21 | 17/03196-1 |
| 24 Heilsu- og eldranevndin | 08.02.2022 | 3/22 | 17/03196-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 41/22 | 17/03196-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 37/22 | 17/03196-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.06.2022 | 156/22 | 17/03196-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 180/22 | 17/03196-1 |
| 29 Heilsu- og eldranevndin | 15.11.2022 | 17/22 | 17/03196-1 |
| 30 Fíggjarnevndin | 16.11.2022 | 279/22 | 17/03196-1 |
| 31 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 263/22 | 17/03196-1 |
| 32 Heilsu- og eldranevndin | 27.04.2023 | 10/23 | 17/03196-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 27.04.2023 | 135/23 | 17/03196-1 |
| 34 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 117/23 | 17/03196-1 |
| 35 Heilsu- og eldranevndin | 12.09.2023 | 21/23 | 17/03196-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 225/23 | 17/03196-1 |
| 37 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 213/23 | 17/03196-1 |
| 38 Heilsu- og eldranevndin | 17.10.2023 | 25/23 | 17/03196-1 |
| 39 Fíggjarnevndin | 18.10.2023 | 265/23 | 17/03196-1 |
| 40 Býráðsfundur | 26.10.2023 | 248/23 | 17/03196-1 |
| 41 Heilsu- og eldranevndin | 19.03.2024 | 7/24 | 17/03196-1 |
| 42 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 77/24 | 17/03196-1 |
| 43 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 70/24 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru léttari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

  Røktaríbúðir kunnu við tí største fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta léttir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

  Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

  Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og snildtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera byggingina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst búpláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | Ár 2010 | Ár 2019 | Ár 2020 | Ár 2025 | Ár 2030 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fólkatal, 80+ ár** | 457 | 669 | 850 | 906 | 1.124 | 1.415 |

**Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)**

| | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2019 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Pláss/Dekningsstig** | 97 | 21,2% | 155 | 23,2% | 222 | 26,1% | 251 | 27,7% | 298 | 26,5% | 298 | 21,1% |
| *har av røktarbúpláss* | 87 | 19,0% | 145 | 21,7% | 204 | 24,0% | 213 | 23,5% | 252 | 22,4% | 252 | 17,8% |
| *har av stutttíðarpláss* | 10 | 2,2% | 10 | 1,5% | 18 | 2,1% | 38 | 4,2% | 38 | 3,4% | 38 | 2,7% |
| *har av røktaríbúðir* | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 | 0,0% | 8 | 0,7% | 8 | 0,6% |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð stødd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð stødd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 $m^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 $m^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið "*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*".

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum

stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**

Í sambandi við ætlanina at staðseta nýtt røktarheim og gera nýggja vegaføring úti í Marknagili, hevur eigarafelagið á Dánjalstrøð sent kommununi mótmæli, har sjónarmiðini í høvuðsheitum eru:

- at neyðugt er at broyta byggisamtyktina til endamálið, tí økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður harðliga mælt ímóti, at býráðið ætlar at strika økið sum D1 øki, tí tey seinastu 30 árini hava tey innrættað seg eftir, at økið er lagt út til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál.
- at eigarafelagið í áravís hevur mótmælt, at ein av mest trafikeraðu vegum í landinum verður lagdur 2-3 metrar frá sethúsabyggingini á trøðni. At leggja ein somikið trafikeraðan veg á hetta D1 økið er so langt burtur frá hesum endamáli, sum til ber at hugsa sær, sí annars mótmælið.

Yvirskipaða ætlanin fyri økið undir Fjalli er samtykt, og verður mett, at staðsetingin til eitt nýtt røktarheim hóskar seg væl í hesum náttúruvakra økinum. Tá tosað verður um býarskipan, typologi og staðsetingar av hesum, verður í dag stórur dentur lagdur á at staðseta heim til eldri í einum nærumhvørvi við nógvum aktiviteti. Her verður serliga hugsað um dagstovnar, skúlar, handil við gerandisvørum eins og bústaðir. Ynski hevur verið frammi um at staðseta eitt røktarheim nærri sjónum, har dentur verður lagdur á eina hugsan um friðsælu. Í veruleikanum verður eitt heim nærri sjónum meiri avbyrgt, bæði í mun til ta fysisku planleggingina og nærveruna í sambandi við gerandislívið. Granskað hevur somuleiðis verið í einsemi hjá búfólki, og vísir granskingin, at nærveran við onnur menniskju hevur sera stóran týdning.

Talan er framvegis um eitt D1 øki, sum framhaldandi verður fríøki, fyri uttan tað økið, sum verður lagt av til sjálvt røktarheimið. Økið, har røktarheimið verður staðsett, verður í tilgongdini broytt til ásetingina D3, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er lagt av til miðstaendamál, umframt skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Arbeitt hevur verið við nýggju vegaføringini, sum er ein liður í eini størri ætlan fyri infrakervið kring Havnina. Leingi hevur ligið í kortunum og tað er somuleiðis av stórum týdningi og neyðugt, at eitt vegasamband millum komandi innkomuveg og Marknagil verður gjørt gjøgnum hetta grøna økið. Her er talan um ein kommunalan veg, og er ætlanin, at niðasti parturin av vegnum verður fyrsta stigið í ætlanini, sum somuleiðis verður atkomuvegur til nýggja røktarheimið. Vegurin verður í størst møguligan mun fluttur yvir ímóti grøna økinum fyri at skapa rúm ímillum veg og verandi bygging, og verða harumframt báðar áirnar varðveittar, sum tær eru í dag. Eftir ætlan leggur vegurin seg niður í lendið, og kemur hann soleiðis ikki at ávirka røktarheimið nakað serligt, umframt at tað verður møguligt at planta á økinum millum veg og útstykkingina, sum eigarafelagið umboðar.

Fyri røktarheims verkætlanina er tað av stórum týdningi, at staðsetingin fyri røktarheimið verður staðfest og samtykt, soleiðis at fyrireikingararbeiðið kann halda áfram. Somuleiðis skal kunnast um, at verður neyðugt at finna aðra staðseting og um hetta dregur út, so kemur hetta at ávirka upprunaligu tíðarætlanina fyri bygging av røktarheiminum. Mælt verður tískil til, at støða verður tikin til um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið.

**Skjøl:**
Eigarafelagið á Dánjalstrøð - mótmæli, journal nr. 17/03196-24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til, um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið, og um verandi staðseting verður samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at halda fast við verandi staðseting og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera staðseting og vegatkomu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot til staðseting av byggingini, soleiðis at byggingin verður flutt út í D3 øki, sum í mun til byggisamtyktina er lagt út til almennar stovnar.
Staðsetingin er tillagað vegaprosjekt, sum fyriliggja sum fyribils ætlanir. Tillagingar kunnu koma fyri, og má roknast við at tað verða tillagingar í mun til endaliga verkætlan.
Byggjast skulu uml. 6600 fermetrar, og er tørvur á einum byggiøki á 11000 fermetrar.
Íbindingarvegurin verður umskipaður, og vegaprosjekt skal gerast ísv. fyrireikingar av Røktarheiminum, soleiðis at linjuføringin er so skynsom sum til ber.

**Skjøl:**
17-031196-29 uppskot til staðseting januar 2020

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at tikið verður undir við uppskotinum til staðseting í D3 økinum
- at skipanaruppskot verður gjørt fyri økið,við vegalinjum og byggiøkjum.
- at farið verður undir lýsa hvussu vit skulu byggja røktarheim í framtíðini.
- at ein byggiskrá til nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður gjørd.
- at upp til kr. 700.000 verða játtaðar til omanfyri nevnda arbeiði.

Umframt at beina málið í eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Hugt hevur verið eftir nýggjum staðsetingum til at byggja nýtt røktarheim og røktaríbúðir í Tórshavn, Hoyvík og Argjum. Tørvur er á einum øki á uml. 20.000 $m^2$ til at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Harafturat skal øki leggjast av til møguliga víðkan/útbygging av røktarheiminum og møguliga fleiri røktaríbúðum. Enn er óvist hvussu stórur tørvurin er á til víðkan/útbygging, men skal hetta nágreinast nærri í tilgongdini.

Høvuðsstaðurin er vaksin nógv, og torført er at finna hóskandi stór økir til endamálið. Neyðugt er tí at hyggja eftir økjum í útjaðaranum á býnum, sum eru partur av býartættingini og býarvakstrarøkjum, umframt teimum møguleikum, sum liggja inni í býnum.

Økið við Stórutjørn er sambært Kommunuætlanini fyrsta býarvakstrarøki, sum skal skipast til ein nýggjan býling í Tórshavn. Hoyvíkin er vaksin nógv seinastu árini, og við mongu íbúgvunum hevði eisini verið hóskandi at bygt eitt nýtt røktarheim í Hoyvík, tí einki er í økinum í dag. Kirkjugarður er skipaður í økinum, og við teimum alsamt fleiri vaksandi hentleikunum, hevði eisini ligið væl fyri at skipað bústaðir til eldru borgararnar í økinum.

Arkitektakapping var í vár um skipan av Stórutjørn, og skal endaliga skipanin og projekteringin setast í verk so skjótt játtan er tøk til hetta. Tá arbeiðið verður raðfest, eigur eitt hóskandi øki at verða sett av til nýtt røktarheim við  røktaríbúðum.

Skjal nr. 17/03196-33 lýsir Stórutjørn og hvat krevst fyri at fara inn á økið við einum røktarheimi.

**Skjøl:**
Staðseting_Stóratjørn, journal nr. 17/03196-33

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum við Stórutjørn, at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum og møguligum tilhoyrandi útbyggingum, og beina málið í býráðið umvegis eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. september 2020:** Útsett.

**Eldranevndin 15. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Eldranevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at finna aðra hóskandi staðseting nærri miðøkinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið vaðr einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin at skipa økið á Stórutjørn er farin av bakkastokki, men er talan um ein longri tíðarkarm, áðrenn nøkur ítøkilig ætlan kann skipast á økinum. Fyri at koma í gongd við verkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum er neyðugt at finna endaligu staðsetingina, og tí hevur verið hugt eftir møguligum øðrum staðsetingum til verkætlanina.

Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Økið, sum verður nevnt Stórabrekka, liggur á eini høvd oman fyri vinnuøkið við Vegin Langa í 100 m hædd við stórslignum útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur somuleiðis út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn. Henda staðsetingin hevur áður verið nevnd í sambandi við at byggja nýtt røktarheim, men gjørdist hetta ikki aktuelt, tí ynski var at byggja bústaðir á Stórubrekku. Henda ætlanin er nú slept, og verður tí mælt til at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á Stórubrekku.

Á Stórubrekku eru umleið 35.000 m$^2$ av lendi, sum byggjast kann á. Tørvur er á einum stórum øki til verkætlanina, umframt at øki skal leggjast av til møguliga víðkan. Stórabrekka liggur innan fyri Klingruna, og er tí longu ein partur av bygda økinum, mótsett Stórutjørn sum fer at liggja sum byggiøki í eitt tíðarskeið, meðan bygt verður. Økið er stórt, og eru góðir møguleikar at byggja lutvíst í einari hædd, sum ynski er um, og at víðka um bygingina seinni, um tørvur er á tí.

Økið liggur millum Dalin Langa og stóra vinnuøkið, sum hevur grivið seg inn undir landslagið. Hetta inntriv, sum er gjørt í lendið í vinnuøkinum, er sera ógvusligt og eirindaleyst sprongt burtur, fyri at fáa fleiri fermetrar til goymslur v.m. Ein trygdargeiri áljóðandi 30 metrar er lagdur parallelt við kantin, og kann ikki byggjast á hesum strekkinum, men kann hetta teljast við í byggistigið.

Vegasamband er frá Klingruni, og lætt er at skipa gøtur og fríøki í økinum, sum kunnu gerast partur av gøtukervinum til Dalin Langa og grøna nærumhvørvið. Góður sólargangur og gott útsýni er til allar síður frá Stórubrekku, tí økið liggur høgt og skránar til allar síður. Lívd er ikki nógv av í verandi støðu, men við

skilagóðari skipan av bygging, fríøki, vøkstri, parkering og atkomum við gøtusambondum, kann lívd fáast til uppihald og gróðursett øki.

Stórabrekka liggur sum framhald av rehabiliterings- og umlættingardeplinum URD, og kann eitt nýtt røktarheim samvirka við stovnin og uttanumøki, sum somuleiðis verður lýst í ritgerðini “Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD”. Í stuttum fevnir uppskotið um sambandi millum endurvenjing og ágóðan av at vera í náttúruni sæð út frá einum sjónarmiði at menniskju liva alsamt longri.

Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er fevnt av umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging. Eitt nýtt røktarheim rúmast ikki innanfyri ásetingarnar, og er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina til umráðispart D3, sum verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt. Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt, og skal nýggj serstøk byggisamtykt tí gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini. Økið á Stórubrekku er partur av matr. nr. 138a, og skal eitt hóskandi øki tí sundurbýtast til endamálið.

Skjøl:
- Stórabrekka - Staðseting (kortskjal), journal nr. 17/03196-34.
- Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD, journal nr. 17/03196-33.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum á Stórubrekku
- at broyta almennu byggisamtyktina og gera nýggja serstaka byggisamtykt
- at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum
- og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við staðsetingini av røktarheiminum og røktaríbúðunum á Stórubrekku í Hoyvík og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Ískoyti**:
Framtíðar røktarheimsbygging – námsferð.

Býráðið hevur samtykt at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum.

Fyrireikandi arbeiðið er farið í gongd. Hetta er stór verkætlan, og sum støðan er við vaksandi tali av eldri borgarum og minkandi arbeiðsmegi, er neyðugt at hugsa nýtt, tá bygt verður. Neyðugt er at tryggja, at eitt nýtt røktarheim er soleiðis bygt og útgjørt at tað í størst møguligan mun tekur atlit til hesa avbjóðing. Í hesum sambandi er neyðugt at eisini vælferðartøknin er hugsað inn í loysnirnar á heiminum.

Ráðstevna um fremtidens boligbyggeri verður í Keypmannahavn 17.-18. november 2021.

https://nohrcon.dk/produkt/temauge-om-byggeri-og-indretning-af-pleje-og-seniorboliger-2021/kobenhavn-2021-11-16/

Tað er Nohrcon www.nohrcon.dk sum skipar fyri ráðstevnuni. Skráin fyri dagarnar er viðfest. Prísur og avsláttur framgongur av heimasíðuni.

Ætlanin er at bygginevndin og eldranevndin saman við viðkomandi fólki frá umsitingini fara til hesa ráðstevnu at kunna seg um og fáa inspiratión til bygging av nýggjum røktarheimi og røktaríbúðum.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla til at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og leggja málið fyri fíggjarnevndina til samtyktar.

**Heilsu- og eldranevndin 14. september 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Kári Johansen og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Nevndin tekur eisini undir við tilmælinum um at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er byrjað at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri hesum arbeiðinum at gera byggiskránna.

Byggiskráin verður eftir ætlan liðug í medio 2022. Og verkætlanin skal eftir ætlan bjóðast út hareftir - ultimo 2022. Bygginevndin hevur tikið støðu til at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Bygginevndin metir, at tað er lættari og betri at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

Ynski er eisini at leggja dent á vælferðatøkni sum heild í røkt í Tórshavnar kommunu. Vælferðatøkni er nógv frammi í verkætlanum í Norðurlondum. Umsitingin er í gongd at gera fáa lýst krøv til vælferðatøkni í byggiskránni, soleiðis at hetta verður knýtt í hesa verkætlan.

Fígging:
Samanlagt eru 10 mió tøkar av løgukarmi konto 2775 eldrarøkt til uppstart, forkanningar, ráðgeving, fyrireiking til útbjóðing av verkætlanini.

- Játtaðar eru 4 mió. av karminum fyri 2021
- Játtaðar eru 6 mió. av karminum fyri 2022

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At játta kr. 4 mió. av karminum fyri 2021, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum

- At játta kr. 6 mió. av karminum fyri 2022, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- Flyta peningin áljóðandi samanlagt 10 mió. á konto 2775 eldrarøkt(íløgur), L27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.
- Geva umsitingini heimild at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti, sum bygginevndin mælir til.
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar við vinnandi ráðgevarafyritøku.

Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at støða verður tikin til leist og útbjóðingarhátt, tá ið byggiskráin er liðug.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er í gongd at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Neyðugt er at taka støðu til, hvør útbjóðingarháttur skal vera, tí m.a. skulu kappingartreytir og útbjóðingarháttur lýsast í byggiskránni.

Tilmælið er at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Mett er at tað er betri fyri verkætlanina at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti sum lýst omanfyri.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2022:** Útsett við atliti til at lýsa ymisku útbjóðingarhættirnar.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Teldupostur sendur limunum í fíggjarnevndini 23. juni 2022: kann fíggjarnevndin taka undir við tilmælinum frá bygginevndini um at bjóða arbeiðið út í høvuðsentreprisu?

**Fíggjarnevndin samtykt við telduposti 27. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum er liðugt. Byggiskráin er endaliga granskað og er nú klár at bjóða út. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu hevur staðið fyri hesum arbeiði at gera byggiskránna.

Verkætlanin varð boðin út til undangóðkenning tann 5. septembur 2022 fyri ráðgevaratoymi. 7 Ráðgevaratoymi hava boðið inn. Høvuðsráðgevararnir í hvør sínum toymi vóru hesir:

ARKITEKTAR 99 / BIG
EYA/CUBO
KONTRAST
MAP
OSBJØRN JACOBSEN / HENNING LARSEN
SNA
ZETA/BRIM

Út frá eini heildarmeting hevur bygginevndin valt at fara víðari við fýra ráðgevaratoymum, sum vóru útvald og grundað á meting av førleikunum hjá umsøkjarunum, hvussu viðkomandi framsendu tilvísingarnar vóru. Tey valdu ráðgevaratoymini eru:

EYA/CUBO
HENNING LARSEN NA
MAP
SNA

Eftir ætlan verður lidna byggiskrá og tilhoyrandi útbjóðingartilfar sent út í hugskots/prosjektkapping í desembur 2022 til omanfyristandandi fýra ráðgevaratoymi, sum skulu lata sítt tilboð inn eftir ætlan í marts 2023.
Fyri tey tilboð, sum lúka treytirnar (eru kondisjónsmessig), men sum ikki vinna útboðið, verður latin samsýning á 350.000,- kr. Peningur er tøkur til endamálið.
Vinnarin fær í boði at skriva sáttmála við Tórshavnar kommunu um uppgávuna. Uppgávan umfatar heildarráðgeving í sambandi við gerð av skipanaruppskoti, verkætlanaruppskoti, forprosjekti, høvuðsprosjekti, útboði í høvuðsarbeiðstøku, umframt uppfylging og eftirlit í sambandi við útinnan. Uppgávan umfatar eisini tilhoyrandi útiøki.

Heildarráðgevingaravtala kemur aftur í nevnd og væntast at verða klár í seinasta lagi í apríl 2023.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At góðkenna byggiskrá, sum fyriliggur.
- Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 15. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí viðmerking at byggitíðin verður partur av kappingartreytunum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2022:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Byggiskrá og tilhoyrandi útbjóðingartilfar varð sent út í hugskots/prosjektkapping í desembur 2022 til niðanfyristandandi fýra ráðgevaratoymi:

EYA
HENNING LARSEN NA
MAP
SNA/SMJ/LBF

Tilboðini komu inn 14 mars 2023

Dómsnevndin hevur eftir gjølla gjøgnumgongd av innkomnu uppskotum, gjørt niðurstøðu útfrá teimum kriterium, sum vóru sett í útbjóðingartilfarinum.

Dómsnevndin hevur 27.03.2023 lagt úrskurðin fyri bygginevndina, sum hevur samtykt at taka undir við niðurstøðuni hjá dómsnevndini.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- At góðkenna úrslitið og dómsnevndarálitið, sum dómsnevndin mælir til og bygginevndin hevur samtykt
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar um projektering og ráðgeving við vinnandi ráðgevarafyritøkuna og venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.
- Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í sáttmálasamráðingum við ráðgevarafyritøkuna EYA, sum vann kappingina um prosjektering og heildarráðgeving av Røktarheimi á Stórubrekku.

Nú fyriliggur uppskot á ráðgevarasáttmála millum Tòrshavnar.kommunu og ráðgevarafyritøkuna EYA.

Samlaði kostnaður á heildarráðgeving er 23.300.000 kr. u/mvg., sum svarar til ein samlaðan kostnað á 24.756.250kr í mvg(6,25%).

Verkætlanin verður eftir ætlan liðugt prosjekterað medio 2024.Vísandi til fylgiskjal 9 verða 16.077.000 u/mvg – sum svarar til 17.081.812,5 v/mvg – brúktar til prosjektering fram til medio 2024. Síðani skulu 7.223.000 – sum svarar til 7.674.437,50 v/mvg – brúkast til eftirlit, prosjekt uppfylging og 1 ára gjøgnumgongd undir byggitíðini, sum er eftir ætlan umleið 3 ár.

Bygginevndin hevur á fundi 12.09.2023 gjøgnumgingið og góðkent sáttmálan, men hevur tað viðmerking til sáttmálan, at fylgiskjal 4, Tíðarætlanin, eigur at verða endurskoðað í mun til at hædd verður tikin fyri neyðugu nevndarviðgerðunum í avvarðandi nevndum. Hetta kemur helst at leingja projekteringstíðarskeiðið nakað.

Umsitingin hevur ætlanir at bjóða størstu byggifyritøkunum í Føroyum at geva tilboð at gera Røktarheimið á Stórubrekku. Hetta verður eftir ætlan klárt at bjóða út í høvuðsarbeiðstøku í august 2024.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingrstjórin, tekniski stjórin, býararkitekt-urin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

• at taka undir við fyriliggjandi uppskoti upp á ráðgevarasáttmála, tó við fyrivarni um at fylgiskjal 4, Tíðarætlanin, verður endurskoðað.
• at játta samlaða kostnað á heildarráðgeving á 24.756.250krv/mvg., fíggjað soleiðis:

□□15 mio. kr. av karminum LK 27012 nýtt røktarheim við røktaríbúðum at flyta á L 27012 røktarheim við røktaríbúðum
□□2.081.813 kr. er tøkar á L 27012 og verða somuleiðis brúktar til endamálið
□□Restin av upphæddini sum ikki fellur fyrrenn í 2025, 7.674.437 kr. verður játta á FÆ 2025 til L 27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.

• at geva umsitingini heimild at bjóða út í høvuðsarbeiðstøku til størstu byggifyritøkurnar í Føroyum í 2024, tá ið verkætlanin er liðug prosjekterað og klár at bjóða út.
• at geva umsitingini heimild at fara í sáttmálasamráðingar við vinnandi byggifyritøku, sum hevur besta tilboðið at byggja Røktarheimið á Stórubrekku.
• Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 12. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekteringin av Røktarheiminum á Stórubrekku er byrjað. Ráðgevarafyritøkurnar EYA og CUBO hava miðvíst verið í tøttum samstarvi við umsiting og brúkarar at skipa og disponera sjálvan bygningin og allar funktiónir í bygninginum. Hetta arbeiðið hevur gingið sera væl, og nú er skipanaruppskotið liðugt. Klárt er nú at fara undir næstu stig í prosjekteringini - prosjektuppskotið.

Bygginevndin hevur á fundi 16.10.2023 gjøgnumgingið og góðkent skipanaruppskotið av Røktarheiminum á Stórubrekku. Bygginevndin tekur undir við og góðkennir dispositiónsuppskotið treytað av, at prosjektið

verður tillagað í prosjektfasuni soleiðis, at komið verður at uppruna fermetrum og targetprísi sambært byggiskránni uttan at ávirka seingjar- og røktardeildir.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, miðfyrisitingarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- at taka undir við fyriliggjandi skipanaruppskoti og við teimum treytum, sum bygginevndin mælir til
- at beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 17. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Málið um endaliga vegastrekkið inn til Røktarheimið er staðsett og verður lagt fyri ferðslunevndina í mars 2024. EYA er ráðgevið fyri røktarheimið. Umsitingin hevur verið í samráð við EYA um at projektera arbeiðið at gera íbindingina av atkomuvegnum og øllum leiðingum til røktarheimið á Stórubrekku. Ynskiligt er at hava sama ráðgeva at standa fyri samlaða arbeiðinum. Neyðugt er at hava projekteringina av íbindingini avgreidda í byggimyndugleikafasuni.

Kostnaðurin fyri alla projektering, ráðgeving og eftirlit til íbinding er kr. 240.000 u/mvg. Hetta svarar til 255.000 v/mvg(6,25%)

Eftir ætlan skal vegurin prosjekterast og bjóðast út saman við samlaðu verkætlan ultimo 2024.

Peningur til sáttmálan til omanfyristandandi er tøkur á konto 2775-L27012

Málið hevur verið viðgjørt í bygginevndini sum tekur undir við ætlanini.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, fyrisitingrstjórin, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla Heilsu- og eldranevndini til:

- at taka undir við fyriliggjandi leisti at biða verandi ráðgevaratoymi gera omanfyristandandi arbeiðið

- at játta samlaða kostnað á ráðgeving, prosjektering og eftirlit á 255.000,00 kr v/mvg.

fíggjað soleiðis:
255.000,00 v/mvg verður tikið av konto 2775-L27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.

- at geva umsitingini heimild at bjóða avleidda verkætlan út saman við samlaðu verkætlan ultimo 2024
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. mars 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Samtykt at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 17:30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen |
| Súna Mørk | Bjørg Dam | Jákup Dam |
| Gunvør Balle | Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |
| Turið Horn | Birita Baldvinsdóttir Iversen | Jóhan Petur Eyðfinnur Johannesen |
| | Bogi Andreasen | |